# BROT ÚR FØROYA SØGU

# Brot úr Føroya søgu

Fróðskapur og Landsskjalasavnið
Tórshavn 2010

**Brot úr Føroya søgu**
© Forlagið og høvundarnir
Útgevari: Fróðskapur og Landsskjalasavnið
Ritstjóri: Lena Nolsøe
Permumynd: Finnur Justinussen
Perma, umbróting, prent og innbinding: Føroyaprent
Stuðlað útgávuni: Mentanargrunnur Landsins
ISBN: 978-99918-65-29-4
Tórshavn 2010

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihald

Fororð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

*Arne Thorsteinsson:*
Jarðarbøkur og jarðarognir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

*Páll Nolsøe:*
Magnus Heinason - søgan um eitt justitsmorð? . . . . . . . . . . . 21

*Rolf Guttesen:*
Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr . . . . 43

*Lena Nolsøe:*
Stríðið um skjølini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 66

*Hans Andreas Dam Joensen:*
Kongligi einahandilin – meira enn ein handil . . . . . . . . . . . . 85

*Andras Sólstein:*
Kgl. einahandilin í Klaksvík 1837-1856 . . . . . . . . . . . . . . . . . 98

*Jógvan Ravnsfjall:*
Handilin hjá Jørgen Bech og Sønner í Klaksvík 1880-1900 . . 112

*Anja Wenningstedt:*
Hví spøkir Jeremias? . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 123

*Erland Viberg Joensen:*
Arbeiðara- og fakfelagsrørsla í Havn fram til 1950-árini
– og skjølini á skjalasavninum ABA . . . . . . . . . . . . . . . . . . 136

*Hanna í Horni:*
Bretska hersetingin av Føroyum undir 2. veraldarbardaga
– við serligum atliti at leiklutinum hjá Hilbert amtmanni
og Reventlow, danska sendimanninum í London . . . . . . . . . 155

# Fororð

Í 2007 vóru 75 ár liðin, síðan Landsskjalasavnið varð sett á stovn. Sama ár kom fyrsti partur av savninum hjá Kongliga Einahandlinum í Føroyum, sum í 1889 var flutt til Rigsarkivet í Danmark, aftur til Føroya. Hesar hendingar vórðu hátíðarhildnar við tiltaki í Norðurlandahúsinum 31. august og 1. september sama ár. Har fór m.a. tann formliga handanin av skjølunum frá Kgl. Handlinum fram. Ein framsýning var sett upp við úrvali úr hesum skjølum og øðrum skjølum um føroysk viðurskifti, sum eisini vóru í varðveitslu á Rigsarkivet.

Fyri at lýsa, hvør brúkar tílík skjøl og hvussu tey kunnu brúkast í granskingarhøpi, heitti Landsskjalasavnið á ymisk fólk um at greiða frá gransking síni. Einasta treyt, sum varð sett teimum, var, at evnið skuldi vera úr Føroya søgu, og at granskingin skuldi vera grundað á skjalatilfar.

Úrslitið var fyrilestrarøðin „Brot úr Føroya søgu", sum varð hildin 1. september. 10 sera áhugaverdir fyrilestrar, sum lýsa Føroya søgu úr ymiskum sjónarhornum, og í tíð frá um ár 1500 til um 1960. Hóast nógvir áhoyrarar vóru til fyrilestrarnar, vóru nógv, sum heittu á Landsskjalasavnið um at fáa hesar fyrilestrar givnar út. Summir fyrilestrahaldarar høvdu eitt nærum liðugt handrit, meðan aðrir bert nýttu leiðorð sum grundarlag at tosa út frá. Tí er tað ymiskt, hvussu nógv eftirarbeiði kravdist fyri at gera fyrilestarnar til bókgrein.

Fyrilestrahaldararnir skulu hava stóra tøkk fyri arbeiðið, teir hava lagt í hetta greinasavn. Landsskjalasavnið takkar eisini Anfinni Johansen, sum hevur rættlisið bókina, og forlagnum Fróðskapi fyri at geva bókina út.

*Tórshavn í desember 2009*
*Lena Nolsøe*

# Inngangur

Savnindi ella skjøl eru kanska týdningarmiklasta kelda til Føroya søgu. Við ávísum fyrivarni ber til at siga, at skjøl framleidd í sambandi við (søguligar) hendingar, eru mest álítandi og beinleiðis keldur til hesar hendingar. Uttan hesar keldurnar hevði verið nærum ógjørligt at rekonstruera nógvar av hesum hendingum.

Líka síðani Landsskjalasavnið varð sett á stovn í 1932, hevur stovnurin varðveitt savnindi, ið hava søguligt virði, so at hesi savnindi kunnu verða tøk fyri brúkarum, harundir søguranskarum. Hetta hevur m.a. verið gjørt við at hava lesistovu á savninum, har møguleiki hevur verið at tikið fram savnindini frá goymslunum at granska í.

Tíðirnar broytast, og tað gera eisini krøvini til eitt nútímans skjalasavn. Tað er ikki nokk at hava vanliga lesistovu longur. Brúkarar seta í dag onnur krøv, og tí verður Landsskjalasavnið eisini noytt at endurskoða, hvussu tað best kann røkka sínum endamáli. Síðani 2003 hevur Landsskjalasavnið arbeitt miðvíst við at breiða vitan um savnindi, skjalagoymslur og søgulig skjøl. Hetta hevur m.a. verið gjørt við at hava framsýningar, opið hús, fyrilestrar o.s.fr. Eitt hitt seinasta tiltakið í hesum sambandi er heimasíðan, 'www.history.fo', har mest brúktu søguligu savnindini eru vorðin tøk á internetinum fyri øllum, sum hava hug at granska í teimum.

Sum part av hesi tilgongd hevur Landsskjalasavnið seinastu árini havt ætlanir um at geva út tilfar í bók, grundað á skrivligar keldur og skjalarannsóknir. Hetta fyri at vísa á nyttuna av skjalarannsóknum í sambandi við gransking og skriving av snøgt sagt øllum evnum innan føroyska søgu. Higartil hava fíggjarligu karmarnir ikki verið til vildar. Áður hava landsskjalavørðar og onnur starvsfólk á Landsskjalasavninum givið út søguligt granskingartilfar, men hetta er altíð gjørt antin í sjálvdrátti ella í sambandi við útgávur hjá øðrum, antin fíggjað av persónunum sjálvum ella fíggjað av øðrum størri

verkætlanum. Við tiltakinum, 'Brot úr Føroya søgu', hevur eydnast Landsskjalasavninum at savna saman greinir til hetta rit, og í samstarvi við Fróðskap er eydnast at fáa hetta givið út í bók.

Eg skal vegna Landsskjalasavnið takka BP Amoco Exploration (Faroes) Ltd., Tórshavnar Býráð og Mentamálaráðnum fyri fíggjarligan stuðul til tiltakið, 'Brot úr Føroya søgu', sum varð hildið í sambandi við, at Landsskjalasavnið fylti 75 ár í 2007. At enda vil eg takka Fróðskapi fyri eitt gott samstarv og fyri, at tey vilja geva út hetta greinasavn.

*Sámal Tróndur Finnsson Johansen*
*landsskjalavørður*

*Arne Thorsteinsson*

# Jarðarbøkur og jarðarognir

Áður í tíðini hevði jørðin avgerandi týdning fyri livilíkindi hjá so at siga øllum menniskjum. Í Føroyum var jørðin hjartað í eini framleiðsluskipan, sum fevndi um jarðarbrúk, neyta- og seyðahald, fuglaveiði, kópaveiði og grind, ja, enntá útróðurin við. Hyggja vit at viðurskiftunum í Norðurlondum og Europa annars, síggja vit, at í stóran mun var ríkidømið hjá samfelagsstovnum sum kongsvaldi, aðali, kirkjum og kleystrum og hjá múgvandi einstaklingum við kjølfesti í teimum gjøldum, hesi fingu frá leigulendingum teirra. At halda skil á jarðarognum sínum og krøvum mótvegis leigulendingunum vóru jarðarbøkur eitt neyðugt amboð hjá stóru jarðareigarunum.

## Fyrisitingarligar jarðarbøkur

Men heitið jarðarbók verður eisini mangan nýtt um almennar skráir yvir alla jørð og aðrar ognir í einum landi, sum kongsvaldið hevur latið gera at meta um skattaorkuna og at halda skil á skatta- og øðrum krøvum mótvegis tegnum sínum. Slíkar fyrisitingarligar jarðarbøkur eru tær elstu, sum varðveittar eru.

Tann allarelsta jarðarbókin – í hvussu so er í okkara parti av heiminum – er tann, sum normannarahertogin Vilhelm í 1086 læt gera í Onglandi, eftir at hann hevði tikið sær kongsvaldið har í 1066. Henda jarðarbókin er yvir alla jørð í Onglandi og fastognir, sum kongur kundi nýta sum skattagrundarlag. Heitið, hon fekk,

Domesday Book, sigur helst nakað um, hvussu umtókt hon var millum manna.

Í Danmark læt Valdemar kongur 2. eisini eina slíka jarðarbók gera í 1231, somuleiðis fyri at kunna meta um skattaorkuna. Hesar heildarskráir yvir allar jarðarognir í einum landi kunnu vit kanska nevna teir fyrstu matriklarnar. Í Danmark og í Noregi vórðu nýggir matriklar gjørdir seint í 17. og í 18. øld, og í Íslandi varð gjørd ein jarðarbók yvir allar jarðarognir tíðliga í 18. øld.

Eftir at ein jarðarskattur, matrikulskatturin, um miðju 17. øld varð kravdur í Føroyum, varð á hvørjum ári skrivað ein sonevnd matrikulbók. Eingin teirra er tó varðveitt fyrr enn frá 1705 og framyvir. Í matrikulbókunum er roknað upp bygd fyri bygd, hvørji festi, ið eru, og hvussu nógvan matrikulskatt hvørt teirra skal lata, síðan verður skrivað, hvussu nógv keypijørð, t.e. fyrrverandi aðalsjørð, sum er vorðin seld, er í bygdini, og hvør matrikulskatturin av henni er, og at enda sæst, hvussu nógv óðalsjørð er í bygdini og samlaði matrikulskatturin av henni. Yvirlit yvir allar jarðir, sonevnd „jordfortegnelser“ vórðu í Føroyum gjørd fyri miðjuna av 19. øld, og eftir at gjølligar metingar av jarðargóðsku og møguligum framleiðsluvirði vórðu gjørdar bæði av jarðum og haga, varð Taxatiónsprotokollin útgivin í 1873.

**Skattur og jørð**

Okkurt skal verða nevnt um skatt og jørð. Skattur kundi í miðøld verða lagdur á so at siga alt, sum hugsast kundi. Gitin er Eirikur, kongur í Danmark, eyknevndur „plovpenning“, tí hann tók skatt av øllum plógvum í landinum. Annars var jørðin vanliga skattaobjektið í Danmark.

Í Noregi varð skattur kravdur sum ein brotpartur av landskuldini. Har leigulendingar sótu á jørðini, varð landskuldin kend, men eisini av ognarjørð, sum bóndin sjálvur átti og tí ikki rindaði landskuld av, skuldi latast skattur. Jarðarrokningin um alt Noreg var tí í miðøld grundað á landskuldina – ella potentiellu landskuldina ognarjørðini viðvíkjandi, soleiðis at t.d. 1 mørk í jørð í Noregi merkti so nógva jørð, sum 1 mørk í peningi varð latin av í landskuld.

Í Íslandi og Føroyum lótu menn ikki skatt av jørðini í miðøld. Her lótu teir menn, sum vóru hildnir at vera mentir at lata skatt,

upprunaliga eina og somu upphædd hvør, uttan mun til ríkidømi ella inntøku. Skattbóndalistar vóru tí nóg mikið her. Fáir eru tó varðveittir úr Íslandi og eingin úr Føroyum úr miðøld.

### Eigarajarðarbøkur

Hitt slagið av jarðarbókum, har ein jarðareigari letur skriva yvirlit yvir jørð sína, kunnu vit nevna eigarajarðarbøkur, og er tað hesar jarðarbøkurnar, vit nú skulu umrøða. Elsta eigarajarðarbókin, vit kenna úr Norðurlondum, er helst jarðarbókin hjá bispasætinum í Bergen, nevnd Bergens Kalvskinn. Hon er frá uml. 1350. Eisini frá erkabispasætinum í Tróndheimi eru jarðarbøkur varðveittar úr miðøld, ein frá 1398 og onnur frá 1432. Fyri okkum í Føroyum er tað av áhuga, at eisini jarðarbøkur hjá Munkalívs kleystri í Bergen eru varðveittar frá 15. øld, tí tað kleystrið átti nakað av jørð í Føroyum.

### Jarðarbøkur kongs frá 1584

Eftir trúbótina gjørdist kongur størsti jarðareigari í Føroyum. Elsta varðveitta jarðarbók kongs er frá 1584. Í henni er øll kongsjørðin á hvørjum einstøkum kongsfesti skrásett, á leið helmingurin av allari jørð í Føroyum, men sjálvandi ikki ognarjørð, kleysturjørð ella aðalsjørð. Jarðarbókin fevnir ikki bert um jørðina; húsaognir undantiknar fevnir hon um allar ognir kongs í landinum, tað veri seg jørð, tað veri seg seyð, neyt, svín ella annað, sum leigulendingar hansara brúktu og tí høvdu skyldu at uppihalda og lata kongi leigu av.

Hetta ger føroysku jarðarbøkurnar til tær greiniligastu, eg veit um at siga í Norðurlondum, og tí skil tær, sum – saman við roknskaparbókunum – geva okkum tær bestu og greiniligastu søguligu upplýsingarnar. Jarðarbókin er at rokna sum ein álíkning. Hon sigur frá tí, sum bøndurnir skuldu gjalda kongi. Um teir rindaðu tað, teir skuldu, fáa vit ikki at vita úr jarðarbókini, men úr roknskaparbók fútans fyri sama ár. Í 16. øld hevur fútin – ella skrivari hansara – á hvørjum ári sitið og skrivað eina jarðarbók og eina roknskaparbók. Í roknskaparbókini stendur tað, sum veruliga er goldið av tí, sum er ásett í jarðarbókini. Hevur ein bóndi einki goldið tað ávísa árið, er hann tí ikki at finna í roknskaparbókini. Ár 1600 broytti fútin tó roknskaparhaldið nakað, soleiðis at jarðarbók og roknskaparbók gjørdust tann sama.



*Frumrit og avskrift av fyrstu síðu í jarðarbókini fyri 1584. (Rigsarkivet. Regnskaber 1559-1660, lensregnskaber. Lensregnskaber 1559-1662, pk. 487).*

## NORDERØE

### Vaage

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5 | gn | Pouill Ellinngssenn | 1 | gn i skat |
| | | Jord 4 mk | 2 | gn |
| | | Faar 40 | 2 | gn |

### Vpsallum

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | gn | Joenn Pouelssenn | 1 | gn i skat |
| ½ | gn | Erlennder Erichssenn | ½ | gn i skat |
| 1 | gn | Joenn Michellssenn | 1 | gn i skat |
| ½ | gn | Inngeller Thrude datter | ½ | gn i skat |
| 3 | skind | Jenns Joennssenn | 3 | skind i skat |

### Gierdum

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6 | gn | Oluff Oluffssenn | 1 | gn i skat |
| 6½ | skind | Jord 6½ mk 50 alen | 3 | gn 6½ skind |
| | | Faar 40 | 2 | gn |

### Latris

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | Gylden | 14 | |
| | | Skind | 9½ | |

Jarðarbókin fyri 1584 er ikki tann fyrsta jarðarbók kongs. Hon er tann elsta av teimum, sum varðveittar eru. Í henni verða eldri jarðarbøkur umrøddar. Nær umboð kongs í Føroyum eru farin at føra roknskapir, vita vit ikki. Fyrstu ferð, vit síggja bók umrødda, har gjøldini til kongs hava verið uppskrivað, er í 1524. Hvørji hesi gjøld tá hava verið, noyðast vit at hugsa okkum til: Kongsskatturin, jarðarleiga av teimum uml. 130 mørkum í jørð, kongur tá hevur átt, nakað av leigu fyri neyt, seyð og aðra innstøðu á kongsjørðini og helst eisini bøtur til kongs.

Í 1524 var trúbótin enn ikki komin, og enn hevði kongur tí ikki lagt kirkjujørðina undir seg. Tá trúbótin kom eini 15 ár seinri, varð øll tann velduga kirkjuognin tikin av kongsvaldinum, og gjørdi hetta kong til tann størsta jarðareigaran í landinum. Vit mugu halda trúbótina vera eitt tað størsta fíggjarliga bakkast í søgu landsins, tí avleiðingin gjørdist, at á leið helmingurin av árliga avkastinum av

vinnuni, sum fyri trúbótina hevði virkað í landinum sjálvum, nú hvarv av landinum niður í kongskassan.

Hvør var henda kirkjujørðin, sum nú gjørdist kongsjørð, og hvør var tann gamla kongsjørðin? Hesar spurningar fáa vit ongantíð fulla greiðu á, tí heldur eingin jarðarbók yvir ta gomlu kirkjujørðina er at finna. Neyvan hevur borið til hjá kirkjuni í miðøld at umsita ognir sínar uttan jarðarbøkur, og vit noyðast at hugsa okkum, at biskupur hevur havt sína jarðarbók yvir biskupsgóðsið, tær einstøku kirkjurnar hava helst havt skráir yvir ognir sínar og tey einstøku prestaembætini somuleiðis, men einki av hesum er til meir.

Longu í 1541 tykjast kirkjuligu jarðarbøkurnar at hava verið burtur. Tær báðar aðalsættirnar Rosenkrants og Benckestock áttu tá út við 300 merkur í jørð í Føroyum, og hetta árið skuldi norski aðalsmaðurin Trond Benckestock til Føroya at hyggja til ognir sínar. Tá embætismenn kongs frættu hetta, varð umhugsað at biðja Trond Benckestock um at gera kongi eina jarðarbók yvir føroysku kirkjujørðina. Um tað varð gjørt ella ikki, vita vit ikki. Eingin slík jarðarbók er til í hvussu so er.

## Hvat stendur í jarðarbókunum?

Jarðarbøkur og roknskaparbøkur kongs eru frálíkar søguligar keldur og hava verið nógv brúktar í ymiskari hugvísindaligari gransking. Tær hava verið høvuðskeldur í bústaðanavnagransking og persónsnavnagransking og í søguligum granskingum av búskaparviðurskiftum, sosialviðurskiftum, rættarviðurskiftum og mongum øðrum í 16. og 17. øld.

Allar jarðar- og aðrar ognir kongs – undantikið kongshúsini á festunum, sum leigulendingurin ikki skuldi lata leigu av – standa skrivaðar í jarðarbókunum saman við tí leigu, sum leigulendingurin skuldi rinda kongi. Har stendur, hvussu nógva jørð, hvør einstakur bóndi sat við, og hvør jarðarleigan var, hvussu mong neyt og neytaleigan, hvussu nógvan seyð, kongur átti á festinum, og seyðaleigan o.s.fr.: hestar, ryssur og svín. Í so máta eru føroysku jarðarbøkurnar nógv greiniligari og meira upplýsandi enn tær íslendsku, norsku og donsku jarðarbøkurnar, sum eg havi sæð. Men fyri hvønn bónda stendur fyrst, hvat hann skal rinda í skatti, og sigur tað okkum so mikið, at jarðarbók kongs av fyrstan tíð hevur verið ein skattbóndaskrá, sum kongsjørðin er blivin krøkt uppí, fyrst tað kongur átti í

miðøld, og eftir trúbótina eisini tær veldugu kirkjuognirnar, sum kongur tá legði hald á.

Í jarðar- og roknskaparbókini fyri árið 1600 stendur ein uppgerð yvir allar ognir kongs í Føroyum uttan bygningar, og er niðanfyristandandi yvirlit grundað á ta uppgerðina:

| | | |
|---|---|---|
| Skattur | 330 | gl 12½ sk árliga |
| Jørð | 1270 | mk |
| Neyt | 215 | |
| Kvígur | 6 | |
| Tarvar | 7 | |
| Kálvar | 6 | |
| Hestar | 24 | |
| Ryssur (Øgh) | 4 | |
| Svín | 6 | |
| Hondkvarnir | 4 | |
| Hagapartar | 3 | |
| Fuglabjørg | 1 | |
| Áseyður | 18259 | |

Føroyska jørðin verður roknað í markatali, har ein mørk í jørð er at fata sum so nógv jørð, tú einaferð í fornøldini kundi fáa fyri eina mørk í silvuri. Vert er her at leggja til merkis munin millum føroysku jarðarmetingina og norsku jarðarmetingina, har vit í Føroyum hava mett jørðina eftir hennara eginvirði, meðan tey í Noregi hava mett hana eftir hennara landskuldarvirði. Í jarðarbókini fyri 1584 finna vit mørkina deilda í 320 alin, sum merkir, at einaferð í miðøld hevur tú kunnað fingið eina mørk í jørð fyri 320 alin í vaðmali. Tað er vert at leggja til merkis, at vit ikki finna gyllin og skinn í jarðarrokningini í 1584. Gyllin og skinn var peningarokningin í Føroyum tá á døgum, men henda seinmiðaldarliga peningarokningin var enn ikki trongd inn í jarðarrokningina, ella í hvussu so er ikki í jarðarbøkur kongs. Har finna vit ikki mørkina býtta í gyllin og skinn fyrr enn tíðliga í 18. øld. At mørk í jørð tó millum manna hevur verið býtt í gyllin og skinn, síggja vit longu í 1617 í Tingbókini.

**Hvat er jørð?**

Kanna vit hugtakið „jørð" søguliga, síggja vit, at orðið hevur broytt týdning fleiri ferðir gjøgnum øldirnar. Upprunamerkingin á føroyskum er tann velti bøurin, tað sum menniskju við arbeiði sínum hava skapað. Einki annað kemur upprunaliga undir hugtakið „jørð". Hagin, sum vit í dag nevna jørð, hevur bert verið nevndur so seinastu 2-3 øldirnar. Áður hoyrdi hagin til jørðina, „jord med tilhørende hauge" er vanligt at síggja í skjølum frá 1600-árunum, og í 1412 verður tosað um „hagan allan, sum til jørðina liggur". Menniskjaskapta jørðin hevur havt eitt virði í peningi, sum vit nú kenna sum markatalið. Eisini seyður hevði peningavirði og somuleiðis neyt, svín, ross og onnur húsdjór. Tey vóru menniskjaogn og kundu verða seld og keypt. So var ikki við villinidjórum, og so var ikki við haga, bjørgum, fjøru og sjógvi. Hesi høvdu stórt brúksvirði, men einki peningaligt virði, sum kundi grunda undir eitt markatal. Vit kunnu stutt siga, at tað menniskjaskapta var ogn hjá ávísum menniskjum, meðan náttúran ikki kundi hoyra menniskjum til, men onkuntíð varð løgd undir ta menniskjaskaptu jørðina. Frá hesi meginreglu finna vit bert einstøk frávik í Føroyum.

Henda ásannan hevur týdning bæði fyri ognarsøguligu og búsetingarsøguligu fatan okkara. Vit kunnu ikki longur nýta ta ognarsøguligu og búsetingarsøguligu hugmynd, sum vit hava fingið úr íslendskum miðaldarskjølum, at nakrir fáir høvdingar komu til landið og ognaðu sær hvør sín stóra bita. Helst er henda uppfatan íspunnin í miðøld fyri at rættvísgera, at jarðareigarar tá løgdu hagan undir jørð sina. Tørvur er tí á eini nýggjari hugmynd:

Einaferð í víkingaøld komu vit til ónomið land. Vit veltu okkara jørð, hon var okkara ogn. Vit settu okkara neyt og seyð á beiti og vandu okkum við at siga, at hagin var okkara, har okkara seyður gekk. Vit vistu væl, at hann var ikki okkara ogn, tí tað náttúruskapta kundu vit ikki eiga, vit áttu hann bert til brúks, men undir ávirkan av ráki sunnaneftir, sum kom við kristnu kirkjuni, løgdu vit náttúruna undir jørð okkara, og gjørdist náttúran tí okkara ogn umvegis jørðina.

Í 1790unum setti enskamerikanski filosoffurin Thomas Paine (1737-1809) fram hugtakið „natural heritage", t.e. náttúruarvur. Thomas Paine var ein av stóru ideologunum aftan fyri amerikanska frælsisbardagan og hevði stóra ávirkan á frælsisdeklaratiónina. Hans-

ara grundsjónarmið er eisini, at tað bert er tað menniskjaskapta, sum kann vera einstaklingsogn. Í bóklinginum „Agrarian Justice“, sum hann skrivaði veturin 1795-96, sigur hann, at náttúruríkidømið er arvur hjá øllum menniskjum í samfelagnum og kundi ongantíð á rættvísan hátt gerast einstaklingsogn. Sum náttúru roknar hann eisini undirlendið undir veltu jørðini. Ein sjálvsøgd avleiðing var tí, at tey fáu, sum høvdu fingið framíhjárættindi at brúka landið og náttúruna, skuldu gjalda øllum borgarum afturfyri. Paine hevði eitt sera áhugavert hugskot um, hvussu avgjaldið skuldi nýtast. Tað skuldi ikki í statskassan. Av tí at øll menniskju áttu lut í náttúruarvinum, skuldi gjaldið koma øllum til góðar, og Paine skeyt tí upp, at gjaldið skuldi fara í ein serligan grunn, sum øll skuldu hava burturúr, fyrst eina íverksetaraupphædd, tá tey fyltu 21 og síðan eina árliga upphædd, frá tí tey fyltu 50. Hetta man vera elsta uppskot um fólkapensión, sum nakar veit um at siga.

Paine gjørdist illa lýddur av hesum. Tey, sum sótu við serrættindunum, vórðu í øðini. Tá sum nú kundu tey rinda stórar peningaupphæddir sínámillum fyri at nýta náttúruríkidømið, men at rinda øllum teirra part í náttúruarvinum kundi ikki koma upp á tal.

Íverksetanar- og pensiónsætlanir Paines kunnu so vera tað tær eru, men tað er sera áhugavert at síggja, hvussu væl hugsanir hansara um náttúruarv samsvara søguliga veruleikanum í Føroyum, sum vit kunnu lesa hann burtur úr markatalinum og jarðarhugtakinum.

**Bókmentir:**

Hetta fyrilestrarhandrit er einamest ein samandráttur av greinum, eg áður havi skrivað, og sum niðanfyri verður víst til. Í teimum eru eisini tilvísingar til aðrar bókmentir at finna:

Forn búseting í Føroyum. Fróðskaparrit 26. Tórshavn 1978. 54-80.

Jordforhold i det gamle landbrugssamfund. Landinspektøren 1981. 664-678.

Bebyggelse og bebyggelsesnavne på Færøerne. NORNA-rapporter 43. Uppsala 1990. 115-124.

Landbrugstradition og jordetal på Færøerne. Nordatlantiske foredrag. Tórshavn 1991. 20-28.

Merkur, alin og gyllin – gomul føroysk virðismeting. Frøði 1993, nr. 1. Tórshavn. 4-9.

Harumframt skal verða víst til bóklingin hjá

Thomas Paine: Agrarian Justice, 1795-96. http://www.thomaspaine.org/Archives/agjst.html

Um høvundin:
*Arne Thorsteinsson*
Fornfrøðingur, fyrrverandi landsantikvarur.

*Páll Nolsøe*

# Magnus Heinason – søgan um eitt justitsmorð?

Magnus Heinason bleiv avrættaður tann 18. januar 1589 í Keypmannahavn. Deyði Magnusar er ein hin mest umrødda og umstrídda hendingin í Føroya søgu, ikki minst tí deyðadómurin seinni bleiv gjørdur ógildigur. Í hesi grein fari eg at viðgera viðurskifti og áhugamál, ið vóru avgerandi fyri, at lív Magnus Heinasonar fekk so ógvusligan enda.

Lutfalsliga lítið keldutilfar er varðveitt um Magnus Heinason frá hansara samtíð. Serstakliga eru fáar frásagnir, og tær eru allar stuttar. Tó eru lutfalsliga nógv av fyrisitingarligum skjølum, ið serliga stava frá øllum teimum rættarmálum, hann var partur av. Men úr keldutilfarinum ber til at seta saman partar av hansara lívsleið, fyrst og fremst seinastu tíggju árini. Somuleiðis avdúka og geva keldurnar tekin um orsakirnar til, at Magnus misti lívið.

Elsta varðveitta frásøgnin um deyða Magnusar finst í *Sylva Chronologica Circuli Baltici*, ið var útgivin 1624. Høvundurin Niels Heldvad (1564-1634) sigur soleiðis frá:

*In diesem Jahr* (1589) *ist in Dennemark der edle und berühmte Sehan Magnus Heinesen den 8 Febr. Umb 3 uhr in der Morgenstunde zu Kopenhagen mit der Schwerdt hingerichtet worden.*[1]

Vit síggja næstan fyri okkum ta myrku og køldu morgunstund, har

Magnus mestsum í loyndum verður tikin av døgum. Og tað er eisini dramatikkur, stríð og gølur, ið girðir lív og deyða Magnusar.

Restin er *søga*. Rentumeistarin Christoffer Valkendorf hevur av eftirtíðini fingið álagt skuldina og skommina fyri deyða Magnusar. Men hvørjar umstøður vóru orsøk til, at Magnus varð tikin av døgum, og hvønn leiklut hevði Christoffer Valkendorf?

**Magnus Heinason**

Vit vita lítið um ungu árini hjá Magnusi. Hann var sonur prestin og seinni próstin í Føroyum, Heina „Havreka" Jónsson og seinnu konu hansara Gyrid Arnbjørnsdatter. Fyrra giftan hjá Heina var við Húsarvíkar gentuni Herborg, ið var av stórbóndaætt og í ætt við Húsfrúnna í Húsavík. Tey fingu m.a. sonin Jón, ið gjørdist løgmaður í Føroyum, og Magnus hevði tískil tilknýti til stórbóndastættina í Føroyum.

Magnus varð helst føddur miðskeiðis í 1540unum. Óvist er, um Magnus var føddur í Føroyum ella Noregi, men hann vaks so upp í Føroyum.

Meðan Magnus enn var ungur, fór Heini aftur til Noregs, og Magnus fór við. Í Bergen hevði Magnus næstringar, og hesir hava helst fingið í lag, at Magnus fekk skip at føra. Men leiðin gekk skjótt víðari út í heim. Vit vita ikki, hvar hann er næstu árini, men helst hevur hann verið í Niðurlondunum og hevur fingist við handil. Niðurlondini vóru í loysingarkríggi við Spania, og Magnus er allarhelst farin í niðurlendska hertænastu.

Magnus búsettist aftur í Bergen seinast í 1570unum. Í 1579 fekk hann loyvi at reka handil í Føroyum, og sama árið fær hann kaparabræv frá Fríðriki 2. kongi í Danmark.

Tey næstu árini útinti Magnus kaparavirksemi í Norðuratlandshavinum, samstundis sum hann rak handilin í Føroyum.

Magnusar bardagar við sjórænararnar gjørdu hann víðagitnan og góvu honum viðurkenning, eisini frá kongi, Fríðriki 2. Viðurkenningin vaks serstakliga, tá ið Magnus gjørdi roynd at finna sjóvegin til Grønlands. Hóast rannsóknarferðin miseydnaðist, var Magnus heiðraður við hovið.

Danska kongaríkið var eitt hitt mest stættarbundna samfelagið í Evropa, og aðalin var ein afturlatin samfelagsbólkur, álíkur einari kastu.

Magnus vann sær eitt merkisvert sosialt viðrák og uppgongd í samfelagnum, hóast hann var borgarligur. Hann bleiv giftur við aðalskvinnuni Sofie Gyntersberg, og í 1588 fekk hann lutað oynna Egholm í len frá kongi. Hetta hóast aðalin hevði einkarætt til len.

Men Magnus var eisini sera umstríddur. *Norske Sou* er eitt kæruskriv frá 1580unum, har ein ónevndur høvundur greiðir frá og kærir seg um syndarliga standin í Bergen. Magnus verður umrøddur.

*Den ringere adel vil gjerne efterabe den store i at bære silke- og fløjlsklæder, fraadse, drikke, hore etc., men er mere skyldig ved Bryggen, end deres gods er verdt… …Hvilken kjetter og blodskamsbedriver er ikke Magnus Heinessøn.*[2]

Hetta ummæli sigur frá, at høvundurin helt Magnus vera aðalbornan, hóast Magnus aldri bleiv upptikin í aðalstættina.

**Patrónurin Fríðrikur 2.**

Magnus fekk eitt gott samband við Fríðrik 2. Helst hevur talan verið um eitt patrón- og klientsamband millum teir báðar, har kongur eftir øllum at døma gjørdist Magnusar patrónur. Patrónsambandið varð grundað á, at klienturin var vardur av, fekk stuðul og vælvild frá patróninum, ið var ein persónur við valdi og tign. Hendan skipanin hevði um hetta mundið stóran týdning og stóra ávirkan á alt samfelagið, sum var gjøgnumvovið av tílíkum sambondum.[3] Hendan skipanin var til fyrimunar tá í tíðini, har talan var um eitt samfelag við avmarkaðari fyrisiting, har mannagongdir og rættartrygdin hjá tí einstaka ikki vóru nágreiniliga ásett, og tíni rættindi vóru tengd at stættini, tú vart av. Verndin hjá tí einstaka var tí treytað av einum verja, og patrónurin var tískil trygdarnetið hjá klientinum. Og um ein vildi fram á eini yrkisleið, so var tað alneyðugt at hava ein týdningarmiklan patrón.

Magnus hevði eisini tætt samband til aðalsmannin Hans Lindenov (-1610). Lindenov var lensmaður í Bergen árini 1578-86 og seinni yvirdómari í Norðurjútlandi.

Magnus stríddist ikki bert á sjógnum, men lá eisini fleiri ferðir í sakarmálum. Men honum eydnaðist at snúgva sær undan dómi ferð eftir ferð, ikki minst við hjálp frá Hans Lindenov og Fríðriki kongi.

*Kristoffer Valkendorf (Arthur G. Hassø: Rigshofmester Kristoffer Valkendorf til Glorup (1525-1601). En biografi.)*



**Christoffer Valkendorf**

Christoffer Valkendorf varð borin í heim 1525 á ættargarðinum Glorup á Fjóni. Hann varð føddur inn í háaðalin, ið hevði valdið í samfelagnum bæði fíggjarliga, politiskt og sosialt.

Hann bleiv á ungum árum embætismaður í kongsins kanselíi. Longu sum 30 ára gamal í 1556 fekk hann eitt tað týdningarmiklasta embæti í ríkinum, tá hann varð útnevndur til lensmann yvir Bergen, sum varð størsti býur í Norðanlondum.

Í Bergen kom Valkendorf í stríð við Hansar úr Hamburg. Hansarnir høvdu loyvi at reka handil í Bergen, men høvdu mestsum kraddað sær valdið og fóru fram sum harrar yvir býnum. Tað eydnaðist Valkendorf at fáa bilbugt við týskarunum og fáa valdið aftur á hendurnar hjá kongsvaldinum. Hann fór tó ógvusliga fram. Hansarnir klagaðu til kong, og í 1559 avgjørdi Fríðrikur 2. at koyra Valkendorf frá. Hetta førdi til ósemju millum Valkendorf og kong, og endin varð, at Valkendorf fór í útlegd í Saksen. Fólk við hovið meglaðu tó, og Valkendorf bleiv tikin til náði aftur, og í 1560 var Valkendorf aftur í Danmark í tænastu hjá kongi.

Tey næstu árini røkti Valkendorf skiftandi embæti, m.a. sum lensmaður fyri Ísland og Gotland. Sambandið millum hann og kong var tó stríggið, og embætini hjá Valkendorf vóru í útjaðaranum á ríkinum langt frá hovinum og miðdeplinum fyri valdinum.

Men í 1574 bleiv Valkendorf rentumeistari, sum var embæti, sum hevði ábyrgdina av fíggjarviðurskiftunum hjá ríkinum. Tey komandi árini hevði hann somuleiðis onnur ábyrgdarstørv, eitt nú var hann í fleiri tíðarskeiðum statshaldari fyri Keypmannahavn. Valkendorf var ein dugnaligur embætismaður, og hann hevði góð úrslit í Rentukamarinum. Men viðurskiftini millum hann og Fríðrik 2. vóru framvegis trupul. Hóast Valkendorf var partur av háaðalinum og millum ríkastu og valdmiklastu menn í ríkinum, gjørdist hann ikki limur í ríkisráðnum fyrr enn í 1576, og tá var hann vorðin 51 ára gamal. Orsøkin var helst tann, at Fríðrikur kongur metti Valkendorf vera ov ráðaríkan og maktsjúkan. Valkendorf fór ofta um mark og otaði seg inn á økir, sum hann ikki hevði ábyrgdina av og endaði tí ofta í stríði. Men Valkendorf fekk gjøgnum síni embæti stórt vald, og kongur hevur tí eisini helst sæð Valkendorf sum ein, ið var í andstøðu til kongsins vald.

Valkendorf var ógiftur og fekk ongi børn – mann kann bert gita seg til, hví so var. Hann skal hava livað eitt avhaldandi lív og verið ein serskøltur, og Fríðrikur kongur hevur eftir øllum at døma havt fragd av at gera gjøldur burtur úr Valkendorf.

Yrkisleiðin hjá Valkendorf náddi hæddina í 1588, tá ið Fríðrikur 2. var deyður. Krúnprinsurin, tann seinni Kristian 4., var smádrongur, og tí var sett ein verjustjórn, ið skuldi stjórna ríkinum, til Kristian var myndigur. Verjustjórnin varð mannað av Niels Kaas kanslara, Jørgen Rosenkrants, Peder Munk ríkisadmiráli og Christoffer Valkendorf.

Gjøgnum árini hevði Valkendorf fingið nógvar fíggindar. Mótstøðumenn hildu, at Valkendorf hevði kraddað sær ov nógv vald, og tað var tikið frá teimum. Eisini í verjustjórnini var mótstøða, og opið stríð var millum Valkendorf og Peder Munk, ið helt, at Valkendorf royndi at taka valdið á flotanum frá honum.

Endin var, at Valkendorf í 1590 bleiv kroystur úr verjustjórnini og misti sína politiska ávirkan og vald.

Tó skuldu ikki ganga mong ár, áðrenn Valkendorf aftur fekk ábyrgd og vald. Í 1596 bleiv hann útnevndur til ríkishovmeistara av tí nú

myndiga Kristiani 4. Tí hóast illviljan frá Fríðriki 2. hevði Valkendorf altíð verið trúgvur móti kongsveldinum. Í 1601 andaðist Christoffer Valkendorf, og á epitafinum, sum hann sjálvur áðrenn hevði latið gera, heiðraði hann sítt virki og trúfesti fyri kong soleiðis: …*jeg glæder mig i Gud, at jeg har regeret mine tjenere i fred, med sagtmodighed og kærlighed, Gud ske lov! Giv kejseren, hvad kejserens er*.

**Føroyahandilin**

Í 1579 gav Fríðrikur 2. Christoffer Valkendorf boð um at samráðast og fáa í lag handilsloyvi fyri Føroyar við Magnus Heinason. Hetta er fyrstu ferð, vit vita um, at leiðirnar hjá hesum báðum renna saman.

Magnus fekk Føroyahandilin saman við partamonnum sínum í Bergen Hans Pedersen og Søren Anderssen. Tó vóru beinanvegin trupulleikar. Á sumri sama árið rændi enski sjórænarin Thomas Clark í Tinganesi. Magnus gav saman við fútanum eina uppgerð yvir rænda góðsið og fekk nakrar prestar, løgtingslimir og bróðurin Jón, ið var løgmaður, at vátta uppgerðina. Hann bað samstundis um at sleppa frá avgjaldinum til kong fyri at reka handil vegna missin. Tó var uppgerðin ivasom, men Magnus megnaði at sleppa við hálvum avgjaldi tað árið.

Árið eftir kom klaga úr Føroyum um, at Magnus læt ov lítla vøru. Magnus kláraði tó aftur at snúgva sær undan. Helst tí at hann kundi gera sær dælt av sambandinum við Fríðrik kong.

Endin var tó, at handilsfelagið í Bergen misti Føroyahandilin, og loyvi varð 1. november 1581 givið einum felagi í Keypmannahavn við Joachim Thim og Jørgen Kyd, men Magnus skuldi verða partur av hesum nýggja felagi.

**Søren Flue**

Men fleiri og rúgvismiklar ákærir komu undan kavi um óreiðiligheit og svik í handilsvirkseminum hjá Magnusi. Í 1582 sendi Valkendorf fútan Søren Flue til Føroya at kanna standin. Á heysti kom Søren Flue aftur til Danmarkar við álvarsligum ákærum. Magnus framdi svik og misnýtti vald, og bróðirin Jón stuðlaði honum í hesum. Magnus framdi svik í handlinum, m.a. var ein følsk alin nýtt, og Grønlandsferðin var fíggjað við sviki. Søren Flue endaði sín vitnisburð við at lýsa yvir Magnus, at hann fór fram sum valdsharri yvir Føroyum og kúgaði tey fátæku.

*Der som Kongelige Majestæt vil...* (lade) *...Mogens Heinessøn, at må beholde landet, og så regere som han nu gør, da bliver landet slet forarmet og fordærvet, thi han holder sig ikke som en af de andre dannemænd som en købmand alene der på landet, men som en regent over landet, så at de fattige folk frygter ham...*[4]

Ákærurnar førdu til rættarmál bæði í Bergen og Keypmannahavn. Á heysti 1583 var harafturat rættarmál millum Magnus og fyrrverandi handilsfelagar hansara í Bergen Hans Pedersøn og Søren Andersøn, sum ákærdu Magnus fyri svik í rokniskapinum teirra ímillum.

**Magnus verjir seg**

Magnus sendi kongi bræv, har hann vísti øllum ákærunum frá sær og segði seg vera fyri ágangi.

*…Efter da jeg fattig Mand, uskyldige og uafladelige, en tidslang i adskillige måder, haver været anfægtet, og endnu daglig eftertragtet, efter min endelige fordærv og undergang ved jeg ingen anden til flugt, end til Gud Almægtigste og Eders Kongelige Majestæt…*[5]

Hetta er einasta skriv av Magnusar hond, sum er varðveitt og fyrsta próvgrund um, at Magnus segði seg verða forfylgdan og lá í stríði við mótstøðumenn.

**Magnus missir handilin**

Á sumri 1583 fekk Magnus Løgtingið at geva sær og Jón besta skotsmál. Men endin var tó, at hann misti handilsloyvið, og Jón var settur frá sum løgmaður. Magnus slapp tó undan dómi fyri svik, ikki minst tí Hans Lindenov stuðlaði hann og skrivaði til kong og kunngjørdi, at Magnus ikki kundi dømast at missa lív ella ognir, tí haldgóð prógv vóru ikki. Men Magnus fekk ikki Føroyahandilin aftur.

Í februar 1584 gav Valkendorf kongi eina skrivliga frágreiðing um, hví Magnus hevði mist handilsloyvið. Í frágreiðingini legði hann øll prógvini um svik fram fyri kong. Men samstundis kundi Valkendorf ávísa, at síðani Magnus hevði mist Føroyahandilin, vóru inntøkurnar til statskassan vaksnar munandi.

Hóast nógv prógv vóru móti Magnusi, so má havast í huga, at hesi vóru fingin til vegar av Valkendorf. Og Valkendorf hevði grundir at fáa handilin frá Magnusi. Í 1578, árið undan Magnus fekk Føroya-

handilin, hevði kongur eftir ráðum frá Valkendorf avgjørt, at kongsveldið skuldi reka handilin. Hetta var helst fyri at fáa skipaði viðurskifti, men hendan fyriskipan gagnaði Valkendorf eisini persónliga, tí handilin gekk úr Keypmannahavn, og hann hevði tætt samstarv og samband við handilslívið í Keypmannahavn.

Magnus hevur helst ætlað sær at fáa Føroyahandilin aftur, men um hetta mundið í 1584 varð hann longu drigin upp í eitt annað og uppaftur meira kontroversielt stríð.

## Blóðskemd – gølan um Gyntersbergsystrarnar

*Magnus Heinessøn besov to systre med deres faders vidende, men han og andre af de fornemste folk magede det saa, at han tog den ene til egte. Almuen i Bergen ved nok, at denne hofferdige og løsagtige fugl der har bedrevet flere slige stykker.*[6]

Á heysti 1581 ákærdi aðalsfrúgvin Margretha Gyntersberg Magnus fyri neyðtøku og blóðskemd. Magnus skuldi hava neyðtikið hana nøkur ár frammanundan, men Margretha hevði dult tað. Margretha varð seinni gift við aðalsmanninum Peder Hanssøn. Men talan var eisini um blóðskemd. Um hetta mundið, á heysti 1581, hevði Magnus eftir øllum at døma havt kynsligt samband við systrina Sofíu, og tí varð skipað fyri, at hann skuldi giftast við Sofíu. Men nú avdúkaði Margretha sítt loyndarmál fyri manninum og familjuni. Peder Hanssøn stuðlaði konuni í ákærunum, og Magnus var stevndur.

Tá í tíðini var kynsligt samband við tvær systrar blóðskemd og trúarbrot og bleiv revsað við deyðadómi. Men um Magnus hevði neyðtikið Margrethu, so átti hann alla ábyrgdina.

Partarnir møttu fyri rættin í Bergen 11. september 1581. Magnus noktaði seg sekan og stóð tí orð ímóti orði. Hans Lindenov, lensmaður í Bergen og vinur Magnusar, var til staðar, og hann kravdi, at Magnus skuldi sleppa at gera eið, og hetta var játtað. Magnus svór, at hann var ósekur, og ræcurrent dømdi, at eiðurin skuldi standa við til annað var prógvað. Hans Lindenov læt síðani Margrethu fongsla.

Gyntersbergfamiljan má hava kent sína æru gingna ov nær og hevur viljað endurreist familjunnar æru. Ein bróðir Margrethu fór til hennara, og við makt noyddi hann hana at undirskriva eina váttan. Í váttanini svór Margretha, at hon hevði logið, og at tað var maður

hennara, sum hevði trýst hana til at bera fram ákærurnar, tí hann hataði Magnus.

Tann 25. februar 1582 vóru Magnus og Sofía Gyntersberg gift. Hans Lindenov var vertur fyri brúdleypinum, ið varð hildið á Bergenhus, har Margretha sat fongslað.

Men málið helt áfram. Magnus ákærdi Peder Hanssøn fyri ærumeiðing. Peder Hanssøn var aðalborin, og tí kundi hann bert dømast av ríkisráðnum og kongi. Samstundis kom Margretha við nýggjum ákærum og avdúkingum. Magnus hevði í sínari tíð gjørt hana við barn, men tá ið hon hevði fortalt honum tað, hevði hann bert svarað, at um kvinna liggur við manni, kann tað koma fyri, at hon gerst við barn. Hon hevði føtt barnið í loyndum, men tað doyði undir burðinum. Margretha avdúkaði, hvar barnið var jarðað. Hans Lindenov sendi fólk á staðið, og leivdirnar av einum barni vórðu funnar.

26. januar møttu partarnir á slottinum í Keypmannahavn. Kongur hevði skipað eina dómsnevnd við átta ríkisráðslimum, og ein av hesum var Christoffer Valkendorf. Kongur var tó ikki sjálvur til staðar.

Margretha møtti ikki, tí hon skuldi vera vorðin álvarsliga sjúk, men Valkendorf hevði sent tríggjar prestar til sjúkraleguna, og teir høvdu fingið hennara vitnisburð á blað.

Magnus legði ikki minni enn 28 brøv fram fyri rættin, ið skuldu prógva, at hann var ósekur, men dómsnevndin helt hesi prógv vera so ivasom, at rætturin ikki førdi brøvini til skjals.

Familjan hjá Margrethu hevði skift síðu, og faðirin, Axel Gyntersberg, vitnaði móti Magnusi, og vitnisburðurin hjá Margrethu bleiv lagdur fyri rættin. Hon svór, at hon undir fangaleguni á Bergenhúsi við harðskapi var blivin noydd til at taka aftur ákærurnar móti Magnusi.

Peder Hanssøn varð fríkendur fyri ærumeiðing. Magnus bleiv ikki dømdur, tí hann var tann, ið hevði stevnt. Fríðrikur 2. var ikki staddur í Keypmannahavn, men dómsnevndin heitti inniliga á kong um at taka málið uppaftur.

Men Magnus tók stevningina móti Peder Hanssøn uppaftur, og avgerð skuldi tí fáast á málið á einum rættartingi undir harradøgunum, har kongur og ríkisráðið komu saman.

**Harradagarnir 1584**

Rættartingið skuldi verða við Harradagarnar í 1584, og partarnir møttu, men tá ið málið skuldi fyri rættin, var Magnus rýmdur. Boð um at taka Magnus vóru send út, men Magnus var flýddur úr landinum.

Seinni sendi Magnus kongi bræv, har hann greiddi frá sínari støðu. Hann segði, at hann var blivin hóttur undir Harradøgunum, og hann tí ræddist fyri órættvísari rættargongd. Einki verður sagt um, hvør skuldi hava hótt Magnus, men hann segði, at hann var blivin *besvornet* – at onkur hevði svorið fyri honum – og hetta kann merkja, at umtalaða hóttanin var søgd í vreiði, og at æra hansara varð gingin ov nær. Eitt gott boð er Peder Hanssøn, men eisini Valkendorf, tí hann sum limur í Ríkisráðnum skuldi døma í málinum.

Kongur lovaði Magnusi frítt at koma aftur til Danmarkar, og verja til málið var blivið avgjørt við eitt rættarting av kongi og ríkisráði.

**Magnus í útlegd**

Magnus var farin í útlegd í Niðurlond. Tann 7. juni 1585 fekk Magnus kaparabræv frá Moritz av Orania, statshaldara fyri Niðurlondini. Stutt frammanundan kapraði hann saman við einum skotskum sjórænara skipið The John í Ermasundi.

*14 March 1585. The John of Hull spoiled by Mounce Heneson* (Magnus Heinason) *of Denmark and one Knightson, a Scottishman. The ship, worth 140£, and goods, worth 2420£, were brought to Orkney and kept by Lord Robert Steward. The ship was restored to the owners, but not the goods.*[7]

Undir atsóknini skuldi Magnus sjálvur hava dripið tveir enskar sjómenn. Enska hovið klagaði til Fríðrik kong um atsóknina, men uttan úrslit.

Hóast Magnus var farin í niðurlenska tænastu, so bendir alt á, at hann hevði áhuga í at venda aftur til Danmarkar. Tó má kuril verða komin í sambandið við Fríðrik, tí Magnus hevði ikki bert vanhalgað aðalsfrýr og vanærað aðalsmenn, hann var eisini rýmdur undan Rættartinginum og kongsins hægsta rætti.

**Vísan *Mogens Heinesøn af Norge***
*Jeg haffuer det trist*
*och ved det vist*
*atth tancher løber vide.*

*Och vandrett haffuer ieg udi fremmede landt,*
*alt sidenn ieg vaar ett barnn;*
*mig er saa megit ganget handt,*
*for Gud klager ieg denn harm.*

…

*Nu er her nogenn iblandt,*
*Som vill minn lykke misunde;*
*Endog ieg dølger, de erre vell kientt,*
*Falske erre alle deris grunde.*

…

*Enn dog ieg de tolmodige beer,*
*Denn store nød och quide,*
*Att de mig saa for minn herre*
*haffue beførtt,*
*Baade met falsk och met svig*[8]

Ein varðveitt vísa, ið helst bar heitið: *Mogens Heinesøn af Norge,* og sum er yrkt um hetta mundið og eftir øllum at døma eftir áheitan frá stuðlum Magnusar.

Í vísuni kærir Magnus sína neyð og biður kong og teir ráðandi um at verja seg ímóti ágangi og forfylging. Endamálið við vísuni var allarhelst somuleiðis at avdúka stríðið fyri almenninginum, men eisini at fáa fram, at Fríðrikur var patrónur hjá Magnusi og soleiðis at leggja trýst á kong. Tí um ein patrónur slepti einum klienti upp á fjall, var tað ein vanæra og lastaði alla tignina hjá patróninum.

Eftir øllum at døma eydnaðist ætlanin, og málið við Margrethu Gyntersberg var helst køvt. Tí á sumri 1586 var Magnus aftur í Keypmannahavn, har hann møtti í Rættartinginum, uttan at málið um Margrethu Gyntersberg varð tikið uppaftur.

Hesa ferð hevði Valkendorf stevnt Magnusi. Hetta varð fyrstu og einastu ferð, at Magnus og Valkendorf stóðu sum mótpartar í einum sakarmáli.

**Rættartingið í 1586**

Tann 3. juni 1586 kom Rættartingið saman í Keypmannahavn. Málið snúði seg um eitt bræv, sum Magnus í 1582 hevði sent til býarfútan í Bergen. Í brævinum kundi fáast tann fatan, at Magnus og Valkendorf vóru handilsfelagar. Magnus møtti í rættinum, helst tí hann kendi seg tryggan.

Undir rættarmálinum bedýraði Valkendorf, at hann hvørki hevði verið ella hevði ætlanir um at fara í handilsskap við Magnus og kallaði brævið fyri eitt ...*Løgnagtig skrivelse…*

Hann legði fleiri brøv og skriv fyri rættin og segði, hóast tey ikki høvdu nakað við málið at gera, at tey skuldu prógva Magnusar siðleysa og svikafulla lyndi.

*Og havde forne Christoffer Vallchendorff nogen andre breve for os tilstede hvor med han mente sig noksom at ville bevise hann [Magnus Heinason] letfærdighed... …videre Berettede Christoffer Vallchendorff at han havde endda adskillige breve, Begærede de… …ikke til denne sag noget vedkom, men på dem at man dissbeder kunne forfare forne Mogens Heinessens letfærdighed...*[9]

Hann kom eisini við fleiri ákærum og legði skrivligar vitnisburðir fram. M.a. frá nøkrum fiskimonnum, ið vitnaðu, at Magnus í Norðsjónum hevði rænt nakrar tunnur við fiski og korni frá teimum.

Framferðin hjá Valkendorf vísti, at hann fyri alt í verðini ikki vildi setast í samband við Magnus. Við at draga enn fleiri og óviðkomandi prógv og ákærur í málið royndi Valkendorf at fremja karaktermorð á Magnus – hann vildi lýsa Magnus sum svikafullan og ósiðiligan, og hann vildi hava hetta fram fyri Fríðrik kong og teir ráðandi.

Magnus vísti, sum væntað, allar ákærurnar frá sær. Nevnda brævið var ikki skrivað av honum, men av einum skrivara. Skrivarin mátti hava gjørt hetta í ørskapi, og hesin var eisini rýmdur úr hansara tænastu. Tunnurnar við fiski og korni hevði hann fingið frá fiskimonnunum sum endurgjald, tí teir høvdu rent á skipið hjá honum og gjørt skaða.

Dómstólurin gjørdi úrskurð, og Valkendorf fekk viðhald í, at hann

og Magnus ikki vóru ella høvdu verið handilsfelagar, men staðfesti bert, at nevndi skrivari átti at verið funnin, so hann kundi svara ákærunum. Hinvegin bleiv onki gjørt við hinar ákærurnar.

Kongur hevur uttan iva havt ávirkan á, hvussu dómurin gjørdist, tí hann var hægsti dómari. Hann vildi helst røkja sína skyldu sum patrónur og verndari hjá Magnusi. Og hann fekk høvi at sýna fyri Valkendorf, hvør hevði evsta vald í ríkinum.

**Magnus kemur aftur til Danmarkar**

19. juni 1587 fekk Magnus farloyvi frá tænastu hjá Moritz av Orania. Hann búsettist í Aalborg og fór undir at reka handil, og aðalsmenn settu pening í virkið hjá honum. Fríðrikur kongur hevði eftir øllum at døma lovað honum eitt len, og hann fekk lutað Egholm. Í februar fekk Magnus loyvi at sigla til Føroyar at …*indsamle gammel gæld*, og á vári er hann helst farin til Føroyar. Meðan Magnus var burturstaddur, var ein tilburður, sum skuldi fáa stóran týdning fyri lagnu Magnusar. Tann 4. apríl 1588 doyði Fríðrikur 2.

**Endin**

Í juli 1588 kom enski sendimaðurin Daniel Rogers til Helsingør, har hann hitti ómynduga krónprinsin Kristian og stjórnina. Undir vitjanini frætti hann, at Magnus Heinason var í býnum. Hann bað tí stjórnina taka málið um *The John* upp og fáa Magnus at svara fyri ræningini.

Magnus lovaði at møta í rættinum í Keypmannahavn, so greiða kundi fáast á málinum. Men í staðin slapp hann sær til rýmingar. Eftir øllum at døma var stjórnin fyrireikað, og Magnus varð handtikin í Bergen og førdur til Keypmannahavnar, har hann varð settur fastur.

**Thomas Humfrey**

Á heysti kom Thomas Humfrey, sum umboðaði eigararnar av førninginum á *The John*, til Keypmannahavn. Lastin hevði havt stórt virði, og fleiri av eigarunum vóru helst í stórum fíggjarligum trupulleikum. Tí snúði tað seg fyri Humfrey fyrst og fremst um at fáa endurgjald til vegar.

Men Humfrey kravdi deyðadóm yvir Magnus. Hetta eftir ráðum og tí tað skuldi hjálpa honum at fáa endurgjald. Skjølini nevna

ikki, hvør gav honum hesi ráð – men Valkendorf má vera tað besta boðið.

Næstu mánaðirnar endaði málið í einari togan. Hans Lindenov og aðrir aðalsmenn, ið høvdu sett pening í fyritøkuna hjá Magnusi, veittu honum stuðul í málinum. Sum endurgjald lovaði Magnus Humfrey pant í skipum sínum, men aðalsmenn steðgaðu hesum, tí teir søgdu seg eiga pening til góðar hjá Magnusi. Magnus og hansara stuðlar vildu eftir øllum at døma hava málið at draga út fyri at fáa tað at falla.

Valkendorf veitti Humfrey stuðul og lovaði honum hjálp at fáa endurgjaldið til vegar. Valkendorf lænti Humfrey pening, helst fyri, at Humfrey kundi verða verandi í Keypmannahavn og halda áfram at føra sína søk.

13. desember 1588 fekk Magnus málið útsett í 6 vikur, tí hann segði seg tørva at fáa skrivlig prógv til vegar. Men Humfrey klagaði, og verjustjórnin kunngjørdi, at tá ið hesar seks vikur vóru farnar, skuldi málið fyri Ráðstovurættin í Keypmannahavn og *...én Gang for alle maatte komme dermed til endelig Ende.*[10]

Lindenov skrivaði til stjórnina og bað um, at málið enn eina ferð skuldi verða útsett, tí hann segði, at fíggjarligu viðurskiftini við Magnus ikki vóru avgreidd.

Lindenov fekk bræv aftur dagfest 16. januar. Her var kunngjørt, at Humfrey sýtti fyri at útseta málið, tí hann longu hevði verið í Keypmannahavn í longri tíð. Samstundis var kunngjørt, at Magnus sama dag var blivin dømdur til deyða. Tveir dagar seinni varð Magnus avrættaður.

Líkið varð jarðað á kirkjugarðinum í Sankt Nicholaj kirkju og ikki sett á hjól og pela til *skræk og advarsel*, sum bleiv gjørt við sjórænarar.

**Eftirleikurin**

Magnus var helst longu avrættaður, tá ið Lindenov frætti um deyðadómin. Hans Lindenov klagaði tó til verju stjórnarlimirnar Niels Kaas og Jørgen Rosenkrants, ið høvdu verið burturstaddir, tá ið Magnus varð dømdur og avrættaður. Hann mótmælti, at Magnus ikki hevði fingið møguleikan at kæra deyðadómin, sum hann hevði rætt til, og at Valkendorf hevði latið Magnus avrætta uttan samtykki frá starvsfeløgunum í verjustjórnini.

Endin varð, at Lindenov og einkja Magnusar, Sofía, stevndu Valkendorf fyri Rættartingið, ið skuldi verða undir Harradøgunum í 1590.

Málið um Magnus elvdi til rumbul undir Harradøgunum. Stuðlarnir hjá Magnusi vóru í øðini inn á Valkendorf og ákærdu hann fyri at eiga skuldina av, at teir høvdu mist sínar íløgur og vinning frá virkseminum hjá Magnusi.

*…the nobility of Denmark have been wrought upon by a licentious tumult in the last parliament… Lord Walkendorff was fain to leave his offices of Treasurer and Governor. To content the nobility, Walkendorff was to satisfy such gentlemen of the country as had claim upon Hennison, who, it was alleged, was likely to have been able by arms to have satisfie his creditors, if he had lived.*[10]

Málið endaði við einari semju, soleiðis at Valkendorf skuldi lata Lindenov og Sofíu endurgjald. Samstundis bleiv deyðadómurin yvir Magnus gjørdur ógildigur, og Sofía fekk loyvi at jarða Magnus av



*Kórið í kirkjuni í Ørslev Kloster. Minnistalvan yvir Magnus Heinason hongur vinstrumegin, og grøvin liggur niðriundir.*

nýggjum. Stutt eftir fór Valkendorf úr verjustjórnini og ríkisráðnum.

Thomas Humfrey fekk tó ongantíð nakað endurgjald til vegar. Málið helt áfram, og hann var verandi í Keypmannahavn í 5 ár. Tað seinasta, vit hoyra um málið um *The John,* er í 1598. Christoffer Read, ið var ein av eigarunum og hevði verið staddur um borð á *The John*, stevndi Hans Lindenov eftir endurgjaldinum, tí hann hevði havt tilknýti til Magnus. Við Rættartingið bleiv Hans Lindenov tó fríkendur. Read var harafturímóti fongslaður og hóttur við deyðadómi. Tað eydnaðist tó honum at sleppa leysur og flýggja aftur til Onglands.

**Minnistalva**

Leivdirnar av Magnusi blivu førdar til Jútlands og jarðarar á harragarðinum hjá Hans Lindenov í Ørslev Kloster, har Lindenov læt gera eina minnistalvu yvir Magnus:

***Gravskrift***

*Over gudfrygtig, forstandig, mandhaftig og velsøgt mand*

***Magnus Heinesøn***

*Hvilken, efter megen udstanden møje og mandelige bedrifter udaf hannem både inden og udenlands herligen bedrevet, er udi københavn for en mørk sag anklaget, og derefter, ikke uden alle gode menneskens gråd og klagemål, halshuggen.*

*At Gud Magnus har kaldet mig,*
*Det stor betyd haver i sig,*
*Thi stor haver jeg været førr',*
*Men store sejer haver gjort mig størr',*
*Vel an den størst, bør mig nu all'*
*Efter min død med rette kall'.*
*Thi den som før stor væld monn' før',*
*Vind lagde på mig liden at gør';*
*Men dog forgæv's, af Mognsis navn*
*Nu størr' end før går vide savn.*
*Efter døden lever dyden.*[11]

Hóast minningarorðini ikki nevna Valkendorf við navni, so er neyv-

an nakar ivi um, at tað var hann, ið hevði roynt *at leggja vind á* Magnus, og Lindenov erpaði sær av, at Valkendorf nú hevði mist sítt vald.

Tó kann fallið hjá Valkendorf ikki bert síggjast sum ein avleiðing av, at deyðadómurin hjá Magnusi bleiv gjørdur ógyldigur. Gølan um deyða Magnusar skal heldur síggjast sum eitt kærkomið høvi hjá mótstøðumonnum at fáa hann kroystan úr verjustjórnini og frá valdinum.

**Eitt justitsmorð?**

Magnus var sekur í ráninum av lastini á *The John*. Magnus hevði harafturat eitt størri syndatal. Men Valkendorf fór út um sínar heimildir, tá ið hann læt Magnus avrætta, tí Magnus hevði rætt at kæra sín dóm, og hann fekk ongantíð hendan møguleikan. Eftir tátíðar rættarfatan var tað eitt justitsmorð. Men lóg, rættargongd og rættarverja endurspegla eitt samfelag, og tað var eitt samfelag, har tign og sambond vóru avgerandi fyri rættindini og trygd hjá tí einstaka. Rættindini vóru í tátíðarinnar samfelag knýtt at sambondum og tign og ikki sum í okkara samfelag, har øll eiga at hava somu rættindi og somu rættartrygd.

Magnus var sameindur við valdsmiklar og tignarligar persónar. Ivasamt er tí, um Magnus nakrantíð hevði fingið revsing, um ikki Valkendorf hevði framt sjálvtekt í sínum embæti, so hevði Magnus í ringasta føri helst sloppið við at lata endurgjald.

Hvat fekk Valkendorf at taka ta víðgongdu avgerð? Ein avgerð, har hann ikki bert fór út um sínar heimildir, men somuleiðis kom at verða tað kærkomna høvi hjá mótstøðumonnum sínum at kroysta hann frá valdinum.

**Motiv**

*…Lord Chris. Walkendorf… …a wise and discreet man… …considering the evil doings of Mons .Hennison* (Magnus Heinason)*, and that it was looked for in England not only that restitution should be made, but that Hennison, as likely to do much mischief, should be cut off, so countenanced the cause that Hennison was put to death…*[12]

Valkendorf sá ósømuligan og svikafullan brotsmann. Hann hevur tí helst viljað fingið Magnus at standa til svars fyri síni brotsverk.

Hann hevur helst eisini sæð hann sum ein vátligan horkall og blóðskemdara, ið vanhalgaði aðalsfrýr og aðalsmenn. Hann hevur uttan iva óttast, at stuðlarnir hjá Magnusi skuldu hindra dóminum, og Magnus fór enn eina ferð at snúgva sær undan. Tað vildi verða ein eyðmýking fyri Valkendorf, og tí mátti Magnus og hansara skaðiliga lívsleið steðgast med alla.

Men hví metti Valkendorf, at Magnus var so skaðiligur, at hann mátti takast av lívi fyri ein hvønn prís?

Tað er ein sannroynd, at kenslur fram um skynsemi stundum sleppa at ráða í embætisligum og politiskum viðurskiftum. Men stríðið millum Magnus og Valkendorf má síggjast í einum sosialum konteksti. Danmark var eitt stættarsamfelag og eitt tað mest uppdeilda samfelag í Evropa. Eitt samfelag, ið líktist einum kastusamfelagi á summum økjum. Magnus skammfór aðalsfrýr og aðalsmenn og var ein háðan móti tignini hjá aðalinum. Valkendorf hevur helst eisini sæð Magnus sum eina hóttan móti samfelagsskipanini. Kongur stuðlaði Magnus og forfjónaði teir aðalbornu. Harafturat lutaði kongur Magnus eitt len, og hóast hetta var eitt av høvuðsframíhjárættindunum og grundarlagnum undir ráðandi støðuni hjá aðalinum. Tískil var viðrákið hjá Magnusi ein atsókn móti valdinum hjá aðalinum.

Avgerðin hjá Valkendorf kann eisini síggjast sum ein valdsgerð ella maktnýtsla. – Tí makt er ikki nakað, ein hevur, tað er nakað, ein fremur. Tá ið Fríðrikur hevði vart Magnus, var tað eisini fyri at sýna makt, har kongur kundi vísa aðalinum og Valkendorf, at hann hevði evsta vald í ríkinum. At Magnus ferð eftir ferð snúði sær undan, var ein eyðmýking fyri Valkendorf og lastaði hansara valdsstøðu. Í januar 1589 var Valkendorf undir stórum trýsti frá sínum mótstøðumonnum. Um Magnus enn einaferð skuldi sleppa, vildi tað sýna Valkendorf fram sum veikan. Tí var avrættingin av Magnusi ein maktdemonstratión fyri lægru stættunum í samfelagnum og ikki minst mótstøðumonnunum, har Valkendorf skuldi vísa, at hann hevði vald. Men hann undirmetti mótstøðumenninar og ikki minst Hans Lindenov.

Eg síggi hesi motivini hvørji sær sum dropar í tí famøsa glasinum. Tá ið Magnus skuldi fyri Ráðstovurættin tann 16. januar 1589, er glasið hjá Valkendorf langt síðani flotið yvir. Og tað slapst ikki undan hesum lagnutunga enda.

## Keldur

***Ikki prentað tilfar***
Rigsarkivet, København

*Kongens Retterting*
Herredagsdombøger 1582-1598

*Tyske Kancelli, Udenrigske Afdeling*
Topografisk henlagte sager. England, Søfart og handel 1432-1656

Riksarkivet, Oslo

*Kongehusets og rigets arkiv.*
C3. Dommer, tingsvitner, forpliktelser og forlikelser. Rettertingsdom af 26. januar 1583

Føroya Landsskjalasavn
*Privatsavnið hjá John F. West*


***Prentaðar keldur***
Lucas Debes: *Færoæ & Reserata – Færøernes Beskrivelse*. 1673. (1950).
Anton Degn: *Nøkur gomul, áður óprentaði brøv o.a. Føroyum viðvíkjandi*. 1939.
A. C. Evensen: *Savn til Føroyinga søgu í 16 øld*. 1908.
N. Nicolaysen: *Den Norske Sou*. Norske Magasin 1860-70, s. 1-50.
H. Grüner-Nielsen: *Danske Viser*, (bind 6), 1930-31, s. 15-20.
J. H. Schrøter: *Sagn om Magnus Heinason*. Antiquarisk Tidsskrift 1849-51, s. 159-170.
Jens Lauritsøn Wolff: *Norriga Illustrata* 1651, s. 264-273.

**Bókmentir**
Erik Arup: *Danmarks historie*. 1932.
C. F. Bricka: *Troels Lund: Mogens Heinesøn*. Historisk Tidsskrift, Fjerde Række, Sjette Bind, 1877-78, s. 139-168.
Sv. Cedergreen Bech: *Mogens Heinesen*. Dansk biografisk leksikon (1979-84) 6. bind, s. 192-193.

Poul Colding: *Jørgen Rosenkrantz*. Dansk biografisk leksikon (1979-84), 12. bind, s. 356-358.

Jakob Danneskiold-Samsøe: *Patron og klient i 1600-tallets Europa*. Fortid og Nutid 2005, hæfte 3, s. 163-191.

Ludvig Daae: *Om Magnus Heinessøn*. 1869.

Hans Jacob Debes: *Føroya Søga 2 – Skattland og Len,* 1995, s. 177-203.

Albert Fabritius: *Danmarks riges adel*. 1946.

Helge Gamrath og E. Ladewig Petersen: *Danmarks historie 1559-1648*. 2:2 bind. 1980.

Arthur G. Hassø: *Rigshofmester Kristoffer Valkendorf til Glorup*. 1933.

Steffen Heiberg: *Peder Munk*. Dansk biografisk leksikon (1979-84), 10. bind, s. 126-127.

Chr. Heilskov: *Den Heinesenske slægtssaga*. 1916. (1985).

Jón Helgason: *Lucas Debes*. 1940.

Jakob Jakobsen: *Færøsk Sagnhistorie*. 1904.

Frede P. Jensen: *Frederik II*. Dansk biografisk leksikon (1979-84), 4. bind, s. 525-530.

Frede P. Jensen: *Niels Kaas*. Dansk biografisk leksikon (1979-84), 7. bind, s. 430-432.

Leon Jespersen: *Stænder og Magtstat*. 1989.

Leon Jespersen: *Adel, hof og embede i adelsvældens tid*. Riget, Magten og Æren (2001), s. 369-399.

Leon Jespersen: *Indledning om det 17. århundrede (1600-1660)*. Riget, Magten og Æren (2001), s. 478-498.

Poul Johs. Jørgensen: *Dansk retshistorie*. 3 oplag. 1965.

C. Klitgaard: *Mogens Heinesen*. Dansk biografisk leksikon (1933-44), 9. bind, s. 607-609.

E. Ladewig Petersen: *Dansk social historie 3 – Fra standssamfund til rangssamfund 1500-1700*. 1980.

Troels Lund: *Mogens Heinesøn – Et tidsbillede fra det 16de Aarhundrede*. 1877.

Troels Lund: Mogens Heinesen. Dansk biografisk leksikon (1887-1905), 7. bind, s. 274-276.

Chr. Matras: *Mogens Heinesøn*. I tidsskriftet: *Danmark*, 1941, s. 680-683.

Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen: *Havnar søga I & II*. 2004.

Páll Nolsøe: *Efter døden lever dyden – Historien om Magnus Heinason*. Serritgerð, Ruc 2006.
Páll J. Nolsøe: *Føroya Siglingarsøga I*. 1951.
Leo Tandrup: *Christoffer Valkendorf*. Dansk biografisk leksikon (1979-1984), 15. bind, s. 252-255.
Michael Venge: *Christoffer Valkendorf – Indbydelsesskrift til 450 års festen for Christoffer Valkendorfs fødsel*. 1975.
P. T. Wandal: *De paa Jægerspriis ved Mindestene hædrede fortjente Mænds Levnetsbeskrivelser*. 1783.
John F. West: *Bretsk skjøl um Magnus Heinason*. Fjølnir nr. 1, 1969, s. 11-16.
John F. West: *Maðurin sum rændi í Havn 1579*. Fjølnir nr. 4, 1969, s. 2-9.
Alex Wittendorf: *På Guds og Herskabs nåde 1500-1600*. 2003.
Louis Zachariasen: *Føroyar sum rættarsamfelag 1535-1655*. 1960, s. 189-208.
Einar Østvedt: *Mogens Heinessøn – Et Ibsen-skuespil som aldri ble skrevet*. 1969.

## Notur

1. Nicolaus Helduaderus: *Sylva Chronoligica Circuli Baltici,* 1624. Høvundurin hevur tó skeiva dagfesting fyri avrættingini, ið sambært samtíðarkeldum var 18. januar 1589.
2. Den Norske Sou. Høvundur ókendur. (N. Nicolaysen. Norske Magasin 1860-70. s. 1-50).
3. Nevnast kann Fridrich von Gabel (1617-1673), sum var klientur hjá Fríðriki 3. (1609-1670), og hetta sambandið hevði m.a. við sær, at Gabel fekk Føroyar í len.
4. Frágreiðing frá Søren Christensøn Flue til Christoffer Valkendorf. Ongin dagfesting. Rigsarkivet: Kancelliets afleveringer. Færøerne. Div. sager no. 37. (Anton Degn, 1939, s. 50-51).
5. Bræv frá Magnusi Heinason til Fríðrik 2. Ongin dagfesting. Rigsarkivet: Kancelliets afleveringer. Færøerne. Div. sager no. 37. (Anton Degn, 1939, s. 68-70).
6. Den Norske Sou. Høvundur ókendur. (N. Nicolaysen. Norske Magasin 1860-70. s. 1-50).
7. Public Record Office. London. Calender of State Papers relating to Scotland. Vol. IX, Glasgow 1915, s. 515-16. (Privatsavnið hjá John F. West. Føroya Landsskjalasavn).
8. Vísa helst skrivað umleið 1585-86. Høvundur ókendur. Heitið á vísuni er ikki varðveitt, men hevur møguliga verið *Mogens Heinesøn af Norge*. (H. Grüner Nielsen (1930-31), s. 15-20).
9. Ríkisarkivið: Herredagsdombog 1586-88. Dómur 3. juni 1586.

10. Bræv frá verjustjórnini til borgmeistara og býráð í Keypmannahavn 13/12-1588. Ríkisarkivið: Sjællandske tegnelser.
11. Frágreiðing til enska hovið, 2. juni 1592: Public Record Office, London, S.P. 12-224; Calendar of State Papers, Domestic Series 1591-1594, Nendeln 1967, s. 229-30. (John F. Wests privatsavn – Føroya Landsskjalasavn).
12. Minnistalvan er á latíni. Umsetingin er úr *Færoæ & Reserata – Færøernes Beskrivelse,* hjá Lucasi Debes, 1673.
13. Frágreiðing til enska hovið, 2. juni 1592: Public Record Office, London, S.P. 12-224; Calendar of State Papers, Domestic Series 1591-1594, Nendeln 1967, s. 229-30. (John F. Wests privatsavn - Føroya Landsskjalasavn).

Um høvundin:
*Páll Nolsøe*
Cand. comm. í søgu og samskifti frá Roskilde Universitetscenter í 2007. Kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni.

*Rolf Guttesen*

# Veðurlag, framleiðsla og fólkatal í 1800-talinum og fyrr

Ein høvuðstesa hjá kenda danska etnografinum Axel Steensberg (1989) er, at „hard grain", hart korn – sum kann vera hveiti, bygg, rís ella mais – er grundarlag undir øllum teim stóru, gomlu civilisatiónunum í Verðini. Tá tosað verður um civilisatiónir, so liggur í tí, at har er ein skilnaður og arbeiðsbýti millum land og bý, og at arbeiðsbýtið millum íbúgvar er so mikið framkomið, at ikki øll strevast við at framleiða matvørur og tað, sum er strangliga neyðugt til lívsins uppihald. Ein fortreyt er sostatt, at tað ber til at tosa um eitt klassasamfelag.

Sama tankagongd liggur helst sum ein rationellur kjarni aftanfyri tær meira kryptisku søgurnar í fyrstu Mósebók um kýr, kornøks og talið sjey. Niðurstøðan er, at aftaná góð ár koma ring ár, sum hvør bóndi man vita. Loysnin var at savna í goymslu, meðan góð ár vóru. Tað mátti tí vera haldgott korn, ið kundi liggja minst sjey ár uttan at spillast. Til at halda skil á goymslunum í Egyptalandi og aðrastaðni var neyðugt at hava eitt bókhald, at kunna telja og skriva tøl.

**Problemformulering**

Spurningurin er tí, hvat hevur verið tað haldgóða kornið í Føroyum? Ella var nakað, sum kundi substituera ella setast í staðin? Tí, hóast skiftandi ring og góð ár, hevur lítla føroyska samfelagið hórað undan í skiftandi tíðum, so ella so.

Spurningurin um hart korn ella eitt substitut, kann generaliserast

til spurningin: Hvør hevur týdningarmesta kaloriu-keldan verið í Føroyum, og hvør hevur verið tann mest stabila?

Tá hesin spurningur er svaraður, kemur tann næsti: Ber til at siga nakað approximativt, á leið, um fólkatalið, ið gongur longur aftur enn fólkateljingar røkka?

**Keldur**

Í royndunum at loysa hesar báðar høvuðsspurningarnar, havi eg brúkt ymist tilfar, sum er í varðveitslu á Landsskjalasavninum í Havn.

Á Skjalasavninum finna vit „*Løbner'sa tabellir*". Løbner var 1801-1828 kommandantur á Skansanum og sýnist at hava verið ein maður við áræði og skili. Í 1816 bleiv Løbner fyrsti Amtmaður, og eg meini, at man skal síggja hetta sum fyrsta stig til eina miðfyrisiting, sum var ein hornasteinur í teirri menning, sum førdi oyggjarnar fram til eitt modernað samfelag. Hetta er ein arbeiðshypotesa í arbeiðinum við, hvussu man skal skilja ta positivu gongdina, sum samfelagið fer gjøgnum í 1800-talinum.

Í tabellunum er taltilfar um allar bygdir og hvørt húsarhald. Vøru-mangul var vegna kríggj, og fyri at sleppa undan, at fólk við pengum ella nógvari ull hamstraðu alt, vildi hann býta eftir hvønn tørv, ið fólk høvdu. Tí vísa tabellirnar alt um fólkatal, jørð, seyð, neyt, korn, fugl og bátar. Løbner vitjaði allar bygdir í februar 1813, men slapp tó ikki í land í Mykinesi vegna veður. Meira er skrivað um tabellirnar hjá Guttesen (1999).

Á savninum finna vit eisini „*Matras-dagbøkurnar*" 1790-1892. Hetta eru dagbøkur, sum snúgva seg um at kalla alt, sum fyriferst á Uppistovufestinum á Norðoyri; tey fyrstu 23 árini tó á Viðareiði. Dag fyri dag verður bókført, hvat er gjørt í bø og haga, um seyð, korn, eplir og hoyggj, torv og útróður.

„*Indberetninge*r" frá sýslumonnum 1830-1905 eru rapportir ella frágreiðingar, sum tann dugnaligi amtmaðurin F. Tillisch bað sýslu-menninar skriva og senda inn hvørt hálvár. Eisini her er nógv tilfar um landbúnað, fisk, fugl, heilsustøðu og aðrar hendingar.

„*Kongstíggjundalistar*" umleið 1584-1905, hvørs originalar flestallir liggja í Rigsarkivet. Hesir listar umfata smør-, ullar- og fiskatíggjund til kongs, og kunnu tí siga nakað um ávikavist neytatal, seyðaslakt og fiskiskap.

**I: Fyrsti høvuðsspurningur:**
**Hvørjum livdu føroyingar av í sokallaða bóndasamfelagnum?**
Til at loysa hendan spurning eru Løbner'sa tabellir eitt høvuðsverk. Árini 1807-14 vóru merkt av Napoleonskrígginum, har England og Danmark stóðu móti hvørjum øðrum. Vøruflutningurin til Føroya var óregluligur, tí nógv donsk skip vóru tikin. Vørutrot var í handlinum í Havn. Fólk í Havn sluppu bert at keypa eina vikuratión í árunum 1812-1815 (*Repartitionslister*). Tá mest stóð á í februar 1814, fór Løbner um alt landið at fáa yvirlit yvir tørvin, so tað, ið var á goymslu, kundi býtast rættvíst.

**Procentbýtið av kaloriukeldum**
Út frá Løbner'sa tabellum, Guttesen, R. edit (2007), við ískoytum frá Degn (1929) og *Kongstíggjundalistum* á Landsskjalasavninum, ber til at stilla fylgjandi yvirlit upp:

Talva 1: Kaloriu-keldurnar hjá íbúgvum í Føroyum, umroknað til procentir. Keldur: Løbner'sa tabellir, Guttesen (2005).

| | **Eind** | **kg/l** | **kcal i alt** | **kcal/p/dg** | **procent** |
|---|---|---|---|---|---|
| Korn, lokalt | 1755 | 140400 | 393120000 | 208 | 8 |
| Korn, import | 5500 | 440000 | 1232000000 | 652 | 24 |
| Lomb, kjøt | 28100 | 337200 | 539520000 | 286 | 10 |
| Lomb, tálg | 28100 | 84300 | 463650000 | 245 | 9 |
| Mjólkkýr | 2297 | 3307680 | 2149992000 | 1138 | 42 |
| Fiskur | | | | 200 | 7 |
| Fuglur | 34210 | 8655,13 | 13848208 | 7 | 0 |
| Samanlagt | | | | 2737 | 100 |

Talva 2: Tøl og støddir, sum eru brúkt í kaloriu-umrokningini í talvu 1.

| **Fólkatal** | **5247 pers.** |
|---|---|
| 1 kg korn | 2800 kcal |
| 1 kg kjøt | 1600 kcal |
| 1 kg tálg | 5500 kcal |
| 1 l mjólk | 650 kcal |
| Meðalkúgv mjólkar | 4 l/dag |
| 1 lamb í kjøti | 12 kg |
| 1 lamb í tálg | 3 kg |

Gjøgnum nøkur umrokningarumfør ber til at koma fram til eitt yvirlit, sum vísir procentbýtið av kalorium frá ymsum keldum. Onkrar smærri keldur eru ikki við. Høsnar- og dunnuegg hava verið etin. Gæs eisini. Grind hevur havt týdning, men er ikki tikin við her, tí variatiónin er so stór, at einki samfelag kann byggja sína tilveru á eina so óvissa keldu. Millum 1750 og 1800 vóru at kalla ongar grindir, umleið 2000 hval tilsamans yvir 50 ár, ella bert 40 hval um árið. Í 1840-unum harafturímóti fingust einir 2000 hval um árið (Guttesen 1996b:90).

Úrslitið er, at mjólkin er tann størsta einstaka keldan, hon gevur ikki minni enn 42%. Tað føroyska kornið gevur bert 8% ella umleið ein triðing av tí innflutta Hetta innflutta kornið fyllir umleið ein fjórðing, ella 24%. Kjøt og tálg úr lombum geva 19% tilsamans. Fiskur, sum her bæði umfatar tann stóra, tíggjundapliktiga fiskin og annan fisk, gevur 8%.

Fuglur kemur ikki upp á eitt heilt procent. Matras sýslumaður í Norðoyum sigur soleiðis um Fuglefangst í sínum „*Indberetninger*" fyri 1834: „*Paa Fugløe var den fortrinlig god i forhold til det lidet som i de sidste 30 Aar er faldet af den paa samme Øe*" (Guttesen 2009b). Hetta sigur nakað um óstabilitetin í fuglaveiðuni. Eplir høvdu ikki nakran serliga týdning fyrr enn aftan á hesa tíð, tá ið Løbner samlaði hetta virðismikla tilfarið. Hetta basala procent-býtið í kaloriukeldunum í talvu 1 er eisini viðgjørt í Guttesen (1999).

Vitanin um, hvat ið veruliga var umráðandi í húsarhaldinum tá í

tíðini ger, at nógvir spurningar mugu stillast øðrvísi enn vanligt hevur verið. Eisini kann sigast, at fleiri fyribrigdir skiljast betur, um hetta við mjólkini verður lagt í geyma. Sigvardsen (2007:1747) hevur hesa málisku: „*Fyrsta neyðin var hoyneyðin og onnur var torvneyðin.*“ Alt bleiv gjørt, fyri at kúgvin kundi liva veturin yvir. Tá hoyneyð var, fingu neytini bæði turran fisk, turra grind og til tíðir eisini tað vánaliga føroyska kornið, sum ofta ikki var egnað sum mannaføði. Norðoya sýslumaður skrivar til dømis í seinastu „*Indberetning*“ á vári 1903 hetta: „ *Uagtet der paa Grund af den usle Græsvækst i forrige Aar, blev der nedslagtet næsten ¼ af hele besætningen, var der næsten almindelig Hømangel ved Halvaarets Slutning, men da Kreaturholderne dels var godt forsynede med tør Sej og dels med Hvalkød, kom man nogenlunde ud over Vanskeligheden uden at der døde Kreaturer af Fodermangel.*“

Út frá tí, sum nú er lagt fram, kunnu vit siga, at nøkur føst, strukturel lutføll hava verið í framleiðsluháttinum í Føroyum tá. Tað mest grundleggjandi, sum talva 3 vísir, at tað hava verið 2 fólk upp á kúnna. Til samanbering eru tilsvarandi tøl úr Íslandi (Fridriksson 1972:790) um ár 1800 sett inn í talvu 3. Tey liggja ógvuliga nær teim føroysku, og hetta styrkir trúvirðið.

Talva 3: Grundleggjandi proportiónir ella lutføll. Roknað út fra Løbner’sa tabellum.

| | **Tal Lutfall** | **Avrund. tøl** | **Roknað Føroyar** | **Roknað Island** |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Fólkatal | 5.247 | | | |
| Mjólkneyt | 2.297 | | | |
| Lomb, slakt | 28.100 | | | |
| Fólk / kúgv | 5.247 / 2.297 | 2 : 1 | 2,28 | 2,00 |
| Fólk / lamb | 5.247 / 28.100 | 0,2 : 1 | 0,19 | 0,17 |
| Lomb / kúgv | 28.100 / 2.297 | 10 : 1 | 9,62 | 12,00 |

**Stabilitetur og variatión í framleiðsluni**

Eitt er, hvussu nógvar kaloriur ein kelda kann geva eitt árið, men hvussu álítandi ella stabil er hon yvir longri tíð? Her verður ein onnur kelda tikin í nýtslu, nevniliga *Matras-dagbøkurnar* (Guttesen 2008b).

*Um mjólkkýr*

Taka vit kýrnar, sum geva mjólk, so er tað avgerandi, hvussu nógv og gott hoyggj varð fingið í hoyggjhús ella des út á heystið. Hvussu nógv vetrarfóður var? Vóru gróðrarlíkindini um summarið ring, ella var ringur terri í hoyggingartíðini, kom ofta fyri, at neyt máttu slaktast, so at tey eftirlivandi kláraðu veturin. Hetta kann lesast ofta í fleiri „*Indberetninger*". Matras sýslumaður skrivar um heystið 1835 um støðuna hjá neytunum: „*Denne [kvægbesætningen] er hiidtil i sædvanlig god Stand, men Udsigterne for samme de ringeste, idet at Græsvexten overalt var usædvanlig ringe, og desuden er der paa de fleste Steder nu større eller mindre Deel af Høet endnu ubjerget, og som allerede kan ansees bedærvet og til mindre Nytte, og følgelig maae Nødvendig Besetningen i almindelighed for en deel formindskes, da ickun enkelte Bønder kan have nogen hielp til Foder, fra forrige Aar.*"

Í Matras-dagbókunum er tíverri einki skrivað um mjólkneytini, helst tí at tað var ein daglig rutina at mjólka. Men har er góður roknskapur fyri hoyggið. Mynd 1 vísir, at ein rættiliga javnur vøkstur er




í byrðatalinum frá umleið 120 áðrenn 1820 til umleið 160 aftan á 1850. Svabo (1782/1959) sigur, at vanliga er eitt vetrarfóður 20 byrðar, so vit kunnu ætla, at neytatalið á Uppistovufestinum er vaksið úr

6 upp í 8 hesi árini. Variatiónin er ikki stór, leysliga sett til 120:180, ella 1:1,3, sum er minni enn 1:2, sum er sett í talvu 3.

Sum eitt gott dømi um samanhangin millum summarveðrið, grasvøkstin og neytini, verður ein partur av „*Indberetninger*“ fyri Norðoya sýslu endurgivin í talvu 4. Neytatalið í høgru kolonnu er úr „*Tíggjundalistunum*“. Hesi skjøl, við sínum fínu eygleiðingum, styrkja álitið á, at tíggjundalistarnir eru á góðari leið, men eisini at tíggjundatølini kunnu brúkast sum proxydata (data, sum óbeinleiðis kunnu brúkast til metingar) til at siga nakað haldgott um veður og veðurbroytingar.

Talva 4: Sambandið millum veður, grasvøkstur og neytatal. Nøkur dømir 1848-1851. Kelda: „Indberetninger“ frá Norðoya sýslumanni.

| **Hálvár** | **Um veður** | **Um gras** | **Um neyt** | **Kýr** |
|---|---|---|---|---|
| Summar 1848 | Ugrødsom sommer. Fugtigt i høbjergningstiden | Liden græsvækst. Sen høbjergning | Besætning i god Stand, men maa sættes ned | 109 |
| Vetur 48-49 | Vedholdende strengt vinter-vejr med frost og is | Liden græsvækst. Langsom og ringe tørring | I mindre god Stand, maatte formindskes. Udsigt mangel paa foder | - |
| Summar 1849 | Daarlig vinter og foraar. Kold sommer. Tør høst og god høstning | Usædvanlig kold og ugrødsom sommer. Ringe græsvækst | Ikke i god Stand paa grund af lidet og daarligt foder sidste vinter. Kun lidt mælk. Tallet maa sættes ned | 96 |
| V. 49-50 manglar | - | - | - | - |
| Summar 1850 | Middel sommer. Tørt efteraar til høtørring | Græsvæksten middelmaadig god, nogle steder bedre. Høtørring god | I middelmaadig Stand | 89 |
| Vetur 50-51 | Vinteren var særdeles mild | Høtørringen lykkedes vel | | - |
| Summar 1851 | Kold forsommer. Godt augustvejr til høtørring | Græsvæksten ringe. Lidet men godt hø | I nogenlunde Stand, men tallet maa sættes ned | 104 |

*Um korn*

*„Matras-dagbøkurnar“* geva møguleika fyri at rokna út, hvussu nógv fold, ið kornveltingin gav, og hvussu stór variatiónin var. Hetta er nærri viðgjørt í Guttesen (2001). Sum oftast verður beinleiðis sagt, hvussu nógvar kannubarar teir sáðaðu, og somuleiðis hvussu nógv, ið heystað var. Til tíðir er neyðugt at vurdera og kvantificera, hvat liggur í ymiskum kvalitativum setningum, tá eingi tøl verða nevnd.

Myndin vísir, at kornveltingin gav umleið sjey fold á Norðoyri, og har er ein lítil fallandi tendensur hesi árini. Men variatiónin er stór. Trý ár gevur kornið bert eitt fold, 7 ár er tað bert tvey fold. Tey bestu árini gevur kornið 14 fold. Taka vit tey mest ekstremu árini frá, kunnu vit siga, at góð ár geva eini 12 fold, og ring eini tvey, so verður variatiónin 1:6. Sjálvt um kornið gevur nøkur fold,




so er tað ofta viðmerkt, at tað var vánaligt ella beinleiðis óegnað sum mannaføði. Sum dømi um eitt gott ár skrivar Matras í 1842: *„Kornet var over hovedet af god Bonitet, for störstedeelen af det bedste til modenhed og kiærne“*. Men harafturímóti var 1863 eitt vánaligt ár: *„…kun tørret en Sodn, 31 Kanbar af slet Korn, det óvrige er givet Kóerne.“*

*Um eplir*

Eplir eru ikki tald við hjá Løbner kommandanti. Men tey gerast vanlig í 1820-unum og framá. Her eru *„Matras-dagbøkurnar“* eisini fín kelda. Ein stutt skitsa um eplasøguna er í Guttesen (2005a).




Eplafoldini á Norðoyri fyri 1821 til 1890 eru á mynd 3. Meðalúrtøka er at kalla konstant um 6. Ringasta ár gevur 2 fold, men annars liggja tey vánaligu árini um 4 fold, meðan tey góðu eru um 8 fold; tað besta kemur upp á 11 fold. Hetta gevur eina variatión upp á 4:8 ella 1:2.

Í mun til kornið geva eplini eitt sindur lægri foldúrtøku, men variatiónin er nógv minni. Eplini eru ein stabilari kelda enn kornið. Ein annar fyrimunur við eplunum er, at „heystingin“ ella tað at taka upp eplini, kann strekkjast yvir longri tíð enn akurskurðurin. Tey seinnu árini var fyrsti upptøkudagur um miðjan august, tann seinasti onkuntíð í november. Eplini góvu nógv størri flexibilitet í arbeiðinum.

*Um seyð*

Orðatøk sum „Ull er Føroya gull“ og ein serlig søguuppfatan, kunnu hava misleitt fólk til at halda, at íbúgvarnir fyri tað mesta livdu av seyðakjøti. Heldur hevur tað verið so, at ullin var ríkidømi hjá teim stóru bóndunum, hjá tí gamla ráðandi klassanum. Kjøt og tálg

hava sjálvandi verið týðandi kaloriu-keldur, góvu eini 20%. Men stabiliteturin var ikki høgur, einahelst tí at seyðabrúkið var rikið eftir „natúrmetoduni“. Seyður gekk úti alt árið. Fyrr vóru eingi seyðahús, og einki fóður var givið seyðinum um veturin.

Tað gamla orðið „felli“ merkir, at ein ringur vetur tekur lívið av stórum parti av seyðinum í haganum. Svabo (1782/1957:743) sigur um felli: *„Affald paa Faar foraarsaget i sær af Vinterens Strænghed.“* Um triðingur ella meir av áseyðinum (Besætningen) doyr, so kallast tað avrot. Gamalt var at rokna við einum felli 14. hvørt ár. Hann nevnir fleiri ring fellisár:

Í **1633** var álvarsligt felli. Svabo citerar úr Tingbókini. Hendan sigur (Joensen 1953:258): *„Til med er meste Delen alle vores Faar bortdøde forgangne Vinter, saavel som nogle Hundrede Køer, saa at her aldrig haver veret saa ynkelig en Tilstand udi Landet, som noget Menneske nu kan mindes*“. Hetta felli sæst aftur í gjaldinum av ulltíggjund í øllum sýslum, smb. Zachariassen (1961) og Guttesen (2004:38). Serliga hart hava Norðoyar verið raktar, har einki var latið í tíggjund í 1633 og 1635, men heldur ikki í 1640 og 41. Hesi bæði seinnu árini síggjast eisini aftur í hinum sýslunum í tíggjundaroknskapunum. Men í tingbókunum eru ongar viðmerkingar um felli hesi bæði árini.

So nevnir Svabo 1695, sum skuldi vera serliga ringt norðanfyri. Hetta ár eru eingi tíggjundatøl.

Seinni kemur **1717** sum fellisár, og tað kann dokumenterast við „*Lítlubók*“ um Steigagarð í Sandavági. Hetta er tað versta árið í tíðarskeiðinum 1707-1760.

Svabo umtalar eisini **Svartafelli**, sum hann sigur er eldri enn 1615. Tað sigst at hava *„næsten gandske have udslettet denne Art Dyr i Færøe.“* Landt (1800/1965:199) skrivar um Svartafelli, at tað hendi fyri meira enn 200 árum síðani. Annars er 1602 eitt ringt ár (sí Guttesen 2004), har ulltíggjundin er lítil. Men av tí at nakað er tíggjundað, so hetta kann ikki vera svartafellisárið, har at kalla eingin seyður var eftiri.

Eitt konkret dømi um hesa variatión finna vit í Matras-dagbókunum, har teir við ídni hava skrivað alt um seyðahaldið. Mynd 4 vísir skurðin árini 1813 til 1890. Meðalskurðurin er javnt minkandi hesi árini. Ein kelda, sum styðjar uppundir hesa mynd, er Taxatiónsprotokollin (1873/1973). Meðalárið seta teir í 1873 til 168, ið passar væl inn í myndina.




Annars er variatiónin á Norðoyri væl minni enn á Steigargarði eini 100 ár frammanundan. Har var lutfallið í ringum periodum sum 1:6. Í meira vanligum periodum sum 1:3. Á Norðoyri er variatiónin sjáldan meiri enn 1:2. Men hví man munurin vera so stórur? Ein góður spurningur til víðari gransking.

*Um variatión í fiskiskapinum*

Fiskur hevur fyrr verið ein óstabil kaloriu-kelda. Serliga tað, at long tíðarskeið hava verið, har næstan einki hevur verið at fiska. Eldri keldur hava viðmerkingar um hetta. Zachariassen (1961) hevur kannað perioduna 1584-1652 og kemur fram til, at eitt óvanligt fiskaríkidømi var í árunum 1613-1624. Tøl úr hesum verki eru víðari viðgjørd í Guttesen (2004).

Debes (1673/1963:131) sigur, at „*mens eftersom for et halvt hundrede Aar Fiskeriet continuerlig er slagen fejl*“. Tí kunnu vit ætla, at hetta er galdandi fyri árini umleið 1625 til 1673. Landt (1800/1965:157) er ein góð kelda. „*[Torskens] fiskning har tilforn været meget vigtig for Landet, men nu er den ligesom gandske forsvundet fra de færøske Kyster.*“ Og um ta aktuellu støðuna umleið ár 1800 sigur hann p. 219: „*Fiskeriet drives paa de fleeste Steder og i de fleeste Aar meere med tab end Fordel.*“ Spurningurin er so, hvussu tað hevur verið í 1700-talinum, sum hesar keldur ikki dekka.

Degn (1929:Talva 1) sigur, at skilið ikki var mikið frægari í

1700-talinum. Men í fyrru helvt av 1800-talinum tykist fiskiskapurin at fáa størri týdning, sum ávíst í Guttesen (2005b). Samanumtikið hevði fiskiskapur ongan stórvegis týdning sum kaloriukelda, kanska 8%, og variatiónin var stór, sett til 1:10.

Undanfarna gjøgnumgongd verður samanfatað í talvu 5.

Talva 5. Variatión í framleiðslu av føði

| | Variatión, lutfall |
|---|---:|
| Mjólkneyt, Hoyggj | 1:2 |
| Seyður, lomb | 1:3 |
| Fiskur | 1:10 |
| Korn | 1:6 |
| Eplir | 1:2 |
| Grind | 4 |

**II: Annar høvuðsspurningur:**
**Ber til at siga nakað approximativt (ið nærkast) um fólkatalið?**

Higartil eru vit komin fram til eina vitan um, at høvuðs-kaloriukeldan hevur verið mjólk. Og at fortreytin hevur verið eitt ávíst neytatal, sum hevur verið treytað av, hvussu nógv vetrarfóður hevur verið til taks. Ella, hvussu hava gróðrarlíkindini verið um summarið og terrin um heystið. Veðurlagið, klimaið, hevur verið avgerandi.

Harnæst vita vit, at einki „hard grain" kundi samlast í Føroyum til sjey ára goymslur. Tað nærmasta vit koma, er hoyggj. Til tíðir var eitt lítið avlop, sum bleiv goymt til næsta vetur.

Hetta førir til ta niðurstøðu, at tað í Føroyum hesa tíð hevur verið neyðugt at fáa kaloriu-ískoyti uttanífrá. „Hard grain" úr Bergen, Keypmannahavn, Hollandi ella aðrastaðni frá hevur verið ein fortreyt fyri samfelagsligum lívi í Føroyum. Tey ár, tá hetta manglaði, var „collapsið" nær. Ein fjórðingur av kaloriunum (24%, sí talvu 1) skuldi importerast. Innflutt korn til matna bleiv býtt fyri ull ella ullvøru, sum fór til útflutnings. Hetta kann sigast at vera ein neyðug og føst relatión í búskapinum tá.

## Umrokningin frá kongssmørtíggjund til fólkatal

Um lutfallið millum fólk og mjólkkýr hevur verið á nøkulunda sama støði í longri tíð, kann fólkatalið rekonstruerast, um vit kenna neytatalið.

Her finst ein kelda, sum vanliga kallast „*Kongstíggjundalistar*", ið kann brúkast. Smørtíggjund var í princippinum latin av hvørjari kúgv. Kongstíggjund var ein triðingur av allari tíggjund. Prestur og kirkja fingu hinar báðar partarnar. Arbeiði at rekonstruera henda roknskap er ikki liðugt enn. Myndin er so fræg, at hon kann brúkast í hesum sambandi.




Høvuðsreglan í tíggjundalistunum hevur verið, at 1 vág í smøri (72 merkur ella 18 skinn) var latin fyri hvørjar 16 kýr. Men so sigur Zachariassen (1961:69): „ … *18 skinn hava verið í vágini, men soleiðis hava menn ikki roknað í kongsins Leigubúð á Tinganesi. Har hava teir roknað 20 skinn í vágini.*" Henda meirvekt í vágini kallast yvirvekt. Tá verður 1 vág upp á 80 merkur. Viðmerkjast skal, at útgreiningin hjá Zachariassen í støðum er torskild.

Talva 6: Umrokningar frá smørtíggjund til fólkatal

| | **Roknistykki** | **Úrslit** |
|---|---|---|
| 16 kýr | geva | 80 merkur í smøri |
| 1 kúgv | (80:16)= | 5 merkur í smøri |
| 1 mørk í smørtíggjund | (1:5) = | 1/5 ella 0,20 kúgv |
| 1 mørk í kongs-smørtíggjund | (3*0,20) = | 3/5 ella 0,60 kúgv |
| | | |
| Ár 1600 gav 2250 merkur í smøri | (2250*0,60*2,3) = | 3105 íbúgvar (við prestum > 3205) |
| Ár 1650 gav 1750 merkur | (1750*0,60*2,3) = | 2415 íbúgvar (við prestum > 2515) |
| Viðmerking: Tíggjundin verður roknað við "yvirvekt", sí tekstin. Talið 2,3 (hækkað frá 2,28) í roknistykkinum kemur frá talvu 3, proportiónir roknaðar eftir Løbner'sa tabellum. | | |

Talva 6 er ein roynd at stilla allar umrokningarnar klárt upp, tá vit royna at brúka kongstíggjund í smøri sum proxydata til at rokna fólkatalið út. Prestagarðarnir lótu ikki tíggjund, Andersen (1895/1964:347,350), og tí eru 7 meðalstórir garðar við einum fólkatali upp á 70-100 og neytatali upp á 30-50 ikki við í tíggjundarokningini, men skulu leggjast aftrat, soleiðis sum verður gjørt í talvu 6.

Roknað við smørtíggjund sum grundarlag var fólkatalið umleið ár 1600 **3205**, og 50 ár seinni í 1650 var tað fallið til **2515**.

Mortensen (1954:37) kemur til at kalla sama úrslit fyri ár 1600. Hann fær við sínum roknihátti talið 3180. Hann roknar við støðd á einum meðalhúsarhaldi, sum verður sett til 5, og leggur so tænastufólk aftrat. Útrokningin er endurgivin hjá Guttesen (2004:44). Við øðrum orðum liggja bæði tølini, útroknað upp á tveir ymiskar mátar, heilt tøtt, **3205/3180**. Hetta styðjar uppundir, at roknihátturin við kongstíggjund kann brúkast.

Tí er líkt til, at talið fyri ár 1650, ið er **2515**, roknað eftir kongs-tíggjunda-metoduni, eisini kann brúkast. Fara vit 50 ár longur fram, til umleið ár 1700, so er talið vaksið til **3600** fólk.




## Hvat sigur fólkatalið umleið 1600, 1650 og 1700?

í Garði (1984) hevur út frá elstu fólkateljingum, kirkjubókum og øðrum skjølum roknað aftureftir frá fólkateljingunum í 1801, og á tann hátt rekonstruerað fólkatalið aftur til 1720. Tó verður óvissan tey elstu árini rættiliga stór, tí talið av kirkjubókum fækkast aftureftir. Men hetta er besta boð sum, mær kunnugt, higartil er givið. Fólkatalið verður, sum í Garði hevur roknað tað, 3985, avrundað til 4000, í 1720. Míni og hansara estimat passa væl saman, so sum mynd 6 vísir.

## Var Gabelstíðin serliga ring?

Kanna vit grafin, so stingur ein søguligur spurningur seg upp, og hann krevur at verða kannaður. Árini 1600-1650 eru ring ár við afturgongd í fólkatalinum. Men árini 1650-1710 og víðari fram eru merkt av framgongd. Hetta seinna skeiðið er vanliga merkt Gablatíðin.

Hví verður ein framgongdstíð søgd at verða ring. Hví er vanligt at hoyra*: „Gablatíðin, árini frá 1655 til 1709, er tiltikin í Føroyum, og tað er ikki fyri tað góða*“, sum teir báðir Rasmussen og Samuelsen (1965:40) skriva? Hetta man vera tann vanliga hugsanin, ein partur av ráðandi søguuppfatanini, ella paradigminum. Man kundi eisini spurt, hví var so stór afturgongd í perioduni frammanundan, 1600-1650? Var tað verri veðurlag, sum gjørdi, at bæði seyður og neyt minkaðu í tali í „Lítlu ístíðini“, sum hendan periodan ofta kallast. Ein orsøk til tað ringa orðið, sum Gabelstíðin hevur á sær, kundi

verið, at Gabel var komin at „blanda seg“ ov nógv, soleiðis at onkur í ráðandi familjunum í Føroyum kendi seg firtnan. Ein hypotesa kundi verið, at ein fremmandur løgmaður, Balzar Jacobsen, bleiv settur, og tann føroyska „kongarekkjan“ bleiv avbrotin, og tað kom helst illa við hjá maktelituni í Føroyum.

**Hvat ger 1816 til eitt merkisvert ár?**

Eg havi ofta spurt henda spurning – um árið 1816 – retoriskt millum fólk, og sum ein óbetingað refleks kemur fram eitt andlitsbrá, sum fólk flest eru til gravarferð. Løgtingið bleiv avtikið. Ja, og Løbner bleiv settur í nýggja embætið sum Amtmaður. Rasmussen og Samuelsen (1965:54) harmast um hendingarnar: „*Tók árið 1814 (*tá svenskarar tóku Norge*) ikki so fast hjá føroyingum, so man árið 1816 hava tikið so mikið fastari, tí hetta ár var hitt nærum 1000 ára gamla løgtingið avtikið og løgmansembætið niðurlagt.*“ Man tað hava tikið so fast, sum teir siga?




Hyggja vit at fólkatalinum 1720-1830, so mugu nýggir spurningar setast. Har er klárt, at eitt brot hendir millum 1810 og 1820. Fyrra skeiðið, 1720-1810, veksur fólkatalið við 1.300 í 90 ár, ella við **0,36%** p.a. Seinna skeiðið, 1810-1830, veksur tað við 1500 upp á 20 ár, ella við **1,42%** p.a. Vøksturin er nærum fýra ferðir so stórur í seinna skeiðinum. Hví?

Faktuel samfelagslig framgongd kann ávísast, men jammur á tí politiskt-ideologiska parnassinum. Mín hypotesa um henda mótsetning er, at yvirklassin er vorðin firtin, helst tí hann hevur mist nøkur privilegiir (frammíhjárættindir). Eitt nú hevði Løbner í fleiri ár, umleið 1812-1815, rationerað alla sølu til havnarfólk. Tað fekst ikki meira enn ein viku-ratión upp á húsarhaldið. (*Repartitionslister* 1812-1815). Seinni í 1814, tá umrøddu „*Løbner'sa tabellir*" blivu til, skuldu vørurnar í handlinum býtast eftir tørvi, so hvørki tey, ið høvdu pengar, ella tey, ið áttu ull, høvdu framíhjárætt. Borgaraskapið í Havn, prestaskapið um landið og stóru ullbøndurnir mistu fyri eina tíð eitt privilegium. Ein møgulig hypotesa er eisini, at fólk á gamla Bispagarðinum í Kirkjubø ongantíð gloymdu, at Løbner sum Kommandantur á Skansanum í 1807 fekk Álakerisfestið lagt at sínum starvi. Tað varð tikið burtur av Kirkjubøfestinum.

**Men hvussu so forklára framgongdina í fólkatalinum?**
At svara hesum spurningi – forklára framgongdina í fólkatalinum í stuttum – er ein stórur biti.Tað finst eingin einføld forkláring. Nógvir faktorar hava virkað saman. Mynd 8 er ein roynd at strukturera samfelagið.

**Nýggjur samfelagsklassi.** Eg havi givið eina skitsu av grundarlagnum fyri broytingini í stuttari grein í Brá fyri 20 árum síðani, og hana standi eg við enn, Guttesen (1987:26): „*Longu í fyrru helvt av 1800-talinum veksur ein nýggj vinnugrein og ein nýggjur samfelagsklassi fram. Tað eru traðar- og útróðrarmenn, sum fara at vaksa í tali. Teir leggja størri dent á útróður enn teir stóru bøndurnir, og frammíhjá hava teir eina trøð, sum tó er so lítil, at tað ikki ber til at liva av henni einsamallari.*" Vøkstur í fólkatalinum er í kassanum til høgru. Hann hevur umvegis framleiðsluháttin, sum eitt meginhugtak í søguligari materialismu og kritiska realismu (Collier 1998), samband við natúrgrundarlagið. Á demografisku síðuni veksur ein nýggjur klassi fram, á natúrsíðuni verður nýtt tilfeingi tikið inn í framleiðsluna.

**Nýggj miðfyrisiting:** Henda gongd móti nýggjum tíðum bleiv stuðlað við loyvum og pengum frá nýggju miðumsitingini. Teir fýra fyrstu amtmenninir, Løbner, Tillisch, Tillisch og Pløyen vóru allir dugnaligir embætismenn og framtakshugaðir. Løbner er tann fyrsti rættiligi embætismaðurin í tí nýggju miðfyrisitingini. Í mun til mynd 8 liggur hesin partur um fyrisiting fyri tað mesta í yvirtromini.

**Nýggj handilsviðurskiftir:** Hesir nevndu amtmenn gjørdu allir fyrireikingar til at innføra fríhandil, og í 1836-37 komu filialarnir á Tvøroyri, í Klaksvík og Vestmanna. Hetta lætti um møguleikan at koma til handils, og møguleikar at avreiða fisk batnaðu.

**Nýggj uppdyrking og niðursetubygdir**: Í fyrru helvt av 1800-talinum komu einar 15-20 nýggjar bygdir, fleiri komu seinni. Ofta vóru tær hagaleysar og løgdu dent á mjólkkúnna og útróður. Kongsbøndur stríddust flestallir ímóti øllum hesum nýggja. Sí eisini Guttesen (1987).

**Faktuel dokumentatión.** Tá fólkateljingin verður hildin í 1840, verður roynt at skilja millum tey, ið liva av jørð, og tey, ið liva av sjónum. Longu tá eru fleiri bygdir, ið leggja stóran dent á útróður, serliga fleiri, ið liggja nær Norðhavinum. Í Havn eru flest, ið liva av havinum, men eisini í Tjørnuvík, Vestmanna, Kunoy, Klaksvík, Eiði, Funningi, Oyndarfirði og Fuglafirði hevur stórur partur av íbúgvunum inntøkuna av sjónum. Hervið er dokumenterað, at ein nýggj tíð er komin. Framleiðsluhátturin, ella tann mátin menniskjað í føroyska samfelagnum vinnur sær til dagin og vegin ella tann externa metabolisman ella tað ytra stoffskiftið, er vorðin ein annar.

**Samanfating og svar upp á spurningarnar í problemformuleringini**

Í sokallaða gamla bóndasamfelagnum var tað neytahaldið, sum var grundarlagið. Mjólkin læt gott 40% av allari kaloriu-nýtslu, og mjólkin var ein stabil kelda, variatiónin var sum 1:2 ella kanska minni. Um nakað í føroyska samfelagnum kann kallast „hard grain", so verður tað hoyggj, sum var fortreyt fyri mjólkarframleiðslu. Allar hinar kaloriu-keldurnar spældu eina minni rollu, og serliga tann manglandi stabiliteturin gjørdi, at ikki var møguligt at byggja eitt samfelag á hesar keldur. Ikki tí, hoyggj varð sjáldan goymt meira enn ein vetur. Nakað veruligt „hard grain" var ikki, men føroyska perifera samfelagið var heldur eingin stór civilisatión. Nýggjari gransking bendir á (Kristensen 2008), at hetta hevur verið myndin ella modellið í víkingatíð í flestum Norðanlondum. Eisini í Danmark var tað helst so, har neytahaldið við bø og haga (toft og overdrev) tá hevði størri týdning enn seinni, tá alt størri økir blivu løgd undir plógv til korndyrking. Sama myndin er at finna í Íslandi. Nógv bendir á, at samfelagið hjá norðbúgvum í Grønlandi hevði

sama struktur og bygdi á neytahald. Tað bleiv sambært Diamond (2005:224) eisini teirra undirgangur.

Hetta arbeiði hevur víst, at ymsar keldur – eitt nú smørtíggjund – sum proxydata kunna geva eina haldgóða mynd av fólkatalinum í farnum tíðum. Sum hypotesu, ið er verd at hava í huganum í víðari gransking, kann sigast, at kanska var føroyska samfelagið um at fara sama veg sum tað grønlendska mitt í 1600-talinum, tá einans 2.500 fólk vóru eftir. Tvey citat úr Tingbókini (Joensen 1953) lýsa av desperatión. Í 1667 skriva teir, at tað „…*er at befrygte, Landet der over kommen udi Ruin og bliver øde.*“ Skilið tykist ikki at vera frægari næsta árið. Teir tosa um: „… *at dette fattige Land ikke ganske skal forderves.*“ Og aftur nøkur ár seinni ljóðar sum teir eru um at missa mótið: „ … *saa at nöden er bliven større og større, saa at paa det sidste at den ene ikke kunde hielpe den anden, hvor over dette fattige Lands Elendighed forgangen Vinter ikke noksom kan beskrives.*“ Tað er altíð ein spurningur, hvussu tað skal skiljast, og hvussu støðan veruliga hevur verið. Men tað kann lesast, sum at teir her siga, at nú var endi í hendi.

**Mynd 8: Samfelagið, strukturel sambond og bindingar**




Kelda: Broytt og víðari útviklað eftir Guttesen (1996c).

**Teoretisk samanfating**

Keldurnar, ið her hava verið brúktar, hava tað felags, at tær allar hava sum mál at føra í bók, hvat ið verður gjørt av arbeiði og úrslitini av tí. Henda sannkenning kann benda tankarnar aftur á Steensberg, sum segði, at tey fyrstu tal- og skriftsystemini komu upp í civilisatiónunum, har tað var neyðugt at bókføra vørugoymslurnar. Nógvar av teim elstu keldunum á Landsskjalasavninum eru eitt slag av roknskaparbókum um arbeiði og arbeiðstiltøk og skattalistar. Elsta føroyska lógbókin, Seyðabrævið, er ein regulering av arbeiðsprocessum í høvuðsvinnuni, landbúnaðinum.

Arbeiðsprocessin, ella sum tað nevnist í hjástandandi kassadiagrammi – tann externa metabolisman hjá menniskjanum – er sum samfelagsins umbilicus. Í arbeiðsprocessini ávirkar menniskjað natúruna, og natúran ávirkar menniskjað. Natúran er tilfeingið, ið gevur tað, sum er neyðugt til lívsins uppihald. Menniskjað sum arbeiðskraft er fyritreyt fyri samfelagsligum lívi. Øll samfeløg hava eina ideologiska dimensión, har religión, mentan, jura og annað so ella so eru ein avmynding av tí materiella lívinum, men sum eisini ávirkar og stýrir tí. Eitt klárt klassabýti var eisini. Hetta broyttist so líðandi, meðan gamli ráðandi klassin róði upp ímóti. Leikarar í yvirtromini, eitt nú frælslyntir amtmenn, løgdu lunnar undir hesa gongd. Summir fingu enntá ringt orð á seg, tí teir skumpaðu undir gamlar siðir og privilegiir.

Kassadiagrammið skal skiljast sum eitt tól ella amboð, sum hevur eina heuristiska funktión, tað er leiðbeinandi og kann ongantíð brúkast sum argument í sjálvum sær. Tað er eingin einføld, unilinear ella snórabein av gongd samfelagsskipanum móti hægri stigum. Øll samfeløg, og kanska serliga tey smáu og periferu sum Føroyar, kunnu uppliva collaps, sum Diamond (2005) skrivar um. Øll søgulig geografi er ein abstraktur málningur við framgongd og afturgongd, útvikling og oyðileggilsi. Útviklingur er í sjálvum sær eisini oyðileggilsi – av tí gamla.

**Referencur:**

Andersen, N. (1895/1964): *Færøerne 1600-1709*. G.E.C. Gad/Helge Justinussens Bókahandil. Tórshavn.

Archer, M. et al. ed. (1998): *Critical Realism. Essential Readings*. London and New York. Routledge.

Collier A. (1998): *Stratified explanation and Marx's conception of History*. pp 258-296 in Archer et al. (1998).

Debes, L. (1673/1965): *Færoæ & Færoa Reserata*. Kjøbenhaffn/Tórshavn, Einars Forlag.

Degn, A. (1929): *Oversigt over Fiskeriet og Monopolhandelen paa Færøerne 1709-1856*. Tórshavn. Felagið Varðin.

Diamond. J. (2005): *Collapse. How societies choose to fail or survive*. London. Allen Lane.

Fridriksson, S. (1972): Grass and Grassland Utilization in Iceland. *Ecology,* Vol. 53,5. pp 785-796.

Garði, B. í (1984): *En historisk demografisk undersøgelse af udviklingen på Færøerne 1720-1831 med særlig henblik på at beskrive de relevante kilder, samt at beregne de summariske fertilitets- og dødsrater*. Stor opgave ved Polit-studiet. Københavns Universitet (Unpublished).

Guttesen, R. (1987): Hugleiðingar um samfelagsbroytingar í Føroyum í 1800-talinum. *Brá* nr. 11. pp 22-29.

Guttesen, R, ed. (1996 a): *Topografisk Atlas Færøerne*. Det Kongelige Danske Geografiske Selskab & Kort-& Matrikelstyrelsen. København.

Guttesen, R. (1996 b): *Hvalbøur. Færøernes største marketalsbygd*. pp 88-91 in Guttesen ed. (1996a).

Guttesen, R. (1996 c):*Træk af Færøernes kulturgeografi*. pp 4-11 in Guttesen ed. (1996a).

Guttesen, R. (1999): Commanders Loebner Tables and Vital Necessities in the Faeroe Islands in 1813. *Geografisk Tidsskrift Danish Journal of Geography*. Special Issue 1:75-80.

Guttesen, R. (2001): Plant Production on a Faeroese farm 1813-1892, related to climatic fluctuations. *Geografisk Tidsskrift, Danish Journal of Geography*, vol 103 (2). 81-91.

Guttesen, R. (2003): Animal production and climate variation in the Faeroe Islands in the 19th century. *Geografisk Tidsskrift, Danish Journal of Geography*, vol 101. 67-76.

Guttesen, R. (2004): Food production, climate and population on the Faeroe Islands 1584-1652.*Geografisk Tidsskrift, Danish Journal of Geography*, vol 104. 67-76.

Guttesen, R. (2005a): *„Týskar klumpar og franska sós“. Omkring kartoffelens udbredelse på Færøerne i 1700 og 1800-tallet*. pp 153-164 in Marnersdóttir et al (2005): Eyðvinur. Tórshavn. Føroya Fróðskaparfelag.

Guttesen, R. (2005b): *Fiskens betydning som ernæringskilde på Færøerne i første halvdel af 1800-tallet*. pp 101-115 in: Mortensen, A: Fólkaleikur. Tórshavn. Føroya Fróðskaparfelag.

Joensen, E. (1950) og Landt (1800/1965) (Ed.) (1953): *Tingbókin 1615-1654*. Einars Prent. Tórshavn.

Kristensen, S.P. (2008): E-mail 15.01.2008 um danskt landbrúk í víkingatíð. Geografisk Institut. København.

Landt, J. (1800/1965): *Forsøg til en Beskrivelse over Færøerne*. København/Tórshavn, Einars Forlag.

Mortensen, A. (1954): Fólkatalið og ognarbýtið um ár 1600. *Fróðskaparrit* 3: 7-59.

Rasmussen, P. M. & Samuelsen, H. (1965): *Føroya Søga*. Einars Prent. Tórshavn.

Sigvardsen, P. J. (2007): *Torvið í Føroyum í søgu og siðsøgu*. Bind I-V. Forlagið Búgvin og Fróðskapur. Tórshavn.

Steensberg, A. (1989*): Hard grain, irrigation, numerals and script in the rise of civilisations.*The Royal Danish Academy of Sciences and Letters Commission publ. no. 6. Copenhagen.

Svabo, J. C. (1782/1959): *Indberetninger fra en reise in Færøe 1781 og 1782*. Selskabet til udgivelse af færøske kildeskrifter og studier. København.

*Taxatiónprotokollin* (1873/1973). Schultz/Blaðstarv. Kjøbenhavn/Tórshavn.

Zachariassen, L. (1961): *Føroyar sum rættarsamfelag*. Annales Societas Scientiarum Færoensis, Supplementum IV: Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn

**Transskriberað og digitaliserað tilfar frá Føroya Landsskjalasavni:**

Guttesen, R., edit (2007): Emilius Löbners (1815): Fortegnelse over folkemængden i Færöe den 1. Januar 1814, deres Ejendomme, Næringsgrene mm. Føroya Landsskjalasavn. Tórshavn. Internet 10.12.2009 <history.fo>

Guttesen, R. edit. (2009a): Indberetninger fra sysselmændene ifølge

Amtsordre af 23. November 1830. Føroya Landsskjalasavn. Tórshavn. Internet 10.12.2009. <history.fo>
Guttesen, R. edit. (2009b): „Matras-dagbøkurnar 1790-1892“. Landsskjalasavnið og Norðoya Fornminnasavn. Internet 10.12. 2009. <history.fo>

**Skjøl á Føroya Landsskjalasavni:**

„Lítlabók“. Dagbók hjá Samuel Petersen løgmanni (1707-1760) um viðurskifti, serliga um seyð, á Steigargarði í Sandavági.
„Repartitionslister“ 1812-1815. Amtarkivið, 33-XI-pk. Føroya Landsskjalasavn. Tórshavn.
„Kongs-tíggjundalistar.“ Kopi av listunum liggja í Fútaarkivinum og í kopibókum í sýslunum, originalarnir á Rigsarkivet saman við Jarðarroknskapunum (Jarðarbókunum).

Um høvundin:

*Rolf Guttesen*

Cand. scient frá Københavns Universitet í 1970 í Geografi við Geologi sum hjáfak og Botanik og Zoologi sum eykafak. Lektor á Geografisk Institut 1971-2005 í Kulturgeografi við demografi, søguligari geografi og vísindateori sum serøki, og regionalt speciali í tí norðuratlantisku regiónini.

Í dag Senior Fellow sama stað, og virkar annars sum free-lance journalistur. Hevur eisini undirvíst á Fróðskaparsetrinum í Havn. Adjungeraður lektor í søguligari geografi, Fróðskaparsetur Føroya.

*Lena Nolsøe*

# Stríðið um skjølini

Landsskjalasavnið er ein gamal stovnur sammett við aðrar stovnar í Føroyum og sett á stovn í 1932, meðan Føroyar enn vóru danskt amt. Skjalasavnsmálið verður ikki roknað sum eitt stórt politiskt mál. Kanska er tað tí, at tað var breið semja í løgtinginum um at varðveita skjøl um føroysk viðurskifti í Føroyum. Stríðið um skjølini avdúkar tó, hvussu trupult tann ríkisrættarliga støðan hjá Føroyum gjørdi tað fyri løgtingið, sjálvt við einari breiðari semju, at fáa sínar samtyktir framdar í verki.

Henda grein viðger í høvuðsheitum tað, sum fór fram í tíðarskeiðinum 1920 til 1932 – frá tí at uppskot varð sett fram á løgtingi um at seta á stovn skjalasavn í Føroyum og til tað varð veruleiki.

Orðið skjalasavn – arkiv – hevur fleiri týdningar. Tað kann merkja tað rúmið ella deildin á einum privatum ella almennum stovni, sum skjølini verða goymd, bygningur, har skjøl verða varðveitt, ella ein fyrisitingarligur stovnur, hvørs endamál er at varðveita almenn og privat skjøl. Í greinini eru tað í flestum førum skjalasavn í teimum báðum seinnu týdningunum, sum verða umrøddir.

Skjalasøvn verða viðhvørt nevnd mentanararvstovnar og viðhvørt samfelagsins minni – memory of the society. Hesi heiti vísa hvørt á sín hátt á høvuðsuppgávurnar hjá einum skjalasavni, nevniliga at varðveita søgulig skjøl, so tey eru tøk fyri granskingina, og at varðveita tær avgerðir, sum myndugleikarnir hava tikið fyri rættartrygdina hjá borgarunum. Tí hava skjalasøvn stóran týdning fyri eina tjóð og eru allastaðni, eins og í Føroyum, oftast teir elstu stovnarnir í landinum.

Føroyska skjalasavnssøgan byrjar eisini fyri 1920. Eftir at Einahandilin var avtikin í 1856, varð avgjørt at brúka Leigubúðina til „Opbevaringssted for Landets offentlige Arkiver"[1]. Umframt skjøl frá tí niðurlagda einahandlinum vóru eisini skjøl hjá fútanum og sorinskrivaranum í varðveitslu har. Í 1889 varð henda goymsla niðurløgd, og skjølini hjá fútanum og sorinskrivaranum flutt í tær nýggju embætisskrivstovurnar, sum tá vórðu bygdar. Skjølini hjá Einahandlinum, sum tá ongan góðan høvdu, vórðu flutt til Rigsarkivet í Keypmannahavn.

**Uppskot um at byggja skjalasavn**

Fyrstu ferð uppskot um bygging av skjalasavni var fyri á løgtingi var í 1903. Uppskot var tá um at byggja nýtt løgtingshús. Ætlanir vóru frammi um, at húsið skuldi hava fleiri funktiónir og har ímillum eisini hýsa bókasavni og skjalasavni. Ikki er heilt greitt, hvørji skjøl løgtingsmenninir hugsaðu um, men í øllum førum hildu teir, at verandi skjalagoymslur ikki vóru nóg eldtryggar. Í 1906 varð tó samtykt, at í staðin fyri at byggja nýtt hús til løgtingið, skuldi løgtingsbygningurin víðkast, og tí fall uppskotið burtur.[3]

Onki hendir aftur í skjalasavnsmálinum fyrr enn í 1920. Tá leggur Jóannes Patursson uppskot fyri løgtingið um at heita á ríkisstjórnina at játta 2.000 kr. til at skipa og skráseta gomul skjøl og protokollir á embætisskrivstovunum í Føroyum. Onki hóskandi skjalasavn var í Føroyum, og hann skjýtur tí upp, at tingið í samráð við nevndina fyri bókasavnið og forngripagoymsluna fær gjørt tekningar og kostnaðarmeting til eitt skjalasavn.

Málið var til viðgerðar í fíggjarnevndini. Í nevndarálitinum stendur, at nevndin er samd við uppskotsstillaran um, at skjalasavnsviðurskiftini í Føroyum eiga at gerast betri. Víðari sigur nevndin: *Det være af stor betydning at faa en bedre Ordning i Arkivforholdene ikki alene af historisk og personalhistorisk Hensyn, men ogsaa for at lette Adgangen til Dokumenter af juridisk Betydning ved Afgørelse af Retstvister og lignende.*

Nevndin kom við hesum tilmæli:
1 at ríkisstjórnin játtar 2000 kr.
2 at tingið velur eina trímannanevnd til at leiða arbeiðið.
3 at heita á amtmannin at skipa og skráseta løgtingsskjalasavnið og

í samráði við trímannanevndina at lata Løgtingstíðindi fyri 1892 prenta.

4 at amtmaðurin heitir á sorinskrivaran, fútan, sýslumenninar og prestarnar um at varðveita skjøl síni á besta hátt.

5 at tingið, møguliga saman við bókasavnsnevndini, ger uppskot um eitt skjalasavn.

Hetta uppskotið varð einmælt samtykt av løgtinginum.

Løgtingið var tá ráðgevandi stovnur, og tað var amtmaðurin, sum hevði ovasta umsitingarliga valdið í Føroyum. Alt samband ímillum stovnar í Føroyum og myndugleikarnar í Danmark skuldi ganga ígjøgnum hann. Justitsministeriet var tann ráðharrastovan í Danmark, sum umsat føroysk mál, og justitsministarin var ráðharri fyri Føroyar. Eftir eina løgtingssamtykt var málsgongdin henda:

Amtmaðurin boðar Justitsministeriet frá og hevur møgulig viðmælir við frá føroyskum embætismonnum.

Justitsministeriet biður um tilmæli frá tí ministeriinum, har málið hoyrir til.

Ministeriet biður um fakligt tilmæli.

Tilmælini verða send aftur til Justitsministeriet.

Justitsministeriet boðar amtmanninum frá.

Amtmaðurin boðar løgtinginum frá.

Tað var tí ein drúgv málsgongd, frá tí at eitt mál var samtykt av løgtinginum í Føroyum, til tað, sum løgtingið hevði samtykt, møguliga kundi setast í verk. Málini skuldu hava bæði fakliga og politiska viðgerð hjá øllum myndugleikum. Soleiðis varð eisini við hesari løgtingssamtykt. Henda drúgva málsgongdin speglast eisini í, hvar skjølini til hesa grein eru varðveitt. Skjølini hjá løgtinginum og amtmanninum eru í varðveitslu á Landsskjalasavninum, meðan skjølini hjá Justitsministeriet og Undervisningsministeriet eru á Rigsarkivet í København.

Áðrenn amtmaðurin sendi sítt tilmæli til Justitsministeriet í Danmark, spurdi hann embætismenninar í Føroyum, hvussu vorðið var við skjølum og skjalasøvnunum hjá teimum.

8. nov. 1920 segði fútin frá í skrivi, at teirra skjalasavn var rímiliga væl skipað, men at tað var trupult at leita í teimum gomlu jour-




*Tekning yvir hvørjir myndugleikar og stovnar høvdu skjalasavnsmálið til viðgerðar.*

nalunum. Annars, legði hann afturat, var tað sjáldan, at nakar spurdi eftir teimum gomlu skjølunum har á stovninum.

Sorinskrivarin segði frá í skrivi frá 19. nov. 1920, at í hansara skjalasavni var alt í lagi. Hann legði so afturat, at hann helt tað ikki vera uppgávan hjá løgtinginum at taka sær av skjølum. Tað var uppgávan hjá Statens Arkivvæsen, tó at tað ongantíð vóru avhendað nøkur skjøl hagar. Hann helt tó, at tað ikki var rætt at fylgja galdandi avhendingarfreistum, tí at í Føroyum var ofta brúk fyri teimum gomlu protokollunum.

Amtmaðurin, E. Olrik, sendi samtyktina hjá løgtinginum víðari til Justitsministeriet við sínum tilmæli 6. desember í 1920.

*Paa Foranledning af Kongsbonde J. Patursson, Kirkebø, har Lagtinget i dette Aars ordinære Samling vedtaget at fremsende til Ministeriet*

*hosfølgende Indstilling med Bilag, hvorefter der ønskes bevilget et Beløb af 2000 kr til Bestridelse af Udgifterne ved Ordning og Registrering af ældre Dokumenter og Protokoller paa Embedskontorene.*

*Man har i denne Anledning de hosfølgende Erklæringer fra Sorenskriveren og Landfogeden og kan for Amtskontorets vedkommende udtale, at Forholdene stiller sig paa lignende Maade som paa Landfogedskontoret, saaledes at Ordningen maaske kan kaldes upraktisk, men dog ikke uforsvarlig.*

*Idet man herhos kan tiltræde det af Sorenskrivernes anførte, at eventuelt Omordning burde ske ved Statens Arkivvæsen, skal man tillade sig at indstille, at der svares Lagtinget, at der ikke ses at være Anledning til at søge nogen særlig Bevilling til omspurgte Formaal og at en eventuel Ordning og Registrering af Embedskontorenes Arkiver vil være at udføre af Statens Arkivvæsen.*[4]

Í februar 1921 sendi Justitsministeriet málið víðari til Undervisningsministeriet, sum var tað ráðið, sum skjalasøvn hoyrdu undir, og bað um tilmæli teirra. Undervisningsministeriet sendi málið víðari til fakkunnleikan, sum í hesum føri var Rigsarkivet í Keypmannahavn. Táverandi ríkisskjalavørðurin, Kr. Erslev, kom við sínum tilmæli 9. mars 1921.[5] Eftir at hann aftur hevði ráðført seg við landsskjalavørðin fyri Sjælland, G. Hornemann, har Føroyar hoyrdu undir, var tilmæli hansara at søkja ríkisstjórnina um játtan til at lata eitt fakfólk („arkivmand“) fara til Føroyar at gjøgnumganga embætissøvnini og kanna skjølini.

Í skrivinum frá ríkisskjalavørðinum sæst eisini, at landsskjalavørðurin fyri Sjælland ikki heldur, at somu avhendingarreglur kunnu verða galdandi fyri skjølini í Føroyum sum fyri tilsvarandi skjøl í Danmark. Hann vísti á, at av tí at Føroyar lógu so langt burtur, vildi verið trupult hjá myndugleikum og granskarum at fáa fatur í skjølunum, eftir at tey eru latin skjalasavninum í Danmark í varðveitslu. Hann segði seg eisini hava umrøtt málið við Chr. Bærentsen, tá ið hann var amtmaður og seinni eisini við Fríðrik Petersen próst. Hetta er áhugavert, tí at tað tykist, sum um tað bert vóru embætismenn, sum vóru føroyingar, sum hava víst áhuga fyri, hvussu skjølini vóru varðveitt.

Hornemann segði seg ikki vita, hvat ætlanin var við áheitanini hjá løgtinginum, men um ætlanin var, sum hann hevði varhugan av, at fáa sett eitt skjalasavn á stovn í Føroyum, so var ongin lógarheimild

fyri hesum. Harafturat helt hann ikki, at tað í Føroyum vóru fólk, sum kundu átaka sær eitt tílíkt starv.

**Danskur landsskjalavørður til Føroyar í 1921**

Undirvísingarmálaráðið fylgdi tilmælinum frá ríkisskjalavørðinum um at senda ein skjalavørð til Føroyar at kanna umstøðurnar, og hetta varð eisini tað fyrsta ítøkiliga úrslitið av áheitanini hjá løgtinginum.

Peningur varð fingin til vegar á eini eykajáttan, og landsskjalavørður fyri Sjælland, og sum nevnt omanfyri, eisini fyri Føroyar, G. Hornemann, varð sendur til Føroyar at kanna viðurskiftini. Hann var í Føroyum frá 12. juli til 25. august í 1921 og kannaði viðurskiftini á øllum almennum stovnum, sum vóru í Tórshavn. Einasta stað uttan fyri Havnina, sum hann vitjaði, var í Vága prestagjaldi. Hann segði í frágreiðing síni frá 29. oktober 1921[6] til ríkisskjalavørðin, sum sendir hana víðari til Undervisningsministeriet, at hann vegna tíðarneyð ikki náddi at vitja sýslurnar og prestagjøldini, sum eisini høvdu skjøl.

Niðurstøðan hjá Hornemann var greið. Hann metti, at skjølini als ikki vóru goymd nøktandi. Bert kirkjubøkurnar, heldur hann, vóru toluliga væl goymdar. Stovnarnir høvdu vánalig og ofta eisini rálig goymsluhølir. Skjølini lógu soleiðis, at illa slapst fram at teimum, og ofta vóru ongi ella ófullfíggjað yvirlit yvir, hvat var í skjalasøvnunum hjá stovninum. Hann ráddi til, at stovnarnir fingu betri hølir og eisini hillar til at seta skjølini á. Í frágreiðing síni kom hann eisini við síni meting av skjalasavnsviðurskiftunum sum heild í Føroyum.

Hann helt tað ikki vera nakar ivi um, at danska arkivlógin frá 1889 eisini var galdandi fyri Føroyar, og sostatt áttu embætini í Føroyum at lata skjøl síni í varðveitslu á Landsarkivet for Sjælland á sama hátt sum tilsvarandi stovnar í Danmark. Hetta var vanliga eisini tað besta fyri bæði embætini og almenningin, bæði tí at skjølini soleiðis vóru varðveitt undir tryggum umstøðum, og tí lættari var at koma at skjølunum. Tó metti hann, at av tí at Føroyar lógu so langt burtur, og samferðslan var so vánalig, so var neyðugt við longri avhendingarfreistum enn teimum, sum vóru galdandi. Hann dugdi tó at síggja, at tað ikki fór at verða væl dámt í Føroyum at flyta skjølini so langan veg. Serliga ímillum tey, sum høvdu áhuga í søgu.

Hann nevndi eisini nýggja bókasavnsbygningin, har eisini kundi fingist rúm fyri skjølum, men legði dent á, at okkurt mátti vera misskilt, tá ið løgtingið tók avgerð um at skipa og skráseta skjøl. Løgtingið hevði ikki meiri ræði á hesum skjølum enn eitt danskt amtsráð. Um eitt skjalasavn skuldi setast á stovn í Føroyum, mátti tí helst ein lógarbroyting til.

Hann metti, at tað hevði verið rímiligt at sett eitt landsskjalasavn á stovn í Føroyum. Hetta hevði lætt um møguleikarnar hjá søguáhugaðum fólki at komi at skjølunum á sama hátt sum landsskjalasøvn vóru sett á stovn í Danmark.[7] Í hvussu er var alneyðugt at gera okkurt beinanvegin, tí sum støðan var, vóru skjølini goymd undir ógvuliga ótryggum umstøðum, ella sum Hornemann sigur í frágreiðing síni:

*..den fare, der truer Embedsarkiverne, hvor de nu er anbragt. Man kan ikke færdes i Thorshavns Gader og navnlig ikke paa Tinganæs, den lille Halvø, hvor Tinget i gamle Dage holdtes, uden med nogen Gysen at komme til at tænke paa, hvad der ville ske, hvis der her brød Ild ud. Faren er saa stor, at jeg ikke ved, om man ikke for at sikre de uerstattelige Arkivalier burde – om end kun midlertidigt – føre de ældste Dele af Embedsarkiverne ned til Danmark og opstille dem i et af vores Arkiver. Men hvorledes man nu en forøvrigt vil bære sig ad, saa kommer man ikke uden om, at de Forhold, hvorunder Amt-, Sorenskriver- og Landfogedarkiverne for Tiden opbevares, er uheldige.*

Víðari mælti hann inniliga til, at syrgt varð fyri, at betri hølir vórðu fingin til skjølini, og at ein skjalavørður varð sendur til Føroya at skipa fyri arbeiðinum. Hann mælti samstundis til, at eitt serligt skjalasavn varð innrættað til føroysku skjølini. Antin at innrætta eitt brandtrygt stað í Tórshavn, ella at tey elstu skjølini vórðu flutt til landsskjalasavnið á Sjællandi. Hann helt, í hvussu er, at syrgt skuldi verða fyri, at kontraministerialbøkurnar – tær kopibøkurnar, sum verða førdar av kirkjubókunum – skulu sendast til Danmarkar 10 ár eftir, at tær eru fullskrivaðar, eins og gjørt varð í Danmark.

Sum heild kann sigast um frágreiðing og tilmæli hjá Hornemann, at hann sum fakfólk greiddi frá, hvussu hann helt, at skjølini best vórðu varðveitt, og hvussu tey kundu verða atkomilig fyri áhugað. Samstundis vísti hann á, hvør lóggáva er galdandi fyri skjølini.

2. nov. 1921 sendi ríkisskjalavørðurin frágreiðing Hornemanns við sínum tilmæli til Undirvísingarmálaráðið. Hann tók undir við, at kontraministerialbøkurnar vórðu sendar til Danmarkar, at heitt varð á myndugleikarnar á staðnum um at fáa betri hølir til varðveitslu av skjølum. Eisini mælti hann til, at kannað varð, hvar ein bygningur til føroyskt landsskjalasavn kundi byggast, og hvat tað kostaði.

Undervisningsministeriet sendi 25. nov. 1921 málið aftur til Justitsministeriet[8], sum so sendi tað víðari til amtmannin í Føroyum. Síðan fekk embætisverkið í Føroyum møguleika til at gera viðmerkingar til frágreiðing og tilmæli.

Aftur nú sýntist tað, sum at embætismenn, sum eru føroyingar, sýna landsins skjølum betri ans enn hinir. Prósturin, Jákup Dahl, hevði eina greiða meining um, at best var at seta eitt landsskjalasavn á stovn í Føroyum antin saman við nýggja landsbókasavninum ella í einum bygningi fyri seg. Hann hevði ongar viðmerkingar til, at kopikirkjubøkurnar skuldu flytast til Danmarkar, men helt tó, at best var, um tær vóru skrivaðar av áðrenn, so at eitt eintak av teimum eisini kundi vera í Føroyum.

Amtslæknin hevði ongar viðmerkingar, meðan fútin segði, at tað gjørdi tað sama, um skjølini vóru í Føroyum ella í Danmark. Hann segði, at har vóru nógv skjøl, t.d. frá fátækrakassanum og kirkjukassanum, sum áttu at verið avhend, tí hann umsat ikki hesi økir longur.

Í sínum fylgiskrivi til Justitsministeriet, sum er dagfest 1. mai 1922, segði Olrik, amtmaður, seg ivast í, um peningur kundi fáast innan fyri rímiliga tíð til at byggja bókasavnshús, tí helt hann tað var best, at ein skjalavørður varð sendur til Føroyar at standa fyri at skipa skjølini. Justitsministeriet sendi longu 11. mai málið víðari til Undervisningsministeriet og bað um nýtt ummæli. Í september kom svar aftur, har Undervisningsministeriet segði, at Ríkisskjalasavnið ikki helt, at tey kunnu senda nakran skjalavørð í næstum.

### Løgtingið ótolnast

Sostatt var alla tíðina gongd í málinum, hóast onki ítøkiligt hendi við teimum skjølum, sum liggja á embætisskrivstovunum. Løgtingið var farið at ótolnast, og 2. oktober í 1922 samtykti løgtingið at senda áheitanina frá 1920 av nýggjum. Heldur ikki hesa ferð atkvøddu

nakrir løgtingslimur ímóti, men onkur atkvøddi ikki, og nakrir vóru ikki hjástaddir.[9]

Beint eftir hetta sæst eisini, at okkurt hendir. 25. nov. 1922 biður Justitsministeriet amtmannin um tilmæli um, hvørji skjøl á embætisskrivstovunum í Føroyum eiga at verða flutt, og hvagar tey skulu flytast. Eisini varð spurt, um regluligar avhendingar skuldu vera til landsskjalasavnið á Sjællandi og hvørji skjøl, talan kundi vera um.

15. desember 1923 sendi amtmaðurin tilmælini, sum hann hevði fingið í Føroyum. Tað sæst týðuliga á frágreiðingunum frá embætismonnunum, at teir, eftir at ein skjalavørður hevði verið og kannað teirra skjøl, høvdu betri kunnleika til skjølini, sum teir lógu inni við.

Fútin gjørdi eitt yvirlit yvir tey savnindi, sum eftir hansara tykki kunnu flytast úr savni hansara beinanvegin. Skjølini, sum vóru nevnd í yvirlitinum, vóru brævaskifti hjá fútanum frá 1750-1880, roknskapir fyri sama tíðarskeið og annars skjøl innan øki, sum fútin ikki longur umsat, t.d. fátækraverk og kirkju.

Sorinskrivarin boðaði frá, at hann nú nágreiniliga hevði gjøgnumgingið skjalasavnið hjá sær og var komin til ta niðurstøðu, at hann ikki heldur tað var neyðugt at senda nøkur av gomlu skjølunum á hansara embætisskrivstovu til Danmarkar.

Í fyrsta lagi sigur hann, at av tí at jarðarviðurskiftini í Føroyum vóru so fløkt og orsakað av tí manglandi matrikuleringini í Føroyum, var ofta brúk fyri gomlum skiftiprotokollum og øðrum skjølum, tá ið trætur vóru fyri í rættinum um jarðarviðurskifti. Brúksrættindini til haga bygdu ofta á fleiri hundrað ára gamlar sáttmálar og rættarúrskurðir, so at neyðugt var at leita í gomlu vár- og løgtingsbókunum eftir tí. Um hesi skjøl vóru latin til landsskjalasavnið á Sjællandi, helt hann ikki, at starvsfólk har høvdu dugað at funnið røttu upplýsingarnar fram, um tey vóru biðin um tað. Í hesum førum, helt hann, at serligur kunnleiki kravdist til føroysk viðurskifti og til Føroyar.

Í øðrum lagi, sigur hann, at í Føroyum er vaksandi áhugi millum føroyingar fyri søguligu viðurskiftum um Føroyar, og hesi høvdu verið avskorin frá at nýta hesi skjøl, um tey vóru send av landinum.

Í triðja lagi vóru tey skjøl, sum hann helt, at tey kundu verið fyri uttan í Føroyum, so lítil í vavi, at tað ikki gjørdi stóran mun í

sambandi við hølisviðurskiftini. Tey skjøl, sum hann metti kundu flytast til Danmarkar, vóru m.a. roknskaparskjøl og sýn av kongliga handilin.

Hann legði eisini dent á tað, sum Hornemann hevði skrivað um, at einastu keldur til nógv føroysk viðurskifti lógu á hansara skrivstovu, og at tað var alneyðugt, at tær vórðu goymdar undir tryggum umstøðum.

Í tilmæli sínum segði amtmaðurin frá, hvat nú var gjørt fyri at bøta um plássviðurskiftini og hevði yvirlit yvir, hvat skuldi sendast til Danmarkar. Um eitt skjalasavn varð bygt í Tórshavn, vísti hann á, hvat hann heldur skuldi latast tí. At enda nevndi hann eisini ta seinastu løgtingssamtyktina, sum hann metti vera eina endurtøku av samtyktini frá 1920, og sum hann tí ikki helt orsøk vera til at viðgera gjøllari.

Sum sagt var málsgongdin ógvuliga long og fløkt, tá ið eitt mál varð viðgjørt, og soleiðis skuldu hesi tilmælini frá amtmanninum eisini ígjøgnum skipanina. Ríkisskjalavørðurin bað landsskjalavørðin fyri Sjælland um viðmerkingar til seinastu tilmælini frá embætisverkinum í Føroyum, sum hann so sendi víðari til Undervisningsministeriet. Nú eru vit komin til mars í 1924. Nýggjur landsskjalavørður hevði nú tikið við, og hesin var meiri avgjørdur í síni áskoðan um føroysku skjølini. Hann tók undir við sorinskrivaranum um, at skjølini áttu at vera, har tað var brúk fyri teimum, í Føroyum. Til viðmerkingarnar hjá sorinskrivaranum um, at tey skjøl, sum hann metti ikki hava so stóran týdning, kundu fara til Danmarkar, segði landsskjalavørðurin, at tey so høvdu enn minni týdning fyri danska søgu. Størsti trupulleikin var eftir hansara tykki, at ongar tryggar skjalagoymslur vóru í Føroyum. So leingi onki ítøkiligt var við ætlanunum um at byggja skjalasavn í Føroyum, var neyðugt at senda tey elstu skjølini fyribils til skjalasøvn í Danmark, til nøktandi umstøður vóru í Føroyum. Hansara uppskot var sostatt, at skjøl í Føroyum vórðu undantikin avhendingarskyldu til Landsskjalasavnið á Sjællandi, men at elsti parturin fyribils varð koyrdur har.

Hesum tekur ríkisskjalavørðurin undir við í fylgiskrivi sínum.[10] Tá ið Justitsministeriet skrivar aftur til amtmannin 14. apríl 1924, var tikið undir við upprunaliga uppskotinum hjá embætismonnunum í Føroyum um, hvørji skjøl skuldu sendast til Danmarkar, men Justits-

ministeriet segði, at skjølini skuldu avhendast og nevndi onki um, at tað bert skuldi vera fyribils.[11] Síðan varð givið boð um, hvussu útreiðslurnar í sambandi við flytingina skuldi greiðast.

### Politiskt rok um skjølini

Í Danmark var nýggj sosialdemokratisk stjórn komin til í apríl 1924, og sostatt vóru nýggir ráðharrar komnir til. Tað næsta sum sæst henda í skjalasavnsmálinum var, at Jóannes Patursson, løgtingslimur, skrivar til C.V. Bramsnæs, sum júst var vorðin fíggjarmálaráðharri. Hann skrivaði, at hann ikki kendi nýggja undirvísingarmálaráðharran persónliga[12]. Sum tað skilst á brævinum, so kendust Bramsnæs og hann frá fyrr av, tá ið teir høvdu sitið í „Færøkommissionen" saman. Bramsnæs læt Justitsministeriet brævið og avrit av tí til Undervisningsministeriet. Brævið sæst eisini at hava verið hjá amtmanninum í Føroyum til ummælis sum skundmál. Jóannes Patursson segði, at hann hevði frætt, at øll skjøl í Føroyum eldri enn 1865 skuldu sendast niður. Hann hevði so verið hjá amtmanninum, og har hevði hann eisini fingið hetta váttað. Hann vísti á, at løgtingið hevði viðgjørt málið, og at har var áhugi fyri, at skjølini skulu vera í Føroyum og flytast til eitt skjalasavn her. Hann hevði eisini spurt amtmannin, um hann ætlaði at kunna løgtingið um hetta, men tað svaraði amtmaðurin nei til. Hann ætlaði at gera, sum hann hevði fingið boð um og at senda skjølini niður skjótast til bar. Tá ið Jóannes Patursson, eftir at hava tosað við amtmannin í drúgva tíð, vísti á, at føroyingar fóru at verða misnøgdir við hetta, og at hann ætlaði at skriva til stjórnina um hetta, hevði amtmaðurin sagt, at so vildi hann bíða eftir nærri boðum.

Víðari skrivaði Jóannes Patursson, at hann í 1907 hevði sett seg ímóti, at lutir vóru fluttir úr Kirkjubø til København, og tá hevði hansara mótmæli ført við sær, at málið var stegðað.

At enda skrivar hann: *Jeg har ingen interesse af at begynde en lignende strid igen i anledning [af] arkivsagerne, men bliver det nødvendigt, viger jeg ikke tilbage derfor, dette sidste maa De ikke paa nogen maade opfatte som trudsel, men jeg meddeler kun, hvad der vil ske, hvis sagerne bortføres. Vi har desværre altfor mange arkiv- og museumsager i København som burde havt sin rette plads her.*[13]

Áðrenn embætisverkið náddi at svara skrivinum frá Jóannesi Patursson aftur, kom ein grein í norsku avísini „Tidens Tegn" 5.

mai 1924 við yvirskriftini: *De færøiske arkivsaker, som danskerne brændte*. I greinini, sum hevur Tingakross sum keldu, stendur, at tað hevur vakt forargilsi millum tjóðskaparsinnað, at stjórnin hevur givið amtmanninum boð um at senda skjøl til Keypmannahavnar. Í greinini varð føroyska skjalasavnsmálið samanborið við norska kravið um at fáa skjøl úr Danmark frá tí tíðini, tá ið Noreg og Danmark vóru saman. Eisini stóð í greinini, at týdningarmiklir partar av savninum hjá Einahandlinum, sum vóru í Keypmannhavn, vóru brendir. Fáar dagar seinni[14] var málið aftur umrøtt í avísini. Víst var til grein, sum stóð í Berlingske Tidende, sum hevði biðið danska ríkisskjalavørðin um viðmerkingar til greinina í Tidens Tegn. Ríkisskjalavørðurin segði her, at tað vóru føroyingar sjálvir, sum í síni tíð ynsktu at deponera hetta savn í Danmark. Um pástandin um, at skjølini vóru brend, segði hann, at tað var rætt, at partar av skjølunum vóru fyribeind, men at hetta vóru skjøl, sum ikki høvdu stóran týdning. Annars metti hann, at føroyingar sjálvir áttu at varðveita síni skjøl í Føroyum, um teir vóru ímóti at senda skjøl til Danmarkar.

Í tingsetuni 1924 kom skjalasavnsmálið aftur fyri løgtingið. Nú varð tað beinleiðis knýtt at bókasavnsbyggingini. Eftir at málið hevði verið í fíggjarnevndini (bugdetudvalget, sum hon tá kallaðist), samtykti løgtingið einmælt:

1 Málið verður útsett til komandi ár.
2 Ein nevnd við 3 limum, sum saman við amtmanninum, nevndini fyri Færø Amts Bibliotek og nevndini fyri Færøernes Museum, fær til vegar ætlanir og fíggjarætlan til ein hóskandi bygning, sum Færø Amts Bibliotek, embætissøvnini og Færøernes Museum, og eisini syrgir fyri, at eitt hóskandi grundstykki fæst á Debesartrøð.
3 Biðið verður um, at tær umhugsaðu flytingarnar av skjølunum frá embætunum verða steðgaðar, av tí at hóskandi bygningur skjótt verður tøkur.

Amtmaðurin boðaði Justitsministeriet frá, hvat løgtingið hevði samtykt í skrivi 17. sept. 1924. Hesa ferð tyktist hann vera samdur við løgtingið í, hvat skuldi gerast við skjølini. Í fylgiskrivinum stóð í hvussu er, at hann eisini metti, at ætlaði flutningurin av skjølum skal

steðgast. Ætlanin um at flyta elstu skjølini á skjalasavn í Danmark verður endaliga stegðað í skrivi, sum er undirskrivað 24. oktober 1924 av undirvísingarministaranum.

Sum omanfyri sagt, so var um sama mundið blaðskriving um skjølini. Ikki bert í Noregi, men eisini Berlingske Tidende í Danmark og Dimmalætting í Føroyum. Í stuttum snýr blaðskrivingin seg um, at føroysk skjøl skulu sendast til Danmarkar, og nú er fryktandi fyri, at sama fer at henda við teimum, sum er hent við skjølunum hjá Einahandlinum, sum í 1889 vóru send niður, at tey fóru at verða brend.

Politiska skipanin í Danmark biður um frágreiðing frá embætisverkinum um hetta. Ríkisskjalavørðurin segði frá, at tað er rætt, at skjøl hjá Einahandlinum eru burturbeind, men hetta var gjørt eftir somu reglum, sum gjørt verður við onnur skjøl í Danmark. Við Berlingske Tidende segði hann enntá, at skjøl vórðu send úr Føroyum fyri at bjarga teimum frá undirgangi.

Amtmaðurin sendi eisini frágreiðing til Justitsministeriet um málið. Her var tað serliga skrivið, sum Jóannes Patursson hevði skrivað til Bramsnæs, hann ger viðmerkingar til. Hann heldur, at Jóannes Patursson hevði misskilt seg. Hann hevði longu tá kunnað løgtingið um avgerðina um at flyta skjøl til Danmarkar. Annars vísti hann á, at Jóannes Patursson longu árið fyri hevði umrøtt málið um skjølini hjá Einahandlinum á tingi.

## Skjalasavn í Føroyum

Løgtingið samtykti í tingsetuni í 1924 at byggja nýggjan bókasavnsbygning á Debesartrøð, har, umframt bókasavn, eisini var pláss fyri fornminnissavni og skjalasavni. Harafturat samtykti løgtingið at biðja um, at ætlaðu flytingarnar av skjølum vórðu stegðaðar, av tí at nú vóru ætlanir at byggja skjalasavn.

Amtmaðurin boðaði Justitsministeriet frá løgtingssamtyktini í september og endar brævið:

*Det vil herefter formentlig være inopportunt at lade Nedsendelsen finde Sted, saaledes som i Ministeriets Skrivelse af 14. april d. A. foreskrevet, og man skal derfor tillade sig at indstille, at man bemyndiges til at stille Sagen i Bero.*

Her sæst sostatt, at amtmaðurin heldur, at rættast var at eftirlíka føroyingum og lata skjølini verða verandi í Føroyum. Hetta tilmæli




*H.C.W. Tórgarð, arkitektur, teknaði bygningin til søvnini á Debesartrøð. Hetta er eitt uppskot hansara frá 1926. (Undervisningsministeriet. 2. dep. 1. kontors journalsag 2373/1929).*

hjá amtmanninum fer so víðari í skipanini, og 24. november 1924 koma boðini frá Undervisningsministeriet um hetta.

Endin á málinum verður so, at ríkisstjórnin tók undir við, at ein bygningur varð bygdur til bókasavn, skjalasavn og fornminnissavn á Debesartrøð. Í 1926 boðaði Undirvisningsministereriet Justitsministeriet frá, at tað vildi søkja um pening til bygging av savnshúsum í fíggjarárinum 1927/28, og amtmaðurin boðaði Justitsministeriet frá, at staðið, funnið var fram til, var á Debesartrøð, har heimabeitið hjá neytunum á amtmansgarðinum nú var.

Ongin peningur var tó játtaður á hesum sinni. Ikki fyrr enn í 1928 var málið endaliga samtykt, og 1. juli 1932 tók stovnurin, sum í fyrstu siftu kom at eita Færø Amts Arkiv, ímóti skjølum.

Málið byrjaði við løgtingssamtyktini í 1920 og endaði við, at Føroyar fingu egið skjalasavn í 1932. Spurningurin er so, hvat ið var avgerandi fyri, at málið endaði soleiðis. Tað vóru nógvir ymiskir aktørar uppi í málinum. Tann føroyska politiska skipanin, sum løgtingið umboðaði, var at kalla samd alla vegin um at varðveita skjølini í Føroyum. Tað gjørdi ið hvussu er tað, at málið ikki í so stóran mun varð ein spurningur ímillum sjálvstýris- og sambandsvongin, sum onnur mál ofta vórðu. Soleiðis stóð tann politiska skipanin í Danmark yvir fyri einum samdum Føroyum í hesum máli.

Tá ið málið fekk eina avgerandi vend, og flytingin av skjølum til Danmarkar varð steðgað, og avgjørt var at byggja skjalasavn í Føroyum, hevði Danmark fyri fyrstu ferð fingið eina sosialdemokratiska stjórn. Hetta kann hava havt týdning fyri gongdina.

Ein annar aktørur er embætisverkið í Føroyum. Embætismenninir í Føroyum høvdu vanliga embæti í nøkur ár fyri síðan at fara víðari á yrkisleið síni. Tí kann tað hava havt týdning, hvussu leingi teir hava verið í Føroyum, og soleiðis eisini hvussu væl teir vóru inni í viðurskiftunum í Føroyum. Amtmaðurin Olrik var nýliga komin til Føroyar í 1920, tá ið málið byrjaði. Sorinskrivarin Heise var ikki heilt nýggjur í 1920 – hann kom í 1918 – men hann viðgongur í tilmæli sínum frá 1923, at hann hevði sett seg betur inn í viðurskiftini, enn tá ið hann svaraði fyrstu ferð í 1920.

Tann fakligi parturin í málinum var danska skjalasavnsverkið. Á ein hátt kann sigast, at tað bert tók fakligt atlit til málið. Skjølini skuldu goymast undir tryggum viðurskiftum og viðgerast av fakfólki. Av tí at ongar tryggar goymslur vóru í Føroyum, var best at flyta skjølini til donsk skjalasøvn. Í 1924 var tó nýggjur landsskjalavørður settur á Landsarkivet for Sjælland, og hann tók eisini atlit til, hvør ið kundi hugsast at brúka skjølini í Føroyum, og tí metti hann tað vera best at gera tað møguligt at varðveita skjølini í Føroyum.

Í hesi tíð var ikki alment innlit í fyrisitingini, so ilt er at vita, hvørjar upplýsingar tey fólk, sum hava leiklut í málinum, hava havt, og um hvør tosaði saman og ávirkaði hvønn. Í øllum førum varð avleiðingin, at ætlanirnar um at flyta skjøl til skjalasøvn í Danmark var steðgað.

Nú var so komið so langt, at avgjørt var at byggja skjalasavn, men enn var langt á mál.

Tað gekk eitt sindur striltið at fáa útvegað pening. Ikki fyrr enn

í 1928 var peningur játtaður frá statinum, meðan hin parturin av peninginum kom úr Føroyum. Andras Samuelsen, sum tá var fólkatingslimur, hevði eisini verið uppií og skrivað til fíggjarnevndina hjá fólkatinginum um, hvussu restin av fíggingini skuldi fáast.[15] Sum treyt fyri stuðli sínum legði staturin eisini sum treyt, at leiga ikki skuldi gjaldast fyri at goyma embætisskjølini. Í tingsetuni í 1928 var uppskotið um stuðul til bygging av Føroya landsbókasavni, har hølir eisini vóru til embætisskjøl og Føroya forngripagoymslu, frá 1925 lagt fram aftur og samtykt.[16]

Løgtingið játtaði í 1928 [17] pening til fólk at skráseta skjøl um Føroyar á donskum skjalasøvnum. Anton Degn, sum í 1932 varð settur í starv sum landsskjalavørður, fór longu í apríl 1926 til Danmarkar at kunna seg um skjalasavnsarbeiðið. Undervisningsministeret fíggjaði hetta, og í 1928 søkir Degn løgtingið um stuðul til eisini at skráseta skjøl. Degn fekk stuðul til at vera í Danmark í tilsamans 6 ár. Meðan hann var í Danmark, skrivaði hann bøkur sínar um Monopolhandilin og Færøske Kongsbønder við grundarlagi í skjalarannsóknum sínum í Danmark. Til hetta fekk hann eisini stuðul frá Carlsbergfonden. Myndugleikarnir syrgdu sostatt fyri, at skikkað fólk var til at røkja ta uppgávuna, sum lá fyri framman.

## Skipanin av skjalasavninum

Løgtingið samtykti í 1931 endaliga, at partar av bókasavnsbygninginum skuldi brúkast til skjalasavn. Í álitinum, sum var sent donsku myndugleikunum, vóru ymiskir møguleikar nevndir fyri, hvussu skjalasavnið formliga skuldi skipast. Løgtingið mælti til, at tað varð skipað sum eitt statsligt skjalasavn á sama hátt sum landsskjalasøvnini í Danmark og fíggjað av statinum. Tó skuldi tað til eina og hvørja tíð kunna yvirtakast av løgtinginum. Amtmaðurin viðmælti hesi skipan eins og ríkisskjalavørðurin, sum eisini varð spurdur. Hesa skipan dámdi ikki donsku myndugleikunum, men teir vildu í staðin fyri hava skjalasavnið skipað sum eina deild av bókasavninum. Hetta uppskotið tók løgtingið til eftirtektar, og raksturin av skjalasavninum varð fíggjaður bæði úr Føroyum og Danmark.[18]

Hendan skipan helt fram til 1952, tá ið stovnurin varð yvirtikin sum føroyskur stovnur saman við Landsbókasavninum. Hetta var tó bert ein rammulóg, sum segði, at almenn skjøl skuldu latast Landsskjalasavninum.

Tað sæst av brævaskiftinum ímillum Undervisningsministeriet og Rigsarkivet, at danska arkivverkið ikki var nøgt við hesa loysnina. Av tí at bæði føroyskur og danskur peningur fíggjaði skjalasavnið, var ógreitt, hvørjar reglur vóru galdandi fyri avhending og atgeingið til almennu skjølini. Fleiri ár eftir at skjalasavnið varð sett á stovn í Føroyum, royndi ríkisskjalavørðurin at fáa donsku myndugleikarnar til einsamallir at fíggja stovnin.[19] Á tann hátt var ongin ivi um, hvør hevði eftirlitið, og hvørjar reglur skuldu galda, og sum ríkisskjalavørðurin leggur dent á, so var talan jú um skjøl frá ríkisstovnum í Føroyum. Hóast hetta hendi ikki meiri í hesum málinum, og tað sýnist, sum at tey antin ikki tordu ella vildu gera meir við málið. Øll árini virkaði Landsskjalasavnið sum skjalasavn fyri ríkisstovnarnar og landsstovnarnar í Føroyum. Ikki fyrr enn í 1990 varð formlig avtala gjørd um skjøl hjá ríkisstovnum í Føroyum. Tá gjørdu landsstýrið og danska forsætismálaráðið avtalu um, at skjøl hjá ríkisstovnum í Føroyum, við undantaki av hernaðarskjølum, skuldu latast Landsskjalasavninum, og at landsskjalavørðurin hevði eftirlit við teimum, men at somu reglur, sum eru galdandi fyri tilsvarandi skjøl í Danmark, skulu verða galdandi fyri tey. Ein treyt fyri avtaluni var tó, at Føroyar fáa tilsvarandi skjalasavnslóggávu sum í Danmark. Henda lóg kom í 1992, tá ið løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn varð sett í gildi.

**Einahandilssavnið**

Skjølini hjá Einahandlinum, sum vóru flutt til Rigsarkivet í 1889, vóru ofta umrødd í sambandi við sjálvt málið um at fáa føroyskt skjalasavn. Tá ið savnið kom til Danmarkar, vóru umleið 460 protokollir og umleið 45 pakkar við skjølum burturbeindar[20]. Hetta var m.a. kassajournalir, pakkhúsbøkur og kladdir til brøv. Tað varð gjørt eftir teimum grundreglum, sum danska skjalasavnsverkið arbeiddi eftir tá. Ríkisskjalavørðurin viðgongur, at tilfar, sum kundi havt áhuga fyri føroyska søgu, var fyribeint. Hetta var gjørt eftir somu reglum, sum galdandi vóru fyri allar landslutir í Danmark, tí tað var ógjørligt at varðveita øll tey skjøl, sum umsitingin framleiddi. Síðan Landsskjalasavnið varð sett á stovn, hevur ynski av og á verið sett fram um at fáa savnið hjá Einahandlinum aftur til Føroyar. Hetta ynski varð uppfylt í sambandi við, at Landsskjalasavnið hátíðarhelt sín 75 ára dag í august 2007. Tá komu fyrstu protokollirnar aftur

til Føroyar, og ætlanin er, at tað, sum er eftir í Danmark, skal koma aftur so hvørt sum skjølini eru talgild í Danmark, soleiðis at høvi er at granska í teimum bæði í Føroyum og Danmark.

**Heimildir:**

*Prentað tilfar:*

Løgtingstíðindi ymisk ár.

Andreasen, Anja: Hølisumstøður Løgtingsins. *Løgtingið 150 II.* Tórshavn 2002.

Degn, A: Føroya Lands Skjalasavn. *Fortid og Nutid*. B.10. Kbh. 1933-34.

*Óprentað tilfar:*

Rigsarkivet, København:

Justitsministeriet, 1. Afdeling, 2. kontor: Færøjournalsager 1920 XV nr. 206.

Justitsministeriet, 1. Afdeling, 2. kontor: Færøjournalsager 1932 XIX nr. 414.

Undervisningsministeriet, 2. dept, 1. kontor, journalsager 1921/249 (tilakteret 1938/2248).

Undervisningsministeriet, 2. dep., 1. kontor. Journalsag 1929/2373 (tilakteret journalsag 1938/2248).

Undervisningsministeriet, 2. dep., 1. kontor. Journalsag 1934/1900 (tilakteret journalsag 1938/2248).

Landsskjalasavnið, Tórshavn:

Færø Amt: Arkivsagen.

## Notur

1 Løgtingstíðindi 1905, s. 81 ff.

3 Ibid.

4 RA: Justitsministeriet, 1. Afdeling, 2. kontor: Færøjournalsager 1920 XV nr. 206 (Arkivsagen).

5 RA: Undervisningministeriet, 2. dept, 1. kontor, journalsager 1921/249 (tilakteret 1938/2248).

6 Ibid.

7 Landsskjalasøvnini í Danmark vóru sett á stovn í 1889. Tó kom savnið fyri Suðurjylland í 1931.

8 RA: Justitsministeriet, 1. Afdeling, 2. kontor: Færøjournalsager 1920 XV nr. 206 (Arkivsagen).

9 Løgtingstíðindi 1922, s. 171-172

10 RA: Undervisningsministeriet, 2. departement, 1. kontor, journalsag 249/ 1921.

11 Ibid.

12 Hetta var Nina Bang, fyrsta kvinna, sum varð ministari í Danmark.
13 Ibid.
14 Tidens Tegn. 6. mai 1924.
15 Ibid.
16 Løgtingstíðindi 1928, s. 30.
17 Løgtingstíðindi 1928, s. 36.
18 RA: Undervisningsministreriet, 2. dep., 1. kontor. Journalsag 1929/2373 (tilakteret journalsag 1938/2248).
19 RA: Undervisningsministeriet, 2. dep., 1. kontor. Journalsag 1934/1900 (tilakteret journalsag 1938/2248).
20 LSS: Færø Amt: Arkivsagen. Skriv frá Rigsarkivet 23. okt. 1923.

Um høvundin:
*Lena Nolsøe*
Cand. phil í søgu. Savnvørður á Landsskjalasavninum.

*Hans Andreas Dam Joensen*

# Kongligi einahandilin

## – meira enn ein handil

*Handilslívið í árunum 1709-1856 skilti seg á mangan hátt frá tí hugburði til handil, sum liberalistiski politikkurin seinni hevði við sær. Her skal verða nomið við ymsar tættir í gerandisdegnum hjá handlinum, ið snúgva seg um skyldur handilsins, sosial fyrilit og hvørja ávirkan handilsleiðslan hevði á samfelagið sum heild ta hálvaaðru øldini, henda handilsskipan var virkin í Føroyum.*

Tá vit samanbera handil í dagsins vælferðarsamfelagi við handilslívið í 18. og 19. øld, er í hvussu so er **ein** grundleggjandi og ásjónligur munur. Í dag er øgrynnan av vørum so stór, at handilsvinnan hevur úr at gera at selja okkum ymiskt, sum vit ikki ánaðu, at vit høvdu brúk fyri. Við støðugt størri keypiorku og øktari frítíð víðkast marknaðurin enn meira. Hvat t.d. við einum uri, sum er vatntætt niður á 100 metra dýpi, um tað skuldi hent, at vit sukku so djúpt? Ella einum bili, sum kann fara frá 0-100 km/t upp á 7 sekund, um vit eru farin heimanífrá í seinna lagi?

Í gamla bóndasamfelagnum vóru fólk púra greið yvir, hvat teimum tørvaði, men tað var ikki so lætt at fáa fatur í tí. Talan var um eitt samfelag, har keypiorkan var sera avmarkað, ja, avmarkað til tað, sum fekst burtur úr bø og haga, og so eitt sindur av útróðri afturat. Øll tey, ið lisið hava skaldsøguna *Barbaru* eftir Jørgen-Frantz Jacobsen, munnu minnast byrjanina, har menn standa inni í handlinum í Havn og fordríva tíðina ein uppiløgudag.

Tað er týðiligt, at tað er ikki so lætt at fáa vørur, um tú skyldar ov nógv. Krambakallurin skeitir í kontrabókina og kannar fyrst, hvussu stór skuldin nú er vorðin, áðrenn fólk fáa nakað við sær heim til hús. Vit kunnu tí hugsa okkum, hvussu støðan man hava verið hjá Jens Christiani Svabo, tá hann 8. juli 1804 økti um ta frammanundan stóru skuldina hjá sær við at keypa *brennivín, sviskur og tubbak* – soleiðis sum vit síggja á framsýndu kontrabókini, sum nú er komin í føroyska varðveitslu.

Handilsvørurnar nøktaðu fyri tað mesta minstukrøvini til at yvirliva – fínar galantarívørur, sum krambakallurin Gabriel í skaldsøguni royndi at lokka Barbaru og vinkonuna Súsonnu Harme við, hoyrdu ikki til gerandisdagin hjá teimum flestu.

Tey skjøl, sum nú eru komin í føroyska varðveitslu, og sum annars hava livað sítt lutfalsliga stilla lív á Ríkisskjalasavninum í Keypmannahavn – soleiðis sóu tey í hvussu so er út, tá eg sat við teimum í míni lestrartíð – snúgva seg um eitt drúgvt og sera áhugavert tíðarskeið í Føroya søgu – ta hálvaaðru øldina, tá ríkismyndugleikin í Danmark eisini stóð fyri handilslívinum í Føroyum og sum eisini setti ávísar reglur fyri tí. Hesi skjøl fara at ríka enn meira um Landsskjalasavnið og tann mentanararvin, sum savnið umsitur – og vónandi fara tey at gera stórt gagn fyri søguligar rannsóknir, nú tey eru meira atkomilig fyri okkum her heima.

Tey eru ein umfatandi kelda til gransking í einum tíðarskeiði, tá tann feudala samfelagsskipanin ásetti rásarúmið hjá hvørjum einstøkum menniskja her á landi. Tey eru vorðin til sum partur av umsitingini av einum handli, men tey siga eisini samstundis nógv um samfelagið sum heild, har handilin var virkin – júst tí, at handilin fevndi um meira og annað enn tað, sum handilsskapur snýr seg um í dag.

Hugsað verður her serliga um, at handilin hevði **skyldu** at taka ímóti teimum vørum, sum vóru latnar inn til handilin til ein prís, sum fyrst var óbroyttur í eina hálva øld, og sum síðan so spakuliga varð dagførdur. Hetta samstundis sum at ávísar vørur skuldu innflytast í rímiligari nøgd til fastar prísir – hóast prísbroytingarnar úti á europeiska marknaðinum kundu vera stórar.

## Samfelagið seint í 18. øld

Vit kunnu beinanvegin staðfesta, at aftan fyri hetta slag av handils-



D. Hr. Jens Christian Svaboe Cr

| 1804 | | | Rbd | S | 1804 | | | Rbd | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Apr. | 1. | Skyldig | 118 | 94 | Juni | 19. | Af Rente Cammeret tilstaaet Understøttelse | 20 | - |
| Mai | 29. | 1½ Pot dbrd [dansk Brændevin] ½ bog fiin Papier | | 74 | | | | | |
| | | ½ p. Hg tob [Halvgul Tobak] ½ P. gr. Sukker 18 s. Cont. 8 rd. 46 s. | 8 | 82 | | | | | |
| Juni | 2. | ½ skp. Byg, 2 Potter dbrd Contant 13 rd. | 5 | 64 | | | | | |
| | 9. | 1 Pot dbrd, 1 P. Svedsker, 12 rd. 1 Pot dbrd | | 67 | | | Skyldig | 118 | 94 |
| | | ½ P. Hg. tob 1 p. Svedsker Contant 1 rd. 24 s | 1 | 53 | | | | | |
| | 19. | ½ P. Kaffe, 1 Pot Vin, 1 Pot dbrd Cont. 1 rd. 58 s. | 2 | 44 | | | | | |
| | | Summ | 138 | 94 | | | Summa | 138 | 94 |
| 1805 | | Ditto | | | 1805 | | Ditto | | |
| April | 1. | Skyldig | 138 | 94 | | | | | |
| | | Junii 22de samme Skyld | | | | | | | |
| Julii | 8. | Contant 10 rd. 12te. Contant 2 rd. Hovedkassen | 12 | | | | Efter den Administrerende Directionsskrivelse af 28de Maii d.a. eftergives modstaaende Skyld 118 rd 94 s hvorfore her Crediteres | 118 | 94 |
| | 16. | 1 P. Svedsker 1 Pot dbrd ½ P. Hg tob Cont. 1 rd. 39 s. Do. | 2 | | | | Af Rente Cammeret er denne tilstaaet Understøttelse | 20 | - |
| | 24. | Contant mod Beviis 6 rd. | 6 | | | | | | |
| | | Summa | 138 | 94 | | | Summa | 138 | 94 |

*Kontan hjá Jens Chr. Svabo í Kgl. handlinum 1804-05. (Hovedbog Thorshavn 1802-1805. Den administrende direktion for den kgl. færøske handel. Landsskjalasavnið).*

virksemi lá ein heilt annar hugburður enn tann, sum eyðkendi liberalismuna seinni í 19. øld. Hesin hugburður bar brá av, at kongur sum **landsfaðir** (og sum einaveldiskongur aftan á 1660) skuldi síggja til, at teir ymsu stættirnir í samfelagnum kundu liva í sátt og semju við hvønn annan, og at grundleggjandi livikorini vóru tryggjað.

Kongur var fasta snúningsásin í samfelagnum, og í hvussu so er eftir hansara sjálvsfatan merkti hetta, at hann hevði eina serliga ábyrgd av, at øll fólk kendu seg sum part av samfelagnum – ikki sum javnlíkar, sjálvandi, men við at grundleggjandi tørvurin varð nøktaður hjá øllum.

Hetta er partur av svarinum, tá spurt verður, hví handilin beinleiðis kom undir kong í 1709. Gablatíðin (1662-1709) er jú vorðin kend sum tíðarskeiðið, tá Gabelsættin hevði Føroyar í len, og tá hungur og hall ráddi til tíðir. Hóast føroyingar kærdu sína neyð, gekk long tíð, áðrenn kærurnar komu fram til kong. Tá Frederik von Gabel doyði í 1708, varð lenið tó tikið frá Gablunum. Sum tað so ofta er staðfest, ber illa til at geva Gablunum alla skyldina fyri vána standin í Føroyum, tí trupult kundi vera at fáa vøru fram í hesum tíðarskeiði, sum fyri ein part var merkt av kríggi og ófriði í Europa.

Tá meginfyrisitingin í Keypmannahavn tók føroyska handilin upp á seg, var hetta helst ein neyðloysn, til eitt av tátíðarinnar handilsfeløgunum („kompagníum“) møguliga kundi taka yvir. Handilsfeløgini fingu einarætt til handilin í einum ávísum øki – eitt nú í India ella í Afrika, men londini í Norðuratlantshøvum, Ísland, Grønland, Føroyar og Norðurnoreg, høvdu ikki sama áhuga millum keypmenn um hetta mundið. Roynt var at forpakta handilin burtur bæði í 1721, 1723 og 1724, men uttan úrslit – sjálvt um ullarprísurin var settur nakað niður í 1723, tí ullin var serliga tapsgevandi. Eftir hetta lá prísurin fastur heilt fram til 1791.

So hvørt sum 18. øld leið, vant tøtingin upp á seg – frá 34.700 pørum í 1729 til 138.000 í 1768. Hetta seinna talið helt sær upp um aldaskiftið, sum vent verður aftur til seinni.

Hetta, at ein tryggur marknaður var fyri hosunum í so drúgva tíð, hevði við sær, at fólkatalið vaks so líðandi, men hetta hevði samstundis við sær, at tørvurin á innflutta korninum vaks enn meira. Fyri handilin, sum jú mátti keypa kornið til marknaðartreytir í Danmark, kundi hetta til tíðir hava munandi tap við sær.

Um vit annars samanbera støðuna í Danmark og í Føroyum í 18.

øld, er eisini vert at leggja til merkis, at fyri tey fátæku í Føroyum fanst ikki nøkur serlig skipan sum í Danmark. Arbeiðsanstaltir, har tey fátæku vóru sett inn, hava ongantíð verið her á landi. Fátækrakassin, sum varð settur á stovn í 1768, hevði ikki pening at endurrinda handlinum tað, sum hann útflýggjaði fólki, sum ikki høvdu vørur at lata fyri tað, ið tey keyptu. Millum lítið og onki var gjørt fyri at innheinta hesa skuld, soleiðis sum vanligt var aðrastaðni.

Tann tryggleiki, sum handilin stóð fyri, sampakkar eisini væl við tey ynski, sum Føroya løgmaður, Hanus Jákupsson Debes, hevði til handilin, tá hann í 1764 ávaraði ímóti príshækkingum, ið hann væntaði fóru at skapa ófrið millum manna. Hann mundi hava grein í sínum máli, tá havt verður í huga, hvussu stórur partur av inntøkuni hjá teimum flestu, ið fór til matvørur.

Mong dømi eru um, at tá kornprísurin fór upp, hevði hetta ófrið við sær millum øll tey, sum skuldu keypa sær dagliga breyðið. Matvørurnar stóðu vanliga fyri nógv tí størsta partinum av útreiðslunum hjá fólki flestum.

Í 1791 var tó neyðugt at hækka prísirnar á innfluttu vørunum, tí at ófriðurin í Europa gjørdi, at marknaðarprísirnir fóru sera nógv upp. Hetta var gjørt varisliga og mótvigað við, at føroysku vørurnar eisini fingu ein heldur betri prís.

## Føroyski útflutningurin

Av tí, sum útflutt var, vóru ullarvørur nógv tann størsti bólkurin, serliga hosurnar. Harafturat kom nakað av tálg. Summi ár var fitt av fiski útflutt, og onkur ár, tá nógvar grindir doyðu, kundi lýsið viga upp ímóti einum minni góðum seyðaári.

Fyri handilin var umráðandi, at dygdin á hosunum var í lagi, so vrakarin í handlinum mátti gera sítt arbeiði til lítar. Hinvegin kom ikki illa við hjá handlinum, um ein partur av hosunum var keyptur sum vrakhosur, tí á teimum kundi vinningurin ofta vera hampiliga góður á uppboðssøluni. Hóast hetta var onkuntíð ov lítið vrakað, tí kærur komu viðhvørt um dygdina frá keyparunum.

Ein minni partur av hosunum fór beinleiðis til danska herin fyri ein fastan prís, men størsti parturin var seldur til ymsar heilsølumenn í Keypmannahavn. Aftur ein annan part seldi handilin sjálvur til ein umboðsmann í Amsterdam. Tað kann undra, at handilin ikki brúkti

henda umboðsmannin meira og økti um sín vinning, og heldur læt donsku heilsølumenninar – sum brúktu sama umboðsmann – strúka av stað við honum.

Sum heild vóru prísirnir á uppboðssøluni sera skiftandi. Í 1790-árunum vóru teir lágir, og tá var gott at kunnu selja til fastan prís til danska herin. Umvend var støðan, tá marknaðarprísirnir vóru høgir. Sjálvt um prísirnir summi ár vóru so lágir, at selt varð við tapi, vísa skjølini, at handilin altíð góðtók boðini, heldur enn at leggja vøruna á goymslu og bíða, til prísirnir fóru upp aftur. Helst var orsøkin, at hosur ofta lógu leingi á goymslu í tíðarskeiðum fyrr í 18. øld, við tí úrsliti, at stórar rúgvur fóru fyri skeytið og máttu burturbeinast.

Afturat hosunum var nakað av troyggjum útflutt, men lutfalsliga góvu hosurnar betri inntøku, tá hugsað verður um, hvussu nógv minni, ið skuldi til av tógvi.

Loyvt var at útflyta troyggjurnar sum sonevnt *sendingsgods*. Tvs. at fólk sluppu at senda troyggjur fyri egna rokning at selja í Danmark, uttan um handilin. Sama var galdandi fyri fisk og lýsi. Serliga stóru bøndurnir sendu fitt av troyggjum til Keypmannahavnar, tá prísirnir á teimum fóru upp undir Napoleons-kríggjunum.

Tálgin var í øllum hesum tíðarskeiði útflutt í rættiliga støðugari nøgd, hóast skurðurin sjálvandi var skiftandi – uml. 250 tunnur um árið í 1790-árunum, og var sostatt 3. størsti vørubólkur.

Mongdin av fiski til útflutnings var sera ymisk frá einum ári til annað, og er hetta ein avleiðing av, at útróðurin við smáum bátum var so bundin at góðum veðurlíkindum, og at náttúran annars var lagalig. Talan var stórt sæð bara um turran fisk. Ikki fyrr enn aftan á 1790 var áhugi fyri saltaðum toski, tá prísurin fór upp, og útróðurin eisini gjørdist støðugari.

Stórar mongdir av lýsi vóru útfluttar summi ár, tá nógvar grindir vóru deyðar. Hetta var ein vøra, sum handilin eisini var glaður við at fáa, tí her var marknaðurin vanliga góður.

Eitt sindur av fuglafjøður kom frá plássum, sum eru kend fyri fuglaveiðu, men í heildarmyndini er hetta ikki nøkur týðandi vøra.

Samlaða útflutningsvirðið sveiggjaði nógv – eitt nú í 10-ára skeiðinum 1797-1806 – millum 20 tús. og 45 tús. ríkisdálar. Skurðurin var rættiliga skiftandi, og sami ótryggleikin gjørdi seg í enn størri mun galdandi fyri útróðurin og annað, ið havið gav.

Lítið var gjørt við at eggja føroyingum til at útflyta aðrar vørur.

Ikki fyrr enn leið ímóti endanum av 18. øld, komu ymisk hugskot fram um aðrar útflutningvørur, eitt nú kol og málm, æðudún og brendan tara. Hetta seinasta var tá í tíðini serliga nýtt til ymiskan heilivág.

Ein forsprákari fyri hesum var áðurnevndi Jens Christian Svabo í sínum tilmælum aftan á at hava ferðast í Føroyum í 1781 og 82, men hetta vann sum kunnugt onga undirtøku í síni samtíð. Hann var eins og Kvívíksprestur, Jørgen Landt, eitt barn av upplýsingartíðini, men fann ikki afturljóð í tí umhvørvi, hann kom at liva og virka í. Hann var saman við Nicolai Mohr fyrsti føroyingur, sum fór undir annan hægri lestur enn gudfrøði – hann las *náttúruvísindi*, og óivað hevur Jørgen-Frantz Jacobsen havt hann fyri eyga, tá hann skapti unga sorgleysa skaldsøgufigurin, Andreas Heyde, mannliga síðustykkið til Barbaru.

Handilin stuðlaði sostatt upp undir eitt sera einstáttað vinnumynstur í Føroyum upp gjøgnum 18. øld gjøgnum sína prísáseting. Hetta var sjálvsagt serliga til fyrimunar fyri tey, sum høvdu bestu atgongdina til ullina, ið varð virkað til hosur, men eisini fyri tey, sum so dánt kundu hóra undan við hesum vinnuvegi, umboðaði handilin tað trygga og støðuga. Og júst tað trygga og støðuga var av alstórum týdningi í einum landi, har sveiggini kundu vera stór millum ár við góðum skurði og fellisár. At so sjálv kongstignin var knýtt at handlinum, mundi ikki gera kensluna av, at hann stóð á tryggari grund, minni.

Eftirtíðin, við sínum fríhandli og nýggju vinnumøguleikum, leitaði út um bøgarðarnar, hevur ikki givið handlinum nakað serligt skotsmál, tí hann í roynd og veru hjálpti til at varðveita eina samfelagsskipan, og gjørdi føroyingar til eftirbátar í mun til grannatjóðirnar í síni samtíð. Tá talan er um onnur fyrilit, ið handilin hevði í mun til føroyska samfelagið, m.a. av sosialum slagi, sæst tó, at myndin er ikki so einføld.

## Føroyski innflutningurin

Kornið var sum nevnt altavgerandi innflutningsvøran. Eplavelturnar vóru ikki at síggja enn í Føroyum. Afturat føroyska korninum vóru vanliga einar 5000 tunnur av korni innfluttar hvørt ár, serliga bygg, men eisini innflutningurin av dýrari kornsløgum og grýni vaks munandi. Hetta hóvaði handilsleiðsluni illa, tí her var

innkeypsprísurin vanliga serliga høgur í mun til søluprísin. Tí var ofta roynt at skarva av vørulistanum úr Føroyum, tá talan var um hesi kornsløg, tí hildið var, at tey komu undir marglæti.

Aðrar neyðsynjarvørur vóru eitt nú salt, viður, nævur, annað byggitilfar, tjøra, veiðuamboð, lørift og hampur.

Tubbak var ikki mett sum marglætisvøra, og heldur ikki í serligan mun vanligt danskt brennivín. So skuldi talan vera um dýrari løg úr Fraklandi og Spaniu, sum serliga embætisstættin setti prís uppá. Og so kaffi og te.

### Tørvur

Á hvørjum heysti sendi handilsforvaltarin ein lista til Keypmannahavnar yvir vørur, sum skuldu sendast til Føroya komandi ár. Hesin listi var eyðvitað gjørdur út frá tí eftirspurningi, sum var. Men samstundis skrivaði hann eisini eina drúgva frágreiðing um støðuna í landinum – hvussu árið higartil hevði roynst og gjørdi eina meting av, hvør grundleggjandi tørvurin mundi fara at verða, serliga á korni.

Árini vístu seg at vera rættiliga skiftandi. Seyðurin kundi vera illa fyri, kornvøksturin vánaligur, og fáar grindir doyðu, ella várróðurin miseydnaðist. Onnur ár kundi alt laga seg nógv betur. Tað var so upp til handilsstjórnina at meta um, hvussu nógv var ráðiligt at senda til Føroya av vøru, so úrslitið hjá handlinum kundi gerast sum frægast.

Tá talan var um tubbak og brennivín, var ofta skorið í vørulistanum, men tá talan var um neyðsynjarvørur, mátti trygd vera fyri, at tær ikki fóru at tróta. Hetta vóru samstundis tær vørur, sum størstu tapini stóðust av, tá markaðarprísirnir í Europa vóru høgir.

### Keyp upp á borg

Soleiðis sum skipanin var bygd upp, vóru allir føroyingar viðskiftafólk hjá handlinum og eru bókførd sum so har. Hesar kontrabøkur vísa sostatt ein tvørskurð av øllum samfelagnum, høgum eins og lágum. Har var ein inntøkusíða og ein útreiðslusíða. Sostatt átti at verið lætt at staðfest, um javnvág var í roknskapinum, men trupult var at forða fyri, at fólk settu seg í skuld. Eitt var, at handilin ikki kundi sýta fyri, at fólk fingu neyðsynjarvøru innan fyri eitt rímiligt mark, men eisini fólk við góðum inntøkum settu seg í stóra skuld til handilin. Tey stóðu á einum serligum lista, og handilsleiðslan umrøddi hann av og á við handilsforvaltaran. Einstakir av hesum persónum fingu

við tíðini so stóra skuld, at teir ongan møguleika høvdu fyri at gjalda hana aftur.

Í § 11 í Fyriskipan frá 13. august 1790 var ásett, at tey fátæku í hvørji einstakari sókn skuldu venda sær til prestin ella sýslumannin, sum síðan gav teimum eina váttan fyri, at viðkomandi hevði tørv á matvøru. Henda váttan skuldi vísast fram í handlinum, sum so útflýggjaði vørur til lívsins uppihald. Handilin fekk ein part endurgoldnan, men illa skipaða samstarvið um hetta gjørdi, at tað ongantíð gjørdist heilt greitt, hvussu stóran part fátækrakassin skuldi rinda. Útreiðslan hjá handlinum av hesum viðskiftafólkum var í 1805 komin uppá 4.600 ríkisdálar.

Hetta er tó lítið av miklum, tá borið verður saman við skuldina hjá beiggja gamla handilsforvaltaran, fútan, sum um somu tíð skyldaði handlinum 2.500 ríkisdalar og skuldina hjá kirurginum Schnell, ið var 1.777 ríkisdalar. Um vit so siga, at árslønin hjá slíkum monnum lá um 100-200 ríkisdalar, slapst illa undan sanering her!

Vanlig viðskiftafólk kundu fáa helvtina av skuldini eftirgivna. Handilsforvaltarin vildi hava greitt at vita í 1802, um handilin hevði skyldu at lata fólki vøru, sum komu við fátækraváttan. Aftaná at hava umhugsað spurningin, svaraði leiðslan, at forvaltarin mátti vísa hóskandi fyrilit, tí tað mátti ikki verða sagt um handilin, at hann læt fólk svølta. Afturat hesum varð mælt til, at eitt greiðari býti kom millum handilin og fátækrakassan, so hesin seinni bar ein størri part av útreiðslunum. Sum frá leið var ætlað, at hvør sókn tók sær av sínum fátæku, so tey, sum sagt var, fingu hjálp „på den mindst besværlige måde".

Hetta setti krøv til handilsforvaltaran um innlit í føroyska samfelagið, og at hann hevði eyga fyri broytingarmøguleikum. Tó vóru ongar royndir gjørdar at skipa hjálpina til tey fátæku betri. Vaksandi fólkatalið hevur helst gjørt tað trupult fyri handilin at sameina fíggjarligu áhugamálini og politisku skyldirnar, sum vóru álagdar honum.

### Liberalistiska rákið

Eitt er, at tapini, sum stóðust av einahandlinum í Føroyum, noyddu leiðsluna fyri handilin at broyta prísirnar. Annað er, at liberalistiska hugsjónin fekk undirtøku so hvørt sum vinnulívið mentist hesa tíðina. Ein heilt nýggj samfelagsskipan varð knæsett við fronsku

kollveltingini, og meðan alt Europa varð skakað í sínum grundvølli, sótu menn niðri í Keypmannahavn og hugsaðu um, hvussu føroyski handilin kundi *einskiljast*, sum vit høvdu sagt í dag.

Íslendski handilin var tá longu farin á privatar hendur, og fleiri av kongsins monnum hildu, at sama loysn mátti til fyri føroyska handilin. Um hetta mundið vóru tað fleiri av fremstu handilsmonnunum í Keypmannahavn, sum eisini høvdu fingið almenn embæti. Í teirra hugaheimi var tað so sjálvsagt, at um føroyska samfelagið skuldi nútímansgerast og mennast vinnuliga, var neyðugt at laga handilsviðurskiftini til marknaðartreytirnar.

Sett var ein nevnd, sum skuldi koma við tilmæli, um nýggj handilsskipan skuldi setast á stovn, ella um haldast skuldi fram sum higartil. Í stuttum kann sigast, at eitt breitt ynski var um eina fríari skipan, men samstundis var ein ávísur ivi um, um privatir handilsmenn kundu tryggja sama støðuga vøruflutning, sum einahandilin hevði kunnað. Tað hevði ljóðað úr Íslandi, at fólk í summum økjum í Íslandi ikki vóru so fegin um fríhandilsskipanina, tí neyðsynjarvørurnar vóru dýrkaðar nógv.

Teir, sum vóru ryggurin í nevndararbeiðinum, vóru teir somu, sum høvdu staðið fyri avtøkuni av íslendska einahandlinum. Harafturat kom dagligi leiðarin av føroyska handlinum í Keypmannahavn, og úr Føroyum komu Hammershaimb, fúti, og Born, kommandantur. Sambært skjølunum hava umboðini úr Føroyum sitið ræattiliga kúrr á fundi. Teirra lutur var mest at koma við upplýsingum um praktisk viðurskifti. Tó fekk nevndin eisini skriv frá fólki úr Eysturoynni, sum mælti ímóti fríhandli. Hetta skriv hevur helst ávirkað nevndina, men var avgjørt ikki í samsvari við politiska veðurlagið um hetta mundið.

### Tilmæli um fríhandil 15. juni 1790

Niðurstøðan hjá nevndini var púra greið. Mælt varð til, at einahandilin var avtikin innan fimm ár, og at prísirnir skuldu broytast sum skjótast, og fríhandil har við varð fyrireikaður. Ávirkanin av íslendska fríhandlinum er rættiliga sjónsk, tí stórur partur av uppskotinum er beinleiðis skrivað av eftir íslendsku fyriskipanini.

Tað, sum nevndarlimirnir hildu vera neyðugt til at fyrireika føroyingar til fríhandil var fyri tað fyrsta: avmarkaðar møguleikar at keypa upp á borg, og at avskriva ein part av tí, sum fólk skyldaðu í handlinum.

Fyri tað næsta var hildið, at tøtingin skuldi fevna um eitt breiðari útboð av vørum, her í millum eisini fleiri ymisk sløg av hosum.

Fyri tað triðja helt nevndin, at gongd mátti fáast á kolagrevstur í Hvalba. Nakað var høgt árini frammanundan, men ringt var at fáa skipini at taka kol við sær til Danmarkar. Føroyingar sjálvir brendu jú ikki kol hesa tíðina.

Fyri tað fjórða varð hildið, at um økt varð um dyrkaða lendið og stuðul latin fyri at velta epli, slapst undan vaksandi talinum av fólki uttan jørð, sum forvaltarin hevði greitt frá í sínum frágreiðingum. Sum kunnugt hendi onki á hesum øki fyrr enn nakað inn í 19. øld. Sama var galdandi fyri eplini. Hóast setepli vóru innflutt, og handilin royndi at skunda uppundir, gjørdist tað ikki vanligt at seta epli niður fyrr enn í 1830-árunum.

Eitt fimta tilmæli snúði seg um at útvega betri landakort, so lættari var at finna fram til, hvar handlar kundu liggja kring landið. Trongisvágur verður nevndur í hesum sambandi, eins og onnur pláss, har fyrstu úthandlarnir komu seinni.

Eisini varð víst á, at lættari skuldi gerast hjá útlendingum at búseta seg í Føroyum, ið høvdu ætlanir um handilsligt virksemi.

At enda var nógv gjørt burtur úr tørvinum á skúlum. Ongir bygdaskúlar funnust – einans latínskúlin í Havn, men har var næmingatalið sera lágt. Ein fríhandil, har føroyingar høvdu ein virknan lut, varð hildin at fara at krevja útbúgvið fólk, og tí hildu menn, at latínskúlin skuldi broytast frá at vera ein fyrireikingarskúli fyri komandi prestar til at gerast ein meira *almennandi* skúli – ikki minst fyri at menna handil og handverk í landinum. Heldur ikki á hesum øki hendi nakað, og tískil varð latínskúlin niðurlagdur í 1804, tí at ongir næmingar gingu har.

Broytingarnar, sum vóru settar í verk sama ár, snúðu seg einans um príshækkingar, sum vóru roknaðar út frá einum miðaltali av innkeypsprísunum seinastu fimm árini og helvtini av flutningsgjøldunum og øðrum útreiðslum. Tó ásetti handilsleiðslan, at kornprísirnir skuldu liggja nakað lægri, enn hesar útrokningar annars høvdu givið heimild til.

Somuleiðis vóru prísirnir á føroysku útflutningsvørunum ásettir út frá uppboðssøluprísunum seinastu fimm árini, og har helvtin av flutningsútreiðslunum vóru drignar frá.

Lønirnar hjá embætismonnunum var hækkað við einum triðingi,

og hetta gjørdi, at teir høvdu meira at standa ímóti við enn fjøldin av føroyingum, tá broytingarnar eftir ætlan skuldu koma í gildi.

Við hesum broytingum var eitt stig tikið at laga handilin til altjóða marknaðin. Ætlanin var, at føroyingar skuldu fáa eina betri fatan av, hvørjar vørur, ið góvu vinning, og hvørjar nýggjar vørur, ið marknaður var fyri.

**Tillaging til marknaðarprís**

Broytingarnar merktust væl millum manna. Gerandisvøran bygg tvífaldaðist í prísi, og sostatt skuldu fleiri pør av hosum latast inn fyri at fáa sama prís sum fyrr. Handilin væntaði við hesum, at sølan av korni fór at minka, men so var ikki. Sølan helt seg nøkulunda á sama støði komandi árini.

Tey fimm árini gingu, uttan at vinnulívsmenn ella føroyingar sjálvir vístu áhuga fyri eini nýggjari handilsskipan. Tíðirnar á europeiska marknaðinum vóru sera ótryggar, nú kríggj valdaði. Kornið gjørdist sera dýrt, og hesum kundu føroysku ullvørurnar ikki fylgja við. Enn eina ferð sendu føroyingar bønarskriv um, at einahandilin helt fram. Gjørt varð tí av at halda fram við honum fyri fyrst.

Ætlanin var tó ikki slept fyrstu árini, men tá Danmark var drigið upp í kríggið í 1807, broyttist støðan. Nú var greitt, at broytingarnar máttu bíða, til búskapurin var komin í rættlag aftur. Afturat øðrum, sum sáddi iva manna millum, gjørdist tíðin drúgv, til einahandilin gavst í 1856.

**Niðurstøða**

Tá stjórin fyri handilin í 30 ár, Hans Leganger Wexelsen, gjørdi støðuna upp fyri tey fyrstu hundrað árini og væl tað, var niðurstøðan, at handilin hevði verið líka lítið gagnligur fyri menningina av føroyska samfelagnum sum fyri danska statskassan.

Rundan um okkum høvdu nýggir vinnuvegir ment seg, og nýggir marknaðir komu fram, men føroysku útflutningsvørurnar vóru stórt sæð tær somu gjøgnum alla 18. øld. Handilin royndi at nøkta ein tørv hjá einum samfelagi, sum vinnuliga stóð í stað. Hetta íhaldni var so mikið sterkt, at onkrar royndir, sum gjørdar vóru at gera nakað nýtt, til dømis fiskiskapurin við skipum hjá Ryberg, meðan upplagið hjá honum blómaði í Havn, fingu onga ávirkan her heima.

Eftir er so sosiali tryggleikin, sum handilin stóð fyri, við síni skyldu

at selja vørur til sera støðugar prísir og við sínum partvísa virki sum fátækrakassi. Hann vigaði tungt, tá aðrir handilsmøguleikar stóðu í boði.

Handilin og søguligi arvurin eftir hann hevur verið sjónligur síðani. Um vit at enda aftur rætta eyguni móti dagsins samfelagi – har broytingarførleikin kanska er mest umráðandi førleikin at ala fram – verður nú tosað um, at „vit skulu læra at tora", sum eitt embætisfólk málbar seg á eini forsíðu fyri stuttum.

Fortreytirnar fyri at tora í dag eru aðrar enn tær, sum vóru galdandi í 18. og 19. øld. Handilslívið í dag hevur ikki nakrar av teimum skyldum, sum handilinum hjá kongi vóru álagdar, til hann endaliga varð avtikin í 1856. Har hava aðrir stovnar tikið við.

Um høvundin:
*Hans Andreas Dam Joensen*
Cand. mag. Deildarleiðari í Sunda kommunu.

*Andras Sólstein*

# Kgl. einahandilin í Klaksvík 1837-1856

Søga einahandilsins byrjar kanska í veruleikanum heilt afturi í árunum 1271, við rættarbót Magnus Lógbøtara, har kongur gevur lyfti um at lata tvey hóskandi skip sigla ímillum Noreg og Føroyar um árið.[1] Eftir hetta eru tað gjøgnum tíðirnar næstan uttan undantak onnur enn føroyingar, ið skipa vøruflutning til Føroyar. Onkuntíð handilsfeløg ella einstaklingar og stundum kongur sjálvur. Allur vøruflutningurin varð uppskipaður í Havn, og har var so til 1836 einasti handilin í oyggjunum.

Hóast tað var álagt teimum, ið sótu við einkarættinum, at tryggja oyggjunum vøruflutning og goymslu, so var altíð eitt glopp í vøruútboðnum. Hetta glopp fyltu fremmandir menn, sum komu í loyndum við skipum sínum til Føroyar. Hesir loynikeypmenn høvdu, umframt vanligar vørur, eisini eitt størri útboð, serliga av marglætisvørum, og kundu lata ein annan prís enn handilin í Havn. Dømi er um, at í árinum 1658, meðan „Det Islandske Kompagni" umsat handilin til Føroyar, var loynihandilin so umfatandi, at íbúgvarnir í Suðuroy ikki ein gongd kendu prísirnar á vørunum við handilin í Havn.[2]

Í Norðuroyggjum hevur eisini verið loynihandil, og okkurt bendir á, at vágin í Klaksvík var nógv nýtt sum loynihavn. Umleið 1675-80 skrivar Resen um Borðoynna og nevnir beinleiðis, at staðið er ein handilsstaður. „Paa Øen er der og en berømt Kiøbmandshavn, som kaldes Klak".[3]

Kendasta dømi um loynihandil norðuri í Vági er um handilsmannin Fermus, og tá sýslumaðurin í Norðuroyggjum Guttormur í Gerðum misti garðin. Hendingin vísir, at loynihandil var vanligur, og teir, ið vóru uppií, vóru bæði verðsligir og andaligir menn. Fyrstu ferð, vit hoyra um Fermus, er í 1619, tá ið eitt skip hjá honum strandar í Hvannasundi. Fleiri ár seinri, í 1646, er hann í Føroyum og á Klaksvík saman við einum hálendskum loyniskipi, og tað er her málið um Guttorm í Gerðum tekur sína byrjan.

Í sakini um Guttorm síggja vit, at loynihandilsskip hava nýtt Klaksvíkina sum havn, og tey hava ligið har í meira enn tveir dagar. Vit síggja tvey tílík skip, annað hálendskt og hitt enskt. Hálendarin tykist at vera væl útgjørdur við einum serligum handilsmanni umborð, og Fermus var gamal kenningur.

Bæði menn úr Bø og eisini menn av Húsum vóru umborð, og tað bleiv kjakast um pengar. Einaferð sita Guttormur, Fermus og hálendarin inni í kahúttini og drekka. So kemur róp í, og teir fara til hendurs, og knívur verður eisini havdur á lofti. Seinri fara hálendarin og Guttormur í land og niðan í Gerðar. Endin á hesum stríði var, at teir endaðu í rættinum í Havn, og Guttormur var dømdur bæði frá sýslumansembætinum og teimum 20 ¼ mørkunum, hann sat við á Gerðagarði.[4]

Elsta uppskotið um handil í Norðuroyggjum hevur Christian von Gabel skrivað í 1723. Hann grundgevur soleiðis:

„Min Mening, efter den Erfaring jeg har om Landet udi de Tider, jeg har været der, er ellers denne, at der ikke bliver nogen Fordel ved Handelen, medmindre der i Stedet for den ene Krambod, som nu er midt i Landet i Thorshavn, blev desforuden indrettet tvende andre Kramboder, for om Vinterdage kan Suderøen og Norderøen umuligen komme til Kramboden formedelst den lange Vej og det farlige Farvand, og da tvinger Nøden Undersaatterne at handle med Lurendrejerne. Mens kom der 2de Kramboder til, saasom en paa Norderø og en paa Suderø, og der blev holdt Fartøjer i Landet, som kunde fiske, naar Tid var, og ellers forføre Varerne, vilde det meget hjælpe Indbyggerne og forhindre Lurendrejere.“[5]

Frá 1709 til 1856 yvirtók hin danska ríkisstjórnin sjálv handilin. Seinast í 1780árunum var ein nevnd sett at kanna handilsviðurskiftini í Føroyum. Úr Føroyum vóru nevndarumboðini W. Hammershaimb og C. L. U. Born kommandantur. Álitið, sum nevndin læt frá sær

til Keypmannahavnar í juni 1790, mælti til at avtaka einahandilin. Men mótstøðan hjá føroyingunum innanhýsis var eisini sjónlig, og eysturoyingar sendu mótmælisskriv og heittu staðiliga á myndugleikarnar um at fara frá hesi ætlan og mæltu heldur til framhald av einahandlinum.

„...hele Østerø staar som een mand og raadfører sig med hinanden at afbede fri handelen hos kongen, da vi fattige indbyggere ej kan vente andet end ulykke da at ramme os."[6]

Fleiri ár seinri, í sept. 1817, kom ein embætismannanevnd, sum Løbner amtmaður hevði sett at gera álit um handilin, til hesa greiðu niðurstøðu: „Færøerne ere ikke skikkede til og Indbyggerne ikke tiente med en friegivet Handel"[7].

Men umstøðurnar í londunum kring Føroyar og tíðarandin annars rak ímóti hesi niðurstøðu, og í tíðini eftir kom blot í.

Veturin 1835-36 var ein nevnd sett at arbeiða við støðuni í monopolhandlinum, og endamálið var at styrkja monopolhandilin og at fyrireika íbúgvarnar í Føroyum til fríhandil. Avgjørt varð at seta



*Jacob Nolsøe (1775-1869). Handilsforvaltari hjá kgl. einahandlinum. Jákup fyristóð byggingina og raksturin av øllum útihandlinum, harímillum Klaksvíkshandilin til 1856. (Norðoya Fornminnasavn).*

tríggjar deildir hjá einahandlinum á stovn. Fyrst á Tvøroyri í 1836, í Klaksvík í 1838 og á Fitjunum í Vestmanna 1839.

Tann, ið hevði ábyrgdina av byggingini av handilsdeildunum, var Jacob Nolsøe, handilsforvaltari í Havn.

**Handilin í Klaksvík**

Tá avgerðin um at byggja handil í Klaksvík varð tikin, bleiv næstan beinanvegin byrjað at handla her norðuri. Tað var Daniel Jacob Joensen, vanliga nevndur Dannebrogsmaðurin, ið stóð fyri hesum handilsátaki. Hvar handlað varð, er ikki uppspurt, møguliga í einum hálvlidnum skúri úti í Klaksvík, men okkurt neyst ella annað í Vági er eisini ein møguleiki. Undir øllum umstøðum var tað ikki nøkur haldgóð loysn, tí í januar í 1838 skrivar J. Nolsøe til Christian Pløyen amtmann, at fyrr enn bygningarnir eru lidnir, og handilshølini eru klár til at reka rættan handilsskap, sær hann seg



*Handilin úti í Klaksvík uml. 1895. Húsini til høgru vóru bygd í 1847 og fingu navnið Nýggja Pakkhús. Hini eldri frá 1837-38 vóru so kallað Gamla Pakkhús. Tey blivu samanbygd í 1896.*
*(Føroya Fornminnissavn).*

ikki føran fyri at avskipa vørur til Klaksvíkar, soleiðis sum gjørt varð summarið 1837.[8]

Úthandilin, sum bleiv bygdur norðuri í Vági í 1838, bleiv lagdur um ein kilometur frá býlinginum í Vági, við eina lítla vík undir Klakkinum, sum bleiv kallað Klakkavíkin ella Klaksvík. Handilin fekk navnið Etablissement Klaksvig.

Handilin fekk trøð burtur av Vágshaga, og í 1837 varð farið í gongd við at slætta lendið, gera tað byggibúgvið og at fyrireika húsabyggingina. Tað gekk helst ikki so skjótt sum ætlað, tí veturin 1837 rykkir Pløyen amtmaður J. Nolsøe eftir einari frágreiðing um støðuna norðuri í Klaksvík, og serliga hví trøðin ikki er gyrd inni. 7. januar 1838 svarar J. Nolsøe Pløyen amtmanni í einum brævi og hevur hesa støðulýsing úr Klaksvík. Orsøkin til at J. Nolsøe so tíðliga vildi hava frámatrikulerað trøðna, sum handilin var lagdur í, var, at arbeiðsmenninir kundu samla grót til grundirnar á stykkinum, og tá tað týdningarmesta var at laða grundirnar, so var arbeiðið við at laða grótgarð um trøðna útsett, tí hon kundi kortini ikki nýtast fyrr enn summarið 1839. Arbeiðið við at gyrða um handilin hevði bara seinkað alt hitt arbeiðið. Annars er mest sum alt tilfarið komið til Klaksvíkar. Stórviðurin til pakkhúsið er á staðnum og tilhøgdur. Av brettum liggja fleiri hundrað tilgjørd. Timbrið til íbúðarhúsið verður byrjað við tað fyrsta at høgga til, og hesir bygningar verða teir fyrstu, sum verða gjørdir lidnir. Teir skifursteinarnir til takið, sum eru komnir, fara heilt vist ikki at strekkja, so tað fara at mangla takbrettir til at tekja restina við, og tey koma ikki fyrr enn einaferð í vár. Sostatt er líkt til, at Handelsetablissement Klaksvig ikki verður liðugt og klárt at handla í fyrr enn einaferð í heyst.[9]

Torvskurðarrætt fekk handilin eisini í Vágshaga, Uppi á Hálsi, men tað var sera óhøgligt hjá starvsfólkunum við handilin at røkja torvheiðarnar. Longu í mai 1839 søkja starvsfólkini um brennistuðul, tí tað er so arbeiðskrevjandi og trupult at útvega torv í Klaksvík. Umsóknin verður gingin á møti, og ein ávís peningaupphædd verður tillutað starvsfólkunum í Klaksvík.

## Bygningarnir

Bygningarnir, ið blíva reistir í Klaksvík í 1838, eru sethús, krambúðarpakkhús og gróthús.

Sethúsini vóru ein vinkulbygningur í trimum. Norðara leingjan,

sum var til handilsleiðaran ella faktorin, sum hann bleiv nevndur, var 10 x 4,5 m, býtt sundur í 2 stovur, trappu til loftið og kjallara undir. Sunnara leingjan til 2. betjent var 5 x 4,5 m við einari stovu. Og millumbygningurin, sum var felags, var 5 x 4,5 m. Har vóru tvær koyggjusengur, 2 skorsteinar og trappa á loftið til sunnaru leingjuna. Húsini sóu júst út sum tey gomlu sethúsini á Fitjunum í Vestmanna. So hetta hevur møguliga verið eitt slag av sniðhúsum.

Pakkhúsið var 16 x 8,5 metrar við kjallara og lofti, krambúðin var á miðhæddini. Bøkjaraskúrur varð bygdur suðurúr í 1840, og ein nævurskúrur norðan fyri nakað seinri. Niðan fyri handilin varð ein brúgv gjørd, og ein lossijagt bleiv eisini keypt. Brúgvin varð útbygd í 1843, og í 1847 var hon so long, at skip kundu liggja við brúnna. Har bleiv eisini ein vippustong sett upp í 1851. Teir, ið smíðaðu í 1837/38, vóru allir úr Havn. Simon Johannesen, Joen Jacobsen, Mads Andreas Winther, Laurits Debes, Hans Jacobsen, Johannes Simonsen og Daniel Danielsen. Vindeyguni gjørdi Niels Winther, snikkari.[10]

Í 1847 varð víðkað um handilin, og Nýggja pakkhús bygt. Hesin bygningurin var 9 x 14 m, hevði kjallara, 2 fullar hæddir, loft og ovastaloft. Magnus undir Garðsenda úr Hósvík stóð fyri at laða grundina, og hon var spekkað við sandi úr Fuglafirði. Húsasmiðirnir vóru allir úr Havn við Jacob Bærentsen sum formanni. Jarnsmíðið gjørdi Niels L. Arge. Takið var eins og á hinum úr hetlendskum skiferi.[11] Hesin bygningurin bøtti nógv um goymsluplássið. Seinri í tíðini, í 1896, eru húsini samanbygd, og standa tey soleiðis í dag.

### Fólkini við handilin

Stríð tók seg beinanvegin upp um, hvør skuldi standa fyri handlinum. Dannebrogsmaðurin, D. J. Joensen, sum hevði verið við frá fyrstan tíð av og sum um tað mundið var ein múgvandi maður í Norðuroyggjum, væntaði sær helst starvið. Men ymisk viðurskifti gjørdu, at so bleiv ikki. Tá tað frættist, at ætlanir vóru um at seta J. G. Effersøe sum 1. betjent[12], byrjaði mótstøða í Norðuroyggjum beinanvegin um hendan mann, og nógv brævskriving og tingingar tóku seg upp. Norðoyingar siga í brævi, at tá teir hava hoyrt slatur um hesa ætlan, vilja teir vísa sína misnøgd, og í juni 1838 skriva teir bræv til amtmann Pløyen og siga, at teir halda nevnda J. G. Effersøe vera „aldeles uværdig til denne post.“[13]

Men fyrireikingarnar at starvseta J. G. Effersøe vóru settar í verk. Í maimánaði í 1838 verður í brævi mælt til fyribils at seta J. G. Effersøe sum faktor við Handelsetablissement Klaksvig, tí hann er einasta fólk, vit kenna, sum er kunnugur við bókhald, men tá hann í sínum fyrra embæti sum skúlalærari í Tórshavn er klagaður fyri ólevnað, so mæla vit til at finna ein annan, tí tað er óheppið, um ein maður, sum er komin í ringt orð, fer at standa fyri handlinum. Tað má vera soleiðis, at fólkið hevur fult álit á handilsmanninum og handlinum. Mælt verður J. Nolsøe at finna ein annan kanska á kontórinum í Havn at standa fyri handlinum. Samstundis verður álagt, at J. G. Effersøe verður settur frá nov. 1838, og at hann verður uppsagdur til várs 1839, tí tann slatur, sum er í Føroyum og í Norðuroyggjum um hendan mann, er av sovorðnum slag, at tað er ófatiligt, at tú, Jacob Nolsøe, yvirhøvur hevur sett hann til eitt slíkt starv, tí passar bert ein brotpartur av tí, sum slatrað verður um hann, ger hetta hann púrasta óegnaðan til starvið. Tað verður somuleiðis álagt J. Nolsøe at kunngera fyri íbúgvunum í Norðuroyggjum, at starvssetanin hjá J. G. Effersøe er fyribils.[14]

J. G. Effersø hevði eina trupla fortíð. Hann hevði verið lívverji hjá Jørundi Hundadagakongi, tá hesin gjørdi uppreistur í Íslandi í 1809. Eftir hetta flýddi hann til Føroyar, giftist konu av Heygum í Vestmanna og búsettist fyrst har, síðani í Havn. Hann hevði annars verið í Føroyum fyri tað. Saman við eingilsmanninum James Savignac høvdu teir handlað fyri enska handilsfyritøkuna Horne & Stackhouse. Tað er kanska frá hesi tíðini, stóra ónøgdin við mannin stavar. Tí teir seldu vørur um allar oyggjarnar, eisini upp á borg, og vóru seinri og kravdu inn útistandandi pening. Og eitt av klagupunktunum úr Norðuroyggjum var eisini, at hann hevði verið sera harðrendur. Hann hevði m.a. hótt fólk í Mikladali við byrsu og verið grovur í orð og tal.[15] Í Kunoy hevði hann ein sunnumorgun, tá fólk var á veg í kirkju, lovað ilt, skjútsaðu teir hann ikki. Hetta hevði við sær, at kunoyingar ikki sluppu í kirkju.[16] Av Viðareiði siga tey seg hava vána royndir av manninum og ræðast hansara „Glubskhed og Brutalitet“, umframt hava tey hoyrt, at foreldrini, sum høvdu gentubørn í skúlanum í Tórshavn, høvdu klagað J.G. Effersøe, tí hann „forførte deres Pigebørn, som gik i Skolen, til Utugt,“ og at hann eisini var óálítandi í peningamálum.[17]

Men avgerðin um at seta hann stóð við.

Sostatt var tað J. G. Effersøe, sum stóð og tók ímóti og leiddi handilin, tá hann læt dyrnar upp hin 14. november 1838, og Dannebrogsmaðurin D. J. Joensen sum 2. betjent. Hóast handilin verður væl rikin, so gjørdist fortíðin hjá J. G. Effersøe hansara lagna. Hann fekk einki álitisstarv við handilin, hvørki í Klaksvík ella í Vestmanna. Men J. Nolsøe hevði álit á manninum og setti hann í starv sum roknskaparførara við kontórið í Havn, og har varð hann verandi, til einahandilin varð avtikin.

Í maimánaði 1839 bleiv ein dani, Melchior Johan Olsen, settur sum 1. betjent. Hann var í starvinum til august sama árið, og hesa tíðina vóru bøkurnar so illa førdar, at J. Nolsøe mátti senda J. G. Effersøe norður aftur at fáa skil á.

Næsti maður at taka við sum faktor í Klaksvík var hin bert 23 ára gamli Johan Mortensen. Hann var úr Øravík og hevði lært við handilin í Havn. Undantikið tíðina 1848-1852 var hann fyristøðumaður í Klaksvík øll árini, til einahandilin bleiv avtikin í 1856. Í eini tvey ár var hann við handilin hjá Jørgen Bech & Sønner, men fór til Suðuroyar at verða, stovnaði handil har suðuri, sum mentist at verða tann størsti í landinum.

Avloysarin hjá Johan Mortensen árini 1848-52 var Jógvan Djónason Nolsøe. Hann var faktor við úthandilin á Tvøroyri, har hann bleiv settur, tá handilin læt upp í 1836. Teir báðir býttu um hesi fýra árini og fóru hvør sær aftur til sítt stað aftaná.

Aðrir, sum vóru við handilin, kunna nevnast Jens Wenningssted úr Havn, Christopher Michael Olsen úr Havn og Clæmint Høgnesen úr Oyndarfirði, sum gjørdist sjálvur handilsmaður í Oyndarfirði seinri.

Bøkjararnir vóru fyrstu tíðina allir úr Havn. Teir komu norður, tá nakað var at gera, og fóru síðani suður aftur. Teir vóru Sámal Thomassen, Christen Løvgreen, J. Gregersen og Jóhan Hendrik Joensen. Men frá 1844 var Joen Ziska Joensen, sonur Dannebrogsmannin, settur í fast starv sum bøkjari og hjálparmaður í krambúðini.[18]

## Lívið við Etablissement Klaksvig

Vørurnar, sum seldar vórðu í handlinum, vóru mest neyðsynjarvørur so sum korn, timbur, salt, tubbak og brennivín. Men tey 19 árini, einahandilin var her, øktist útboðið av marglætisvørum, hóast tað kanska tíðum var langt ímillum hesar vørur. Eisini vera listar skrivaðir yvir teir persónar í Norðoya sýslu, sum vilja hava seteplir, tá skip

kom, oftast úr Skotlandi, men eisini úr Hetlandi. Bara einstakir, so sum Matras sýslumaður og Kaarsberg prestur og onkur stórbóndi, keypa eina tunnu, mest vanliga er ½ skeppu av seteplum (1 skeppa er uml. 1/8 part tunna av korni).

Tað, sum avreitt varð í handlinum, var mest lýsi, troyggjur, hosur, ull, fjøður og fiskur, ráskorin turrur fiskur. Frá 1845 fór handilin eisini at taka ímóti ráfiski. Ráfiskurin varð saltaður á staðnum og síðani fluttur til Havnar, har hann bleiv víðari tilvirkaður og útfluttur sum klippfiskur.

## Klagur um handilin

Tað vóru tó ikki bert lovorð, nýggi handilin í Klaksvík fekk. Beinanvegin hann opnaði, gramdu fólk seg um vøruútboðið og onnur viðurskifti. Í einum brævi verður soleiðis heitt á høvuðsskrivstovuna í Havn í juni 1839, at tá vit hava hoyrt um, at meslingar ganga í Havn, og vit hava vørumangul í Klaksvík, serliga bygg, so vilja vit heita á handilin í Havn um, so skjótt skip kemur úr Danmark, ikki at uppskipa í Havn, og síðani umlossa, men senda skipið beinleiðis til Klaksvíkshandilin.[19] Óttin fyri smittusjúku var stórur, men møguliga var ein annar ótti eisini til staðar hjá viðskiftafólkunum við Klaksvíkshandilin, og tað var, at ein er noyddur at keypa vánaliga vøru í Klaksvík, meðan fólk í Havn keypa dygdarvørur, og tað vil viðskiftafólkið í Klaksvíkshandilinum ikki finna seg í.

Tí kann áheitanin til Havnar kanska eisini lesast á tann hátt, at ein vildi tryggja sær, at vøran, sum verður send til Klaksvíkshandilin, er hin sama, ið er komin beinleiðis úr Danmark, og ikki gomul vørugoymsla.

Hetta kemur betur til sjóndar í einum seinri skrivi, har sýslumaðurin í Norðuroyggjum, Matras, í 1839 orðar seg á hendan hátt. „Tað má syrgjast fyri, at nokk av lýsutunnum eru í handlinum í Klaksvík, soleiðis at vit sleppa frá at fara til Havnar. Skipsbreyð manglar og salt. Ertrarnar, sum Matras hevur keypt í summar, eru vánaligar, byggkornið sera vánaligt, „som andet svagt færøesk korn“, og sum eftir slatrinum skal vera so ósunt, at børn tola ikki at eta tað. Rugkornið var bleytt og geraði. Bæði blað-, rullu- og presstubbak eru ússalig. Onkur heldur, at vøran er so ring, tí tað lekur á loftinum á pakkhúsinum, soleiðis at vøran er versnað, síðan hon kom til Klaksvíkar. Størsti trupulleikin í øllum hesum er, at vit her

norðuri hava hoyrt sum slatur, at tað einans er góð vøra at fáa í handlinum í Havn, „og da rygtet siger, at der nu ikke andet end godt byg bekommes i Thorshavn, og vi derimod faa ikke andet end ringt byg, saa vil det naturligviis forøge disse wedkommendes utilfredshed med handelen."[20]

Í nov. 1839 klaga gjáarmenn og aðrir eysturoyingar til amtmann Pløyen um handilin í Klaksvík. Tað er serliga hin langa avgreiðslutíðin og vørumangulin. „Handelen må forbedres, der er både daarligt og dyrt, og der fattes mange nødvendige varer, især tobak."[21]

Kendasta klagan er tann provst Garde, sóknarprestur á Nesi í Eysturoy, skrivaði í 1841: „Et par ord om den kongelige færøeske handels bestyrelse", har hann alment stígur fram og viðger handilsviðurskiftini, eftir at úthandlar vóru settir á stovn, og serliga úthandilin í Klaksvík, sum hann sigur seg kenna best. Og skotsmálið er sera vánaligt. Hvussu tómur handilin í Tórshavn onkuntíð sýnist, so er tað einki sammett við Klaksvíkshandilin; hann er eitt „meget bedrøveligere Syn." Alt manglar, avgreiðslutíðin er ov drúgv, og fólkið er óblítt. „Handelsstedet Klaksvig, gaa over al Beskrivelse. Her skulle endog Skjeldsord, ja trusler med Bank høre til dagens Orden."[22]

Hans David Matras, lærari, yrkti eina vísu um standin í Klaksvík, „Af nogle bogstaver vi kunne meget lære", har hann í staðin fyri at nevna nøvn, nýtir bókstavir fyri teir ávísu persónarnar.

Vísan, ið hevur sama lag sum Norska Løva, er 29 ørindi. Fyrsta ørindi ljóðar soleiðis:

Af nogle bogstaver
vi kunne meget lære,
hør hvad fortælles her,
som nylig er passeret,
her sjunges om et E,
et M, et X derved
her nævnes og et P,
som først mod F opskred.

E er yrkjarin sjálvur, Hans David Matras. M er faktor Mortensen. X er ein ávísur John, sum var við Kgl. handilin. P er provst Garde, og F er forvalter Jacob Nolsøe.[23]

Men tað verður eisini klagað hinumegin handilsdiskin um við-

skiftafólkið. Faktor Mortensen skrivar í juni 1842 til amtmann Pløyen, at eysturoyingar „Ved drukkenskab og grovheder hindrer ham i udøvelse af hans embedspligt.“[24]

Soleiðis bilgdist aftur og fram ímillum íbúgvarnar og einahandilin. Møguliga vóru fyrstu árini ein tillagingartíð, har hvørgin partur rættiliga dugdi at umsita hetta nýggja frælsi. Tað var serliga hátyngdin, handilin ikki megnaði at avgreiða, so sum tá stórar grindir vóru og nógv lýsi var handlað. Lýsibakkin er annars ein afturvendandi trupulleiki, tí hann var ringur at halda tættur, og ov lítil, tá nógv lýsið var avreitt, og tunnur restaðu næstan altíð.

Ein onnur kelda til gerandisdagin við Handelsetablissament Klaksvig er ein dagbók, sum Christopher Michael Olsen, betjentur í Klaksvík frá 1840 til 1845, hevur skrivað, tíðina hann var her. Hon inniheldur upplýsingar um ymisk viðurskifti við handilin í Klaksvík og um fólk annars.

Nøkur brot úr dagbókini:
Da jeg i august 1840, først kom til Klaksvig bad jeg factoren om logis, men han sagde, at han ikke havde huuslejlighed for mig, derfor maate jeg gaa den lange vaj ind i Vaag, ofte i bælmørke. Jeg logerede hos den gamle Joen Danielsen Vaag.

22. aug. 1842. I dag har jeg indhandlet fisk, fra en baad fra Gøte, og en fra Svinø, maalt korn til en fra Lervig. Factoren har intet bestilt undtagen skrevet den smule for dem, det er skammeligt gjordt; thi han burde have hjulpet mig.

12. jan. 1843. I dag have mændene her i boigden kastet nout, de laante dem een fra Fuglefjord. De finge megen sei.

17. jan. 1843. I morges, førend man rigtig vaagnede kom en baad fra Svinø, de købte for kontant, Tobak, Brændeviin og enkelte andre varer.

2. feb. 1843. Kyndilsmessedag, have boigdens unge folk dandset her i Klaksvig om aftenen, jeg tracterte fruentimmerne med to flasker viin.

19. april 1844. I gaaraftes døde Daniel Jacob Michelsens kone paa Upsalon i Barslesseng, Doctoren betjente hende med en Dødfødt Dreng. – Den 23 de d.m. bliver et Aar siden Deres Bryllup.

April 1845 Gik jeg med Mortensen paa jagt, vi fik en lille sælhund, der var 6 potter tran i den hvoraf jeg fik 26 skilling.

1. Juli 1845. I dag rejser jeg fra Etablissament Klaksvig og forflyttes til Kramboden i Thorshavn. Der mangler 1 maaned og 11 dage i 5 aar som jeg har været her i Klaksvig.[25]

Við lóg frá 21. mars 1855 varð avgjørt at taka einahandilin av frá 1. januar 1856 at rokna, og 15. mai 1856 var uppboðssøla yvir handilsbygningarnar úti í Klaksvík. Hetta bleiv selt. Sethúsini, gróthúsið, hjallur, norðara pakkhúsið, lýsibakkin, lossibrúgv, sunnara pakkhús og tilhoyrandi grundøki. Hægsta boð átti Edvard Emil Mayer, hann var tó ikki keypari, men keypti fyri tubbaksfabrikantin Jørgen Peter Herman Bech úr Keypmannahavn. Kostnaðurin var 6210 ríkisdálar.[26]

Í sambandi við søluna av Etablissament Klaksvig í 1856 sigur munnliga søgan, at nakrir menn samlaðust til fundar í handilshúsunum. Har bleiv tosað um, hvussu framtíðin fór at verða. Hvør mundi keypa og annað. Eitt, teir kegladust um, var orðið handelskyndig, tí hann, ið keypti, mátti verða handelskyndig, og hvat mátti liggja í tí orðinum. Tá steig Johan úr Antineshúsi fram, hann hevði siglt sum stýrimaður við Nólsoyar-Pálli, og segði, at tað skuldi hann so væl siga teimum, hvat tað var fyri nakað at verða handelskyndig, og tað var „At være snildt oplagt til alt bedrageri. Han haver en falsk vægt i sin hond og snyder gerne.“[27]

Av bygningum hjá einahandlinum eigur Norðoya Fornminnasavn í dag handilshúsini, sethúsini og grundøkið, har sethúsini standa.

**Bókmentir**


Debes, Hans Jacob: *Føroya Søga 3. Frá kongligum einahandli til embætisveldi.* Føroya Skúlabókagrunnur. Tórshavn 2000.

Hansen, J. Símun: *Havið og vit I.* Egið forlag. Klaksvík 1960.

Korsgaard, Peter: *Den kongelige enehandel på Færøerne 1709-1776.* Erhvervshistorisk Årbog 1981. Meddelelser fra Erhvervsarkivet 31. Univerisitetsforlaget i Aarhus.

Mortensen, Arnbjørn: *Føroyar undir fríum handli í 100 ár. Yvirlit yvir søgu einahandilsins*. Tórshavn 1955.

Muhle, C.A: *Færøeske krønike*, Einars prent og forlag. Tórshavn 1970.

Muhle C.A.: *Om Emancipationen af Færøerne og Grønland.* Einars Prent og Forlag. Tórshavn 1970.

Resen, Peder Hansen: *Atlas Danicus, Færøerne.* Færoensia vol. IX. Munksgaard. København 1972.
Zachariasen, Louis: *Føroyar sum rættarsamfelag 1535-1655*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn 1961.

*Óprentaðar heimildir:*
Føroya Landsskjalasavn (kopi av skjølum, finnast á Norðoya Fornminnasavni).
Rigsarkivet (kopi av skjølum, finnast á Norðoya Fornminnasavni).
Dagbók C. M. Olsen, kopi fingið frá Ole Nielsen.
Notatbók 1979-1981. Jógvan Ravnsfjall.

**Notur**

1 Mortensen, Arnbjørn. Føroyar undir fríum handli í 100 ár. S. 7.
2 Korsgaard, Peter. Den kongelige enehandel på Færøerne 1709-1776. S. 40.
3 Resen, Peder Hansen. Færøerne in Faroensia Vol. IX. S. 7.
4 Zachariasen, Louis. Føroyar sum rættarsamfelag. S. 41, 42, 43.
5 Mortensen, Arbjørn. Føroyar undir fríum handli í 100 ár. S. 72.
6 Debes, Hans J. Føroya Søga 3. Frá kongligum einahandli til embætisveldi. S. 28.
7 Muhle, C.A. Om Emancipationen af Færøerne og Grønland. S. 40
8 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv frá J. Nolsøe til amtmann Pløyen, Thorshavns Handelssted 7. jan. 1838.
9 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv frá J. Nolsøe til amtmann Pløyen, Thorshavns Handelssted 7. jan. 1838.
10 Ravnsfjall, Jógvan. Einahandilin í Klaksvík í 150 ár – í Dimmalætting nr. 130. 12 nov. 1988.
11 Ravnsfjall, Jógvan. Einahandilin í Klaksvík í 150 ár – í Dimmalætting nr. 130. 12 nov. 1988.
12 Heitið 1. betjent, 2. betjent er tað, ið nýtt verður í skjalatilfarinum. Seinri er faktor vanligt fyri 1. betjent.
13 Rigsarkivet, Den adm. Direktion for den kgl. færøeske Handel 1777-1860: Journal T. 1837 Bræv til amtmann Pløyen 16. juni 1838. Undirskrivað av fleiri norðoyingum.
14 Rigsarkivet, Den adm. Direktion for den kgl Færøeske Handel 1777-1860: Kopibog M 1837-1840. Til handelsforvalter Nolsøe paa Færøe 2. oktober 1838.
15 Rigsarkivet, Den adm. Direktion for den kgl færøeske Handel 1777-1860: Journal T 1837 Bræv til amtmann Pløyen Mygladal 11. august 1838.
16 Rigsarkivet, Den adm. Direktion for den kgl færøeske Handel 1777-1860: Journal T 1837 Bræv til amtmann Pløyen Kunøe 19. august 1838.
17 Rigsarkivet, Den adm. Direktion for den kgl færøeske Handel 1777-1860: Journal T 1837 Bræv til amtmann Pløyen vegna íbúgvarnar í Widerøe Sogn 9. august 1838.

18 Ravnsfjall, Jógvan. Einahandilin í Klaksvík í 150 ár – í Dimmalætting nr. 130. 12. nov. 1988.
19 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv til Lunddahl frá sýslumanni Matras Nordøre 4. juni 1839.
20 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv til amtmann Pløyen frá Matras Nordøre 9. november 1839.
21 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv til amtmann Pløyen. Gjov 30. november 1839.
22 Garde, C.B. Et par ord om den kongelige færøeske handels bestyrelse í C.A.Muhle: Færøeske Krønike s. 125, 135.
23 Ravnsfjall, Jógvan. Einahandilin í Klaksvík í 150 ár – í Dimmalætting nr. 130. 12. nov. 1988.
24 Føroya Landsskjalasavn, Færø Amt: Bræv til amtmann Pløyen frá faktor Mortensen. Klaksvig 20. juni 1842.
25 Dagbók hjá C. M. Olsen 1842-1845 transkriberað kopi á Norðoya Fornminnasavni.
26 Hansen, J. Símun. Havið og vit I. S. 4.
27 Munnlig frásøgn frá Frits Olsen, niðurskrivað á Norðoya Fornminnasavni av J. Ravnsfjall feb. 1981. Frits hevði hoyrt hetta frá soni Lamba-Jákup. Hesin Lamba-Jákup var til staðar úti í Klaksvík í 1856, tá hesi orð vóru søgd.

Um høvundin:
*Andras Sólstein*
Savnvørður á Norðoya Fornminnasavni.

*Jógvan Ravnsfjall*

# Handilin hjá Jørgen Bech og Sønner í Klaksvík 1880-1900

Skjalatilfarið frá hesum handilsvirki, sum við broytingum var virkið í 75 ár, frá 1856 til 1931, er ógvuliga rúgvismikið. Íalt eru uml. 600 eindir skrásettar, tað verði seg handilsbøkur, listar, uppgerðir, samlaðar skjalaeindir og annað. Uml. 450 eindir eru í varðveitslu hjá Norðoya Fornminnasavni og uml. 150 eindir hjá Føroya Landsskjalasavni.

Eg vil her royna at lýsa gongdina hjá hesum handli út frá einum parti av tí skjalatilfari, sum er goymt, og í dag er í varðveitslu hjá Føroya Landsskjalasavni.

Tær keldurnar, eg havi brúkt í hesum førinum, eru teir pakkar frá hesum tíðarskeiði, har roknskapir, fakturalistar, brøv og annað frá høvuðsskrivstovuni í Keypmannahavn, handlinum í Klaksvík og flestu úthandlum eru pakkað saman í ein stóran pakka, hvørt árið fyri seg.

Her er ein rúgva av tilfari, og serliga eru tað brøvini, ið ógvuliga væl lýsa, ikki bert handilsgongdina, men eisini aðrar tættir í bygdalívinum í Føroyum, serliga í Havnini, á Eiði og í Oyndarfirði.

## Handilsskipanin

Frá 1870 til 1910 hevði hesin handilin navnið Jørgen Bech og Sønner, og teir ovastu í leiðsluni vóru Peter Bech og Gustav Hansen, sum leiddu høvuðshandilin í Bredegade 35 í Keypmannahavn. Øll viðurskifti við handilin í Klaksvík við úthandlunum fór ígjøgnum

henda handil, og her vórðu allar tær stóru avgerðirnar tiknar, ið viðvíktu handlunum í Føroyum.[1]

Soleiðis var handilin í Klaksvík høvuðshandilin hjá Jørgen Bech og Sønner í Føroyum, og síðani hevði hesin handilin fleiri úthandlar, t.d í Oyndarfirði, í Havn og á Eiði, sum so aftur høvdu sínar úthandlar í øðrum bygdum.

Við høvuðshandilin í Klaksvík var handilsleiðarin Johan Christian Djurhuus, vanliga nevndur faktorin. Haðani úr Klaksvík vórðu allir hinir handlarnir stýrdir, og skuldi so hesin aftur svara allan handilsskapin í Føroyum yvir fyri høvuðsskrivstovuni í Keypmannahavn.

Í 1880 vóru íalt ellivu handlar á henda hátt knýttir at høvuðs-



*Johan Christian Djurhuus, 1834-1918. Faktor við handilin í Klaksvík 1858 - 1908. (Norðoya Fornminnasavn).*

handlinum í Klaksvík: Handilin í Norðdepli, handilin í Víkum í Oyndarfirði við úthandlunum við Gjógv, í Elduvík og í Fuglafirði, handilin í Leirvík, handilin í Norðragøtu, handilin í Syðrugøtu, handilin á Strondum og handilin í Havn við úthandli í Nólsoy.[2]

Plássini, har hesir úthandlar vóru, vóru ikki vald tilvildarliga. Tað ráddi um at hava handlar, har nógvur útróðrarfiskur kom upp á land, tí tað var alla hesa tíðina tann týdningarmesta inntøkukeldan hjá handilsfelagnum.

Tað gav at bíta, tá Jákup Clementsen í Húsavík í 1885 spurdi seg fyri hjá Jákupi Lützen við handilin í Havn um at handla vegna Jørgen Bech og Sønner í Húsavík.

Hann fekk noktandi svar, tí Jákup Lützen og Johan Chr. Djurhuus ikki hildu, at nóg nógvur útróðrarfiskur kom upp á land har í bygdini.[3]

Hetta tíðarskeiðið koma úthandlar afturat, meðan aðrir halda uppat. Eitt tíðarskeið eru tveir handlar í Norðragøtu, og seinni eru báðir hildnir uppat. Í 80-árunum kom eisini ein úthandil í Funningsfirði til handilin í Víkum, men hann helt uppat nøkur ár seinni. Handilin í Nólsoy heldur eisini uppat í hesum tíðarskeiðinum. Í 1889 keypir felagið handilin hjá Jørgen Kruse á Eiði við úthandli í Haldarsvík, og árið eftir fær handilin á Eiði ein úthandil afturat í Tjørnuvík.

Tá ið so 20. øld tekur við, eru tólv úthandlar afturat høvuðshandlinum í Klaksvík, tó væl broyttir í mun til teir, ið vóru tjúgu ár frammanundan.[4]

**Støddin á handlunum**

Handlarnir vóru ógvuliga ymiskir í stødd, um hugsað verður um handilsbygningar, vøruútboð og hvussu árliga úrtøkan handilsliga var í teimum ymsu handlunum. Tað ráddi um at fáa fatur á føroyskum handilsvørum, virka og lata tær til høvuðshandilin til útflutnings, og so fáa selt innlendskar og útlendskar handilsvørur til kundarnar runt um.

Handilin í Klaksvík var alla tíðina nógv størstur í keyp og sølu, men í byrjanini av skeiðinum var eisini ógvuliga nógv virksemi í handlinum í Oyndarfirði við úthandlunum hiðani. Tá var handilin í Nólsoy eisini nógv tann minsti.

Gjøgnum alt skeiðið broytist alt ógvuliga nógv. Tað er skiftandi,

hvussu árini roynast hjá teimum ymsu handlunum, bæði av vánaligum fiskiávum, men eisini av ivasomum rakstri, sum eg skal taka upp aftur seinni.

Seinast í øldini hevur høvuðshandilin enn nógv tann størsta raksturin, men bæði handilin í Havn og tann á Eiði hava ein rakstur, sum er um 1/3 av rakstrinum í Klaksvík, og nakað aftan á koma handlarnir í Norðdepli og í Syðrugøtu, og síðani hinir.

Handilin í Klaksvík førir eisini bankavirksemi, og tað ger, at gjaldførið hjá hesum handlinum alt hetta tíðarskeiðið er gott. Í 1880 standa stívliga 21.000,- kr. inni, har tann mesta einstaka ognin er 2.120,- kr., og í 1900 eru tølini vaksin til slakar 138.000,- kr. innistandandi, og tann, ið hevur mest, eigur næstan 4.600,- kr.[5]

**Útflutningsvørurnar**

Tær vørur, sum handlarnir fingu mestan vinning av, vóru fiskavørur. Fiskur, sum í 80-árunum partvís varð fiskaður við egnum deksførum hjá handlinum í Klaksvík: Løvenørn, Bikuben og Fritjof, men í flestum førum varð keyptur frá útróðrarbátum á teimum ymsu handilsplássunum.

Við tað at Løvenørn gongur burtur undir Íslandi í 1882, og royndirnar við Bikuben og Fritjof miseydnast seinni í 80-árunum, heldur handilin heilt uppat við skipsfiskiskapi, áðrenn vit koma til 1890. Tó hevði handilin ætlanir í 1885 um at fáa sær eitt dampskip til fiskiskap, 70 føtur til longdar, men tað var av ongum.[6] Nógv størri dentur verður tá lagdur á at fáa fatur á útróðrarfiski, bæði í teimum bygdunum, har handlarnir eru, og í øðrum bygdum við. T.d. skrivar Jákup Lützen í 1895 til mann í Sandavági og spyr eftir fiski til at keypa.[7]

Álagt verður eisini keypmonnunum um at fáa fatur á so nógvum fiski sum møguligt. Í 1900 skriva teir niðrifrá: „Den fisk som er hjemmesaltet må vi få. Kan de ikke sende en mand rundt og gjøre aftaler med folk.“[8] Nógvur saltfiskur verður eisini keyptur frá skipum. Tað er serliga í 90-árunum, tá ið Jákup Lützen keypir saltfisk til handilin í Havn at turka. Men hesin fiskurin er dýrari at keypa enn ráfiskur frá útróðrarbátunum.

Tað varð eisini væl útflutt av ullvørum og lýsi, eins og øðrum vørum afturat.

Av ullvørum vóru tað mest troyggjur, ið vórðu útfluttar, ymsar í stødd og ymislittar eisini.

Annars var nakað av øðrum vørum útflutt, men ikki tann heilt stóra nøgdin í mun til fiska- og ullvørurnar.

### Stýringin úr Keypmannahavn

Eg havi nevnt, at allar tær stóru avgerðirnar vórðu tiknar í Keypmannahavn, og tað sæst eisini í skjalatilfarinum. Handilin her er nærri evropiska marknaðinum og hevur tætt samband við fleiri vørukeyparar í grannalondunum hjá Danmark og eisini í londum longri burturi.

Viðvíkjandi skipsfiskiskapinum hjá handlinum so koma boð niðrifrá, hvussu alt skal verða, og enntá hvar skipini skulu fara at fiska. Handilshúsið niðri hevur nógv samband við Ålesund í Noregi, og haðani fáa teir tíðum boð um, hvussu gongur við fiskiskapinum á leiðini har og norðari. Tí geva teir í januar 1880 Johan Chr. Djurhuus boð um, at bæði Løvenørn og Bikuben skulu yvir til Ålesund at fiska, tí skipini tá fáa nógvan fisk har. Samstundis mæla teir til at fiska við línu heldur enn við snøri, og mæla eisini til, at manningin fær fasta mánaðarliga hýru eins og gjørt verður í Noregi og Svøríki.[9]

Sama er, tá ið farið verður at útflyta ísaðan kalva. Tað er fyrst í 1885, at royndir verða gjørdar við tí, og eisini her koma boðini niðrifrá, bæði hvussu kalvin skal hagreiðast og ísast, so hann kann vera frískur og góður, tá hann kemur á danska ella bretska marknaðin.[10]

Sama er við lýsinum. Tað skal eisini farast væl um, og alt má gerast eftir fyriskriftunum niðrifrá fyri at fáa tann besta prísin, tá tað verður selt víðari.

### Skuldin í handlinum

Gjøgnum hetta 20 ára skeiðið er nógv skuld í øllum handlunum, og álagt verður Johan Chr. Djurhuus á hvørjum ári at fáa skuldina inn. Tað gongur tó ikki so væl, so aftaná at Peter Bech í 1890 hevur verið í Føroyum og vitjað í teimum ymsu handlunum, verða nakrar broytingar gjørdar.[11] Clæmint Høgnesen í Oyndarfirði, sum hevur stóra skuld til handilin, fær eina royndartíð upp á eitt ár afturat sum handilsleiðari at greiða skuldina, men mátti árið eftir lata handilin frá sær. Nýggjur maður, Jákup Olsen, kom at stjórna handlinum inn í 20. øld. Sama var í Fuglafirði, har nýggjur maður, Høgni Marius Høgnesen, varð settur at stjórna handlinum, sum aftaná verður at hoyra beinleiðis undir handilin í Klaksvík.

Johan Chr. Djurhuus, sum eisini í 80-árunum skyldaði nógv til handilin, var tó framvegis sitandi við róðrið í høvuðshandlinum, helst vegna tað at hann hevði fingið skuldina hjá sær væl niðurgoldna, tá uppgerðin fyri 1890 varð gjørd.

Gjøgnum øll 90-árini roynir so Johan Chr. Djurhuus at fáa skuldina, sum er runt um í handlunum, niðurgoldna. Tað eydnast eisini væl, tí samlaða skuldin, sum í 1890 var uml. 350.000,- kr., er við ársenda 1900 komin niður á uml. 220.000,- kr.[12] Hesi 10 árini fær hann á ymsan hátt gjørt avtalur við kundarnar, sum skylda, við at teir undirskriva at avreiða fast til handilin, taka lán til skuldina,



Oversigt over Regnskabsafslutningen ved Klaksvig og underliggende Handelsteder pr. 31 December 1895

| | Ude ved Handelsteder Kr. ø | Staaende overtagne Gjeldsfordringer Kr. ø | hos andre Debitorer Kr. ø | Creditorer Kr. ø | Contant Beholdning Kr. ø | Udestaaende Vare Beholdning Kr. ø | Produkt Beholdning Kr. ø | Totalsum Kr. ø |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Klaksvig | 142.260 17 | - | 21.677 21 | 76.975 79 | 3767 17 | 74130 29 | 18574 56 | 260409 70 |
| Fragaar Creditorer | - | - | - | - | - | - | - | 76.975 79 |
| | | | | | | | | 183433 91 |
| Handelen i Andefjord ved Jacob Olsen | - | - | 538 54 | 741 77 | 576 35 | 7820 58 | 4610 76 | 13.546 41 |
| Handelen i Fuglefjord ved H. M. Högnesen | - | - | 978 19 | 1195 75 | 390 61 | 2.370 97 | 5.707 93 | 9.447 50 |
| Handelen i Gjov ved P. Klein | - | - | 407 33 | 1448 72 | 344 71 | 2.201 37 | 4.092 02 | 7.042 93 |
| Handelen i Eldevig ved Anth. Haraldsen | - | - | 1878 30 | 1013 45 | 1010 22 | 2.461 62 | 1.424 79 | 6.774 93 |
| Handelen i Andefjord overtagne Rest Gjelds fordringer | - | 2910 19 | - | - | - | - | - | 2.910 19 |
| Handelen i Gjov D° D° | - | 2596 42 | - | - | - | - | - | 2.596 42 |
| Handelen i Fuglefjord D° D° | - | 1876 25 | - | - | - | - | - | 1876 25 |
| Conto for overtaget Jordegods | - | 710 72 | - | - | - | - | - | 710 72 |
| Handelen i Lervig ved Ole Olsens Enke | - | - | 3.647 24 | - | 692 77 | 1.143 10 | 4162 44 | 9.645 55 |
| Handelen i Sydergöthe ved Joen Jacobsen | - | - | 3.238 76 | 625 49 | 676 54 | 1.667 68 | 4603 67 | 10.156 65 |
| Handelen i Thorshavn ved Jacob Lützen | - | - | 4.393 22 | 1.104 47 | 621 63 | 33.624 21 | 5.660 34 | 44.299 40 |
| Handelen i Strænder ved S. Andreasen | - | - | 2.195 19 | 195 61 | 1034 38 | 3.156 46 | 1.966 79 | 8.352 52 |
| Handelen i Nordgöthe (Ole J. Hansen Taliths) | - | - | 642 86 | - | - | - | - | 642 86 |
| Handelen i Norddeble ved J. Christiansen | - | - | 1.659 03 | 1451 87 | 456 42 | 6.681 42 | 5.098 62 | 13.925 49 |
| Handelen i Eide ved J. Kruse | 1538 99 | - | 2.021 55 | 3735 72 | 2 61 | 8.078 71 | 11.337 02 | 22.970 88 |
| Handelen i Haldorsvig ved Samme | - | - | 648 27 | - | 73 .. | 658 17 | 159 55 | |
| Handelen i Tjörnevig ved Samme | - | - | - | 1164 08 | - | - | - | |
| | | | | 12.676 83 | | | | 154.937 .. |
| Fragaar Creditorer | - | - | - | - | - | - | - | 12.676 83 |
| | | | | | | | | 142.260 17 |
| | | 8093 58 | 43.925 69 | 89.652 62 | 9.673 51 | 143.994 96 | 67.398 79 | 273.086 53 |
| Fragaar Creditorer | - | - | - | - | - | - | - | 89.652 62 |
| | | | | | | | | 183433 91 |

*Fíggjarstøðan hjá handlinum í Klaksvík og úthandlum við árslok 1895. Fyri allar handlarnar er samlaða virðið í uppgerðini 183.433,91 kr. (Pakki 1895. Regnskab for Klaksvig 1895. LSS).*

pantseta jørð fyri skuld ella selja jørð fyri pengar til skuldina. Handilin ognast tí í hesum tíðarskeiðinum nógva jørð, men hon verður skjótt seld aftur fyri at fáa kontantar pengar til handilin. Eigararnir niðri í Danmark vóru ikki áhugaðir í at eiga nógva jørð í Føroyum. Teir vildu heldur hava reiðan pening til at fíggja framhald av handlinum. Í 1895 er jarðarognin hjá handlinum sett til eitt virði upp á 710,72 kr.[13]

## Útbyggingar og nýggir tættir í handilsvinnuni

Í hesum tíðarskeiðinum fekk handilin í Klaksvík íshús, og seinni frystihús, sum kravdist og menti handilin. Eisini ognaði handilin sær handilshúsini hjá Jóhan Ziska Joensen á Biskupsstøð og byrjaði har bryggjarí og bakarí. Tann vaksandi raksturin hesi árini gjørdi eisini tað, at atløgubrúgvin í 1890 varð longd við eini jarnbrúgv, og at fast varð bygt millum tað uttara og sunnara pakkhúsið í 1896.[14] Eisini við handilin í Havn varð eitt nýmótans turkarí gjørt í hesum tíðarskeiðinum, so tað bar til at turka fiskin inni, tá ikki terri var at turka úti. Bakkøst vóru eisini í 90-árunum, við tað at lýsismeltaríið í Klaksvík brendi í 1893 og Bikuben gekk burtur í 1895. Aftaná at Bikuben var burturgingin, var ætlanin at keypa Falkin til nýtt farmaskip, men tað varð av ongum. Somuleiðis varð hetta árið eisini ætlanin at leiga tvey fiskiskip til fiskiskap út frá handlinum í Klaksvík, men tað varð heldur ikki til nakað.[15]

Allar hesar ábøtur eru ivaleyst gjørdar eftir boðum niðrifrá, tí sambært brævaskiftinum millum høvuðsmenninar og faktorin í Klaksvík sæst, at teir altíð vilja royna tað nýggja og stuðla uppundir nýggjar vinnuvegir.

Í brævi til faktorin í 1880 skriva teir: „Vi håber det må lykkes dem at overvinde den færøske ulyst til at foretage noget nyt.“[16]

Tá ið bryggjaríið er komið í gongd í 1885, biðja teir um at fáa ølroyndir sendar niður, samstundis sum teir mæla faktorinum til at fáa bøndurnar at keypa mask frá bryggjarínum, tí tað er gott fyri neytini.[17]

Hetta árið skriva teir eisini um høvd og ryggir av tí avreidda fiskinum, ið alt fer til spillis. Heldur skuldu høvdini verið turkað til neytafóður eins og gjørt verður í Noregi, og ryggirnir brúktir til at taða jørðina við.[18]

Men ikki sæst, at nakað av hesum omanfyri nevnda hevur verið fylgt. Ov lítil áhugi hevur verið fyri tí tá.

Royndir vórðu eisini gjørdar at útflyta aðrar vørur enn tær siðbundnu, t.d. lambakjøt, egg, handskar o.a. Hetta vísti seg tó ikki at eydnast so væl, lutvíst tí hagreiðingin ikki var sum fyriskrivað.[19]

## Marknaðurin í Evropa

Niðri í Keypmannahavn fylgdu teir væl við marknaðinum og góvu boð um, nær tær ymsu vørurnar skuldu førast niður á marknaðin.

Nógv av fiskinum varð útflutt til Spania, og tað er í hesum tíðarbili, at trupulleikar stinga seg upp á spanska marknaðinum, serliga av tollinum. Men tað kundi eisini vera av øðrum ávum, sum t.d. í 1885, tá ið umfarssótt, kolera, gekk har. Tá sluppu skipini ikki til landið við fiskinum í langa tíð. Eisini var ein fiskalast, sum var komin til Spania árið fyri, oyðiløgd, tí tað nýggja brennievni, petroleum, var komið at fiskinum og hevði oyðilagt alla lastina.

Hetta sama árið hækkaði rugprísurin, tí roknað varð við kríggi millum Ongland og Russland.[20]

Onkuntíð varð saltfiskurin sendur til Ålesund at turka.

Soleiðis var í 1885. Tá fekk faktorin boð um at lasta skonnartina Johonnu Mariu fulla við saltfiski til at føra yvir til Ålesund, har fiskurin so varð turkaður til klippfisk, eins og gjørt varð árini aftaná.

Hesin fiskurin hevði heitið: Færøfisk med norsk virkning.[21]

Umframt at troyggjuprísirnir kundu ganga upp og niður á marknaðinum uttanlands, so kundu aðrir trupulleikar eisini stinga seg upp. Í 1890 var mølur komin í troyggjurnar, sum vórðu sendar niður, og í 1900 var ein partur av troyggjunum horvin, stjolin ella misfarin. Hetta varð komið fram til, eftir at tær vóru niðurkomnar. Tað varð nógv skrivað aftur og fram um hesi mál. Men eitt annað var eisini, sum tarnaði søluni av teimum føroysku troyggjunum. Tað var, at tær fingu kapping frá maskinbundnum troyggjum, tí í 1880 var ein verksmiðja í Odense farin at gera líknandi troyggjur fyri lægri prís.[22]

## Kappingin millum bygdahandlarnar

Kappingin millum teir ymsu handilsmenninar í Føroyum var hørð. Tað ráddi um at skaffa sær so nógv av føroyskum vørum til útflutnings

fyri so lágan prís sum møguligt, og at fáa selt handilsvørurnar fyri mesta prís, fyri at vinningurin kundi verða so stórur sum gjørligt. Onkuntíð gjørdu handilsmenninir av sínámillum, hvussu prísirnir skuldu verða, men tað helt ikki leingi, so bjóðaði onkur hægri, og so fóru prísirnir aftur av lagi.

Ikki varð dámt, at aðrir fóru at handla í økinum, tóku kundarnar hjá handlinum sum var. Soleiðis var, tá ið Símun Hansen fór at handla fyri seg sjálvan í Klaksvík í 1890. Tá skriva teir á høvuðsskrivstovuni í Keypmannahavn til faktor Johan Chr. Djurhuus: „Vi hører at Simon Hansen vil begynde en handel i Vøi! Det er en højst ubehagelig ting, og den vil vist skade os ikke så lidt, både direkte og indirekte. Kan De gjøre noget for at modarbejde ham.“[23]

Hjá handilsfelagnum Bech og Sønner vóru tað bert høvuðshandilin í Klaksvík og tann í Havn, sum høvdu brennivínsloyvi. Hinir handlarnir í felagnum seldu bert øl og vín, ikki sterkari. Í handilskappingini kom tað tí onkuntíð fyri, at handlar ikki fingu fisk, tí kappingarneytin bjóðaði útróðrarbátunum snaps, tá ið teir komu aftur av útróðri, fyri at fáa teir at avreiða hjá sær.

Hetta gremur Jørgen Kruse seg um í 1890, har hann skrivar: „Da jeg den første dag fik det meste af fisken, begyndte Hr. Restorffs handelsmand her, strax på den fordærvelige traktøren med brændevin.“ Fimm ár seinni í marsmánaði skrivar hann aftur: „Begge mine konkurenter begyndte først i måneden at traktere med den så fordærvelige, men dog så yndede fiskesnaps. Af denne grund have nogle vraget et glas øl fra mig, og det er jo en selvfølge, at de som benytte sig af det nævnte tiltrækningsmiddel få en del mere fisk end de ellers havde fået.“[24]

### Tvey mál úr rúgvuni

Eg vil at enda taka tvey mál, sum lýsa eitt sindur, hvørjum truppulleikum ein handilsmaður kundi koma út fyri tá í tíðini.

Í 1890 hevur handilin í Klaksvík bílagt 1 dusin av ullkørðum úr Skotlandi til handilin, har tilskilað varð, hvussu teir skuldu gerast.

Tá ið teir komu, vóru tað 6 dusin av kørðum, t.v.s. 72 karðar, og vildi handilin ikki hava so nógvar, men tann, ið hevði gjørt karðarnar, vildi ikki taka teir aftur, tí hjá honum vórðu bíløgd 6 dusin, og tá ið karðarnir vórðu bílagdir serliga til føroyingar, tí teir ikki

verða brúktir nakra aðrastaðni í heiminum, vildi hann ikki taka teir aftur.

Hildið varð, at skeivleikin var gjørdur í Leith, og mátti tí handilin í Klaksvík liggja inni við øllum hesum kørðunum.[25]

Ikki veit eg, men síðan eg kom í handilshúsini fyri meira enn 25 árum síðani, havi eg ongar karðar funnið, so allir munnu ivaleyst vera seldir.

Vit, sum eru fødd í fyrru helvt av seinastu øld, kenna øll ivaleyst søguna hjá Hans Andriasi Djurhuus: „Her slænges Maren Katrine."

Margarinið var so nýtt tá í tíðini, at skelti úr søguni við áskriftini: „Her sælges Margarine," var komið at hanga uppi í handilsbúðini hjá Jákup Lützen í Havn, so fólk á henda hátt fingu upplýst, at har kundu tey keypa margarin.

Ein dagin í 1890 kemur so sjálvur fútin og vil hitta Jákup og sigur honum, at um tað var rætt, so átti hann at fingið eina bót upp á 100,- kr., heilt nógvur peningur tá, tí skeltið ikki var hongt upp sambært teimum lógligu fyriskriftunum. Skeltið var í tveimum, omanfyri stóð „Her sælges" og niðanfyri stóð „Margarine." Ímillum har mátti ikki verða meira enn 2 tummar, og í handlinum hjá Jákupi vóru tað 3 tummar. Jákup segði seg als ikki kenna til hasar fyriskriftirnar. Men fútin segði, at Jákup skuldi sleppa undan bótini, um hann rættaði tað.

Hann so gjørdi og sendi bræv til faktorin í Klaksvík og bað hann ansa eftir, at hansara skelti var rætt uppsett. Samstundis skrivaði hann, at hann roknaði við, at tað var Müller ella onkur annar av hinum handilsmonnunum í Havn, ið høvdu klagað hann fyri fútanum.[26]

## Bókmentir:


Hansen, J. Símun. *Havið og vit I*, Klaksvík 1960.


## *Óprentaðar keldur:*


Føroya Landsskjalasavn, Privat savnindi. Bechs Handil. Skjalatilfar í eskjum, pakkum og handilsbókum, árini 1856 til 1914 á reol 268, hyllar 1.1-1.5 og 2.1-2.5.


## Notur

1 Hansen, J. Símun: Havið og vit. Klaksvík 1960, s. 4 ff. Føroya Landsskjalasavn. Bechs Handil.

2 Pakki 1880. Regnskab for Klaksvig 1880.
3 Pakki 1885. Thorshavn 1885.
4 Pakki 1900. Regnskab for Klaksvig 1900.
5 Pakkarnir 1880 og 1900. Regnskab for Klaksvig 1880 og Regnskab for Klaksvig 1900.
6 Pakki 1885. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885
7 Pakki 1895. Thorshavn 1895.
8 Pakki 1900. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1900.
9 Pakki 1880. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1880.
10 Pakki 1885. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885.
11 Pakki 1890. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1890.
12 Pakkarnir 1890 og 1900. Regnskab for Klaksvig 1890 og Regnskab for Klaksvig 1900.
13 Pakki 1895. Regnskab for Klaksvig 1895.
14 Pakki 1896. Regnskab for Klaksvig 1896.
15 Pakki 1895. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1895.
16 Pakki 1880. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1880.
17 Pakki 1885. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885.
18 Pakki 1885. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885.
19 Pakki 1890. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1890.
20 Pakki 1885. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885.
21 Pakki 1885. Jørgeb Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1885.
22 Pakki 1880. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1880.
23 Pakki 1890. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1890.
24 Pakkarnir 1890 og 1895. Ejde 1890 og Ejde 1895.
24 Pakki 1890. Jørgen Bech & Sønner, Kjøbenhavn 1890.
26 Pakki 1890. Thorshavn 1890.

Um høvundin:
*Jógvan Ravnsfjall*
Savnsleiðari á Norðoya Fornminnasavni.

*Anja Wenningstedt*

# Hví spøkir Jeremias?

Søgurnar vilja vera við, at tað spøkir í gamla skótahúsinum á Kambsdali. Sagt verður, at hann, ið gongur aftur, er ein maður, ið verður kallaður Jeramíggjas. Hvør hesin maður er, kann sjálvandi ikki sigast við vissu, tí eingin hevur enn fingið orð á hann. Tað tykjast ikki vera nógvar upplýsingar knýttar at honum í søgunum, sum eru á mannamunni, men rættiliga greiðar ábendingar eru um, at Jeramíggjas, sum gongur aftur á Kambsdali, man hava verið Jeremias Johannesen kongsbóndi á Mørkini við Gjógvará í Fuglafirði. Jeremias Johannesen varð sambært Eysturoyar kirkjubók doyptur 25. august í 1767. Hann var sonur Lisbeth Thomasdatter og Johannes Jeremiassen.

Hóast hesin fyrilestur hevur heitið: Hví spøkir Jeramíggjas? og ætlanin veruliga er at royna at greiða áhoyrarunum eitt sindur frá, hvørjar orsakir hesin samtíðarmaður hjá Nólsoyar-Pálli hevur til at ganga friðleysur runt á náttartíð, so er fyrilesturin í veruleikanum í nógv størri mun knýttur at tungu lagnuni hjá dóttur hansara Maren Jeremiasdatter og partvís eisini børnum hennara Frederikku og Adam. Tí grundin til, at gamli Jeramíggjas ikki fær frið, er vanlagnan hjá hesum trimum. Og í henni var Jeramíggjas kanska ikki heilt ósekur.

**Hvør var Maren Jeremiasdatter?**

Á Landsskjalasavninum ber til at fylgja Maren Jeremiasdatter rættiliga neyvt líka frá vøggu til grøv. Í kirkjubókini fyri Eysturoy sæst, at í 1807 fingu Jeremias Johannesen og hustru Malene Tronde-

datter í Fuglafirði eina dóttur, sum tey nevndu Maren. Hon varð doypt 19. august 1807 og var 6. barnið av 8. Tað fyrsta føtt í 1796 og tað yngsta í 1815.

Einans fá fólk tykjast í dag vita nakað ítøkiligt um Maren hjá Jeramíggjasi, hóast hennara lagna var so sermerkt, at hon, nú 200 ár eru farin, síðan hon varð fødd, framvegis hevur eina heilt serliga søgu at siga. Eina søgu um ivasama rættartrygd, um eitt miskunnarleyst samfelag, sum ikki læt ivan vera teimum ákærdu til fyrimunar, eitt samfelag, sum helt tað vera í lagi at geva einum menningartarnaðum medmenniskja, sum ikki hevði gjørt øðrum enn sær sjálvum fortreð, deyðadóm.

Maren Jeremiasdatter hevur verið í mínum huga, síðan eg fyri fleiri árum síðan fyrstu ferð á Landsskjalasavninum av tilvild rendi meg í hennara navn á einum lista hjá fútanum yvir revsaðar føroyingar. Tað var spennandi, men samstundis eisini eitt sindur ræðandi at staðfesta, at ein føroysk kvinna so seint sum í 1841 varð dømd til deyða.

Eg hevði ongantíð hoyrt um hesa kvinnu fyrr, men gjørdist forvitin eftir at vita meira og fór at leita eftir meira ítøkiligum skjølum um Maren. At greiða hennara óblíðu lagnu hevur verið spennandi. Tí søgan um stutta og sermerkta lívið hjá hesi í gásareygum vanligu, men samstundis sera óvanligu føroysku kvinnu, er alt ov áhugaverd til at verða goymd og gloymd.

Maren hevði óvanliga høgan aldur, eisini eftir tátíðar metum, áðrenn Eysturoyar kirkjubók kann greiða okkum frá, at hon 10. mai 1830 varð konfirmerað við ummælinum „slett“ fyri kunnleika, men gott fyri atferð. Hetta ber boð um, at Maren nokk ikki var heilt sum øll hini, og tað verður eisini staðfest, tá ið Eysturoyar prestur í øðrum skjølum greiðir frá, at tað ikki var tí, at Maren varð mett at hava nóg góðan kunnleika í kristni, at hon varð fermd, men heldur tí, at tað var farið at ganga sum slatur, at Maren var við barn.

### Maren verður við barn

Tað varð mett serstakliga óhóskandi, um hon skuldi seta barn í verðina og ikki sjálv vera fermd og tí heldur ikki gift, men tað skuldi vísa seg, at einki hald var í smettusøgunum á hesum sinni.

Maren var ikki við barn, men gjørdist tað stutt eftir. Tað næsta, vit frætta um hana í skjølunum, er, tá ið presturin á Nesi í einum

skrivi til Tillisch amtmann dagfestum 12. juli 1831, tað vil siga árið eftir, hon varð konfirmerað, greiðir frá, at eitt gentubarn var føtt uttan fyri hjúnalag í Fuglafirði 1. juli sama ár og varð doypt í Nes kirkju 3. juli. Gentan fekk navnið Frederikke Poulsdatter. Mamman var sambært presti „ugift fruentimmer Maren Jeremiasdatter", og pápin varð sagdur at vera einkjumaður Poul Joensen úr Funningi, búsitandi við Gjógv, sum eisini hevði váttað fyri presti, at hann var faðir at barninum.

Prestur setti seg í samband við amtmannin fyri at spyrja, um tað kundi verið møguleiki fyri, at abbin Jeremias Johannesen kundi fingið eina samsýning, helst eina tunnu av byggi um árið, frá fátækrakassanum. Væntandi var, at abbin fór at verða tann, sum mátti taka sær av gentuni, tá ið mamman fór aftur út at tæna, og ein tunna av korni frá fátækrakassanum hevði komið betur við enn vanligi barnapeningurin. Prestur segði frá, at hetta var tí, at pápin at barninum var gamal maður yvir 65 ár. Og at hann neyvan megnaði at gjalda nakað til barnið.

Mamma Maren og kona Jeramíggjas Malene Trondedatter doyði av krabbameini í munninum í 1833. Áðrenn tað var eisini eldra systir Maren, nevnd Lisbeth, deyð og dóttir hennara flutt inn í tað frammanundan stóra og tunga húsarhaldið at búgva. Í skifti-protokollini sæst, at skift verður eftir Malenu, og at tað ikki stóð heilt vónleyst til fíggjarliga, men støðan versnaði stutt eftir. Jeramíggjas var farin at eldast og læt helvtina av mørkini, ið hann hevði í festi, til elsta sonin, og hevði sjálvur sostatt bert ½ mørk eftir at lívbjarga sær og sínum við.

Í fólkateljingini, sum varð gjørd í Føroyum í 1834, sæst, at Maren var farin til Sørvágs at tæna, og at hon hevði lítlu dóttur sína Frederikku við sær. Tær búðu tá inni hjá Heina Danielsen óðalsmanni. Ein av húsbóndunum, sum Maren tænti hjá, gav henni seinni eitt skotsmál, sum rættiliga greitt gevur fatanina av, at hon eftir øllum at døma ikki hevur verið fullfør og at hon, hóast hon gjørdi sítt besta, hevði torført við at klára seg í gerandisdegnum. Hann segði frá, at Maren var:

*„…indesluttet i sit Væsen, dorsk og søvnig med et skiult, sky Blik, som ved Tiltale bestandig var rettet nedad, end videre som skiødesløs, glemsom og overhovedet som taabelig (stupida); hun var efter Evne villig til det Arbejde hun formaaede at udføre, hvilket var i en mindre Omfang end*

*Piger endog i en yngre Alder pleie hertillands at udføre; forøvrigt var hun redelig, fredsommelig, sagtmodig.“*

## Maren verður við barn á øðrum sinni

Maren flutti aftur til pápan í Fuglafirði. Búleikaðist saman við honum sambært fólkateljingini frá 1840, men annars sæst einki til hana í skjølunum fyrr enn í 1841, tí tá greiðir kirkjubókin fyri Eysturoy frá, at „Qvinden Maren „ hevði fingið ein son 20. februar, og at hann 15. mars hevði fingið navnið Adam. Í sær sjálvum ikki nøkur stórhending, at enn eitt barn varð føtt uttan fyri hjúnalag, men eldur kom í, tá Maren fyri presti greiddi frá, at pápi hennara Jeremias Johannesen eisini var pápi at barninum.

Um jóltíðir 1840 hevði Maren annars viljað verið við, at tað als ikki var Jeremias, men ein fuglfirðingur nevndur Nicolai Johannesen, sum var pápi Adam. Hann búði nær við, og konan var systkinabarn Jeremias. Eisini eftir at barnið var føtt, hevði Maren hildið fast við uppáhaldið um, at Nicolai Johannesen væl kundi vera pápi at barninum. Hetta velur prestur ikki at nevna í brævi, sum hann 22. mars 1841 skrivaði til amtmannin. Einasta, hann skrivar, er, at eitt mál um blóðskemd er í umbúna.

Jeremias var deyður nakað áðrenn Adam kom í heimin. Hann var nakað údssaligur eitt stutt tíðarskeið, doyði 7. september 1840, og slapp sostatt undan avleiðingunum av blóðskemdarmálinum. Verri var við neyðars Maren, tí nú byrjaði eitt drúgt rættarmál, sum kom at vara í tvey ár, frá fyrstu avhoyring til lagnan hjá Maren og hennara børnum varð endaliga avgjørd.

Landkirurgurin Vithusen varð biðin um at koma við einari frágreiðing til amtið um støðuna hjá móður og barni. Hann greiddi 27. mars 1841 frá, at hann metti einki skuldi verið í vegin fyri, at Maren og Adam vóru flutt til Havnar longu í apríl sama ár. Vithusen ivaðist tó stórliga í, um tað var ráðiligt at seta móður og barn í varðhaldið ella avhoyra mammuna, tí at hetta fór at ávirka hennara sálarstøðu og við hesum eisini sálarstøðuna hjá barninum.

## Maren og Adam verða sett í varðhald

Pløyen amtmaður tók tilráðingina frá kirurginum í álvara. 14. mai skrivar hann til sorinskrivaran, at nú var tíð at fáa Maren og barnið til Havnar. Av tí at støðan hjá teimum báðum var tann, hon var,

mælti Pløyen til, at serligt fyrilit skuldi takast, og at tey ikki skuldu setast í vanligu arrestina, men í eitt lítið kamar, sum var við síðuna av tingsalinum. Har var ovnur inni, og kamarið varð onkuntíð brúkt, tá fangar við vánaligari heilsu skuldu sita ein dóm.

Skjølini boða frá, at móðir og sonur vórðu sett í varðhald í lítla tingkamarinum 17. mai 1841. Adam var tá knappar 3 mánaðir gamal. Maren hevði Adam hjá sær og passaði hann sjálv fyrstu tíðina. Hon gav dreinginum bróst í nakrar mánaðir, men tá ein tíð var farin, varð tó ikki hildið ráðiligt, at drongurin skuldi verða verandi hjá mammuni, tí at hon javnan var ring av krampum. Teir vitjaðu við stuttum millumbili og høvdu við sær, at Maren: *„...stedse saae mat og forstyrret ud.“*

Adam varð sendur til eitt eldri par í Havn, maðurin nevndur Rasmus Rasmussen, at vera. Fyri at hava hann til fosturs, fingu tey góðar 5 skillingar um vikuna frá fátækrakassanum. Tá drongurin varð tikin frá Maren, minkaðu krampaherðindini, men hon slapp tó ikki av við tey. Hon var ávirkað av, at sonurin varð tikin frá henni, men gjørdi tó einki við at royna at fáa loyvi at síggja hann aftur. Og nevndi sambært fangavørðinum ikki lítla Adam við einum orði í meira enn eitt heilt ár.

Tá fyrilit ikki longur skuldi takast fyri, at eitt barn var saman við Maren, varð hon fyrst í november 1841 flutt úr tingkamarinum og í vanliga varðhaldið. Onkuntíð var heilsustøðan so vánalig, ímeðan Maren var í varðhaldinum, at læknin gav boð um, at ikki var nóg mikið við vanliga vaktarhaldinum. Nøkur tíðarskeið mátti vakt vera hjá Maren alla tíðina.

### Rættarmálið

Tá sakarmálið kom fyri í rættinum, varð H. C. Müller sýslumaður í Streymoy útnevndur verji hjá Maren, og Lunddahl landfúti varð útnevndur ákæri. Lunddahl var púra greiður í sínari niðurstøðu, tá hann 16. juni 1841 kravdi:

*„at tiltalte Maren Jeremiasdatter af Fuglefjord i henhold til Norske Loves 6-13-14, straffes paa Livet, saaledes at, naar hun er halshugget Kroppen kastes paa en Ild og opbrændes, samt at hun derhos kommer til at udrede alle af denne Sag lovligt flydende Omkostninger.“*

Fleiri av Marensa næstringum vitnaðu í rættinum, og niðurstøðan, sum kann gerast út frá teirra útsagnum, ger okkum enn greiðari, at Maren ikki var fullfør, at hon nokk meira skuldi roknast og dømast sum eitt barn, hóast hon var 34 ára gomul. Maren hevði til dømis trupult at halda seg til sannleikan. Kom ofta til at lúgva, men segði ósatt, uttan at vilja gera nakran skaða við hesum. *„Enfoldig“*, *„taabelig“*, *„villieløs“*, *ligegyldig“*, *„paastaaelig“*, *„trodsig“* eru onnur dømir um orð, sum skyldfólk og aðrir fuglfirðingar nýttu, tá tey skuldu greiða frá um Maren. Men hon var kortini ikki býttari enn so, hildu tey, at hon visti, hvat tað var fyri vanlukkulig støða, sum hon hevði komið sær út í.

Maren helt í langa tíð fast við, at Nicolai Johannesen var pápi Adam. Hon greiddi eisini frá, at tað var hann, sum hevði biðið hana sagt, at Jeremias var pápin. Tí Jeremias var jú deyður kortini og kundi ikki straffast. Verri var hjá Nicolai Johannesen, sum var giftur maður. Boð vóru send norð til Fuglafjarðar eftir honum at fáa greiðu á skuldsetingunum. Tað tók neyvan nakran á bóli, at Nicolai Johannesen noktaði fyri at hava havt samband við Maren. Hann slapp undan víðari sakarmáli við at svørja eið uppá, at hann var ósekur. Eisini eftir hetta bleiv Maren við at siga, at hann veruliga var tann, ið var pápi at barninum, men tað var heilt týðiligt, at eiðurin, sum Nicolai Johannesen hevði svorið uppá, at hann var ósekur og ongantíð hevði havt samband við Maren, taldi nógv meira millum manna og somuleiðis í rættinum enn frágreiðingin hjá henni.

Í meira enn eitt ár royndi Maren at halda fast við, at Nicolai Johannesen átti barnið, men eftir fleiri ferðir at vera trýst til at broyta frágreiðing segði Maren í avhoyring 15. juni 1842, at bróðurkona hennara Sunniva Joensdatter hevði biðið hana borið rangan vitnisburð í rættinum, og at einki var í ákærunum móti Nicolai Johannesen.

Nógv vitni vóru boðsend í málinum, men í veruleikanum vistu tey ikki serliga nógv nýtt at greiða rættinum frá. Mesta av tí, sum kom fram, var bygt á ábendingar og leysasøgur. Til dømis hildu fólk, at Jeremias var farin at hátta sær øðrvísi, tá tað var komið fram, at Maren var við barn. Hann var eisini afturfarin. Tað var ikki nakað, tey høvdu hugsað um tá, men eftir at málið um blóðskemd var komið fram, vóru tey farin at halda, at tað mundi vera tí, at hann ikki hevði reint mjøl í posanum.

Okkurt nágreiniligt var tó at heinta undir avhoyringunum. Millum annað frá beiggja Maren, Johannes Jeremiassen, sum búði í roykstovu, sum var samanbygd við roykstovuna, har Jeremias, Maren og lítla Frederikka búleikaðust.

Bert ein tunnur skilaveggur úr viði var millum stovurnar. Einaferð hevði Johannes hoyrt, at Maren hinumegin skilaveggin segði við pápan, at hon ætlaði sær at rýma heimanífrá, tí hon ikki tímdi at búgva hjá honum. Johannes hoyrdi hana ikki siga nakað um, hví hon vildi ríma, og hann spurdi heldur ikki. Hesum greiddi hann frá í rættinum. Hvønn týdning Johannes hevur lagt í hetta, er ikki heilt greitt, men ákærin Lunddahl nýtti hetta sum eitt dømi um, at okkurt var galið í viðurskiftunum millum Maren og Jeremias.

Hann helt, at tað, at Johannes ikki hevði valt at spyrja um, hví Maren hevði sagt soleiðis, var ein greið ábending um, at hann hevði varhuga av, at okkurt var spinnandi galið og ikki tordi at fáa vissu fyri sínum illgruna.

Ein annar fuglfirðingur greiddi í rættinum frá, at einaferð, tá ið hann var komin at vekja Jeremias fyri at biðja hann koma við sær til útróðrar, hevði hann sæð, at hann og Maren lógu í somu song, hóast ein onnur song var inni. Hann var ikki vísur í tí, men hann helt seg minnast, at songin var uppreidd.

Lítla Frederikka, sum altíð svav í somu song sum mamman, varð eisini avhoyrd. Hon segði seg einki vita um, at nakað var farið fram millum mammuna og abban. Hetta var nakað, ið verjin royndi at brúka sum prógv um, at Maren var ósek. Ákærin helt bara, at hon var eitt barn og tí ikki kundi takast í álvara.

19. august 1841 varð deyðadómur feldur yvir Maren Jeremiasdatter í Føroya rætti. Allir deyðadómar, ið vóru dømdir í donskum undirrætti, skuldu sendast til Hægstarætt í Keypmannahavn, og hesin var einki undantak. Hægstirættur vildi ikki staðfesta dómin, men kravdi í úrskurði 24. november 1841, at málið skuldi takast upp av nýggjum. Tað varð eisini gjørt, men ikki fyrr enn meira enn eitt hálvt ár eftir.

### Málið viðgjørt av nýggjum

16. juli 1842 sendi amtmaðurin boð út um, at málið skuldi takast uppaftur, og 20. juli stevndi ákærin Maren at møta í rættinum 27. juli. Alla hesa tíð tykist Maren hava sitið í arrestini og bíðað eftir

einari avgerð. Hetta var sjálvandi ikki nøktandi, og í boðunum, sum Pløyen amtmaður sendi út 16. juli, gjørdi hann eisini greitt, at hann vónaði, at málið kundi ganga skjótt, so dómur kundi falla og málið sendast víðari til Hægstarætt longu áðrenn skipaferðslan til Danmarkar steðgaði fyri veturin.

Nakað av gongd tykist tó hava verið í málinum tíðarskeiðið, áðrenn tað varð tikið uppaftur til viðgerðar. Sorinskrivarin royndi at fáa próvgrundarlagið gjøgnumgingið av nýggjum og bað somuleiðis um eina frágreiðing frá landkirurginum um sálarstøðuna hjá Maren.

Vithusen landkirurgur skrivaði langa og neyva frágreiðing, og er hon sera áhugaverd, tí at hon gevur okkum eitt heilt serstakt innlit í Maren og hennara umstøður. Millum annað skrivar hann um Maren, at hon var rættiliga lítil á vøkstri.

*„Har en jordagtig guul Ansigtsfarve, et mat og dumt skulende Blik, noget dyrisk overhovedet i sit Physionomie, hendes Gang langsom og slæbende;“*

Tá kirurgurin vitjaði Maren í arrestini, kundi onkuntíð vera torført at fáa hana at svara, og hon hevði torført við at minnast einføld ting sum til dømis nøvn. Hann helt tað var torført at staðfesta, um orsøkin var:
*„... ligegyldighed, en tankeløs Hensunkenhed eller en ved hendes ulykkelige Stilling til visse Tider fremavlet Melancholi eller tavs Desperation. Hun har viist sig deri som indskrænket og stupid; stunden vare hendes Svar Præget af en dybere Sørgmodighed, stunden af Ligegyldighed, Dorskhed...“*

Hinvegin kundi Vithusen staðfesta, at Maren bæði át, drakk og svav væl, hóast hon sat í varðhaldi. Niðurstøðan hjá Vithusen um Maren dró í bæði borð. Hann gav pápanum stóran part av ábyrgdini fyri tí, ið hent var, men helt tó ikki, at Maren var so illa fyri, at hon heilt kundi sleppa undan revsing.

*„I hendes Bekiendelser og de senere mislykkede Forsøg paa at modificere samme, ligesom, vis man dertil fæste Liid, i hendes foreløbige Advarsler til Faderen om det syndige Forhold, som fandt sted imellem dem, antydes unægteligen en vis Grad af Fornuft, en Bevidsthed og et moralsk Skiøn,*

*som udelukker enhver Paastand om fuldkommen Bødefrihed; men sees hen til hendes Fornufts ringe Udvikling, til hendes Villieløshed, til den dyriske Naturs langt overveiende Fremtræden, sees hen til de ovennævnte saa ofte tilbagevendte Krampetilfælde, og hvad disse muligviis dengang kunne have bevirket til Sløvhed hos hende, og som et beleiligt Moment for den afdøde Synder, og endelig sees hen til den samvittighedsløse Indflydelsens Misbrug – saaledes som høierværdig hr. Provst Garde udtrykker sig – som en listig og underfundig Fader kan giøre af barnlig Underdanighed, Vane og andre Omstændigheder selv i en ældre Alder, er det min Formening at Tilregneligheden af hendes Brøde derved betydeligen formindskes.“*

At Maren var tað, sum vit í dag vildu kalla evnaveik ella menningartarnað og harafturat var hart rakt av epileptiskum herðindum, er einki at ivast í, eftir at frágreiðingin hjá læknanum er lisin.

Verjin hjá Maren royndi, skjølini bera boð um, at tað var nakað hálvt, at sannføra rættin um, at Maren ikki kundi takast í álvara. Hennara barnsliga sinni gjørdi, at hon var løtt at ávirka, og at tað var torført at vita, nær hon segði sannleikan og nær ikki. Lítið nyttaði tó, tí Føroya rættur staðfesti enn einaferð deyðadómin.

**Málið avgreitt**

Tá dómurin varð sendur aftur til Hægstarætt, varð hann við einum boðanarbrævi dagfestum 7. desember 1842 broyttur á tann hátt, at Maren ikki skuldi takast av døgum, men í staðin setast í Kjøbenhavns Forbedringshus restina av sínum lívi.

Málið var nú endaliga avgreitt, men eftir var at finna út av, hvussu rokningin fyri tíðina, sum Maren hevði sitið fongslað í Føroyum, skuldi gjaldast. At hava ábyrgdina av Maren, meðan hon sat í varðhaldinum, varð mett sum ein serlig uppgáva, tí at heilsustøðan ikki var nakað serliga góð. Fyristøðumaðurin fyri varðhaldinum hevði tí fingið lovað serliga góða løn fyri at hava tikið sær av henni í alla hesa longu tíð, men brævaskiftið millum Pløyen amtmann og fútan gevur varhuga av, at teir ikki vóru heilt samdir um, hvussu nógva løn fyristøðumaðurin hevði uppiborið fyri ómakin.

Amtmaðurin helt upphæddina, sum fútin helt vera hóskandi, vera alt ov høga. Eftir samráðingar varð ein semja gjørd, sum allir partar kundu góðtaka. Fyristøðumaðurin fekk 31 ríkisdálar og ikki teir 62,



[illegible] min [illegible]

Paastand:

at Tiltalte, Maren Jeremiasdatter af [illegible], i henhold til Norske Lovs 6-13-14, straffes paa Livet, saaledes at, naar hun er halshugget, Kroppen kastes paa en Ild og opbrændes, samt at hun [illegible] til at udrede alle af denne Sag lovligt flydende Omkostninger.

[illegible] Landfogderiet i Thorshavn, den 16de Junii 1841.

J Lunddahl

*Hetta var kravið um revsing fyri Marina, sum ákærin Lunddahl, landfúti, setti. (Sorinskrivarin: Dokumenter til Justitsprotokollen 1837-1841).*

sum hann hevði væntað og partvís eisini fingið lovað. Hann fekk harumframt eisini loyvi til móti einum gjaldi frá fátækrakassanum at taka sær av Maren, tá hon 8. februar 1843 fyribils varð sett leys úr varðhaldinum.

Maren fekk loyvi at búgva hjá fyristøðumanninum, og hann fekk til vegar neyðuga útgerð til hennara. Freistin var kortini stokkut, tí 3. mai 1843 fór hon til Keypmannahavnar við skonnartini Hector. Á Toldboden stóð maður frá fútaskrivstovuni í Keypmannahavn klárur at taka ímóti Maren. Hevði hana við sær til Kjøbenhavns Forbedringshus og fekk har kvittan fyri, at hon veruliga var komin vegin fram. Fyri hetta arbeiði sendi hann rokning til fútaskrivstovuna í Føroyum og bað um at fáa 80 skillingar endurgoldnar fyri ómakin.

Steðgurin hjá Maren í Kjøbenhavns Forbedringshus gjørdist styttri enn ætlað var. Dómurin ljóðaði uppá lívlanga revsing. Hon var bert 36 ár, tá hon varð send til Danmarkar, men lívið hjá Maren var liðugt, longu áðrenn hon gjørdist 40. Í stuttum brævi fingu myndugleikarnir í Føroyum at vita, at Maren nú var deyð, og vit mugu ganga út frá, at boðini vórðu borin víðari til familjuna.

**Børnini**

Men hvat bleiv av børnunum?

Frederikka og Adam høvdu mist sambandið við mammuna. Pápa átti hvørki, og ongar ommur ella abbar vóru, sum kundu taka sær av teimum.

Ikki er nógv at síggja til Frederikku í skjølunum. Hennara lív man lukkutíð hava verið minni dramatiskt enn tað hjá mammuni. Hon varð konfirmerað í 1847. Tá var hon 16 ár. Kirkjubókin boðar frá, at bæði foreldrini vóru deyð og Frederikka tænastugenta í Elduvík. Eftir øllum at døma fór hon til skyldfólk í Elduvík at vera, tá mamman varð sett í varðhaldið. At tæna øðrum gjørdist hennara lagna. Hon tænti ymsastaðni í landinum, var ongantíð gift ella fekk børn, men doyði í Elduvík sum gomul genta mett av døgum.

Øðrvísi lagaði lagnan seg fyri lítla Adam. Í kirkjubókini fyri Suðurstreymoy stendur, at Adam Jeremiassen doyði 2 ára gamal 19. apríl 1843 av bróstsjúku. Hetta var bert tvær vikur, áðrenn Maren varð send niður. Eftir øllum at døma var hetta hansara harða lagna. Ein lagna, ið avgjørt ikki var óvanlig millum føroysk smábørn fyri 150 árum síðan. Ikki minst hjá teimum, sum ongan góðan áttu at verja seg. Men kortini kanska ikki. Torført er at lata vera við at ynskja, at kirkjubókin, so ósannlíkt tað enn ljóðar, sigur ósatt.

Skjølini boða í hvussu so er frá, at myndugleikarnir høvdu lagt ætlanir fyri, hvussu framtíðin hjá Adami skuldi lagast. Kanska deyðsváttanin í kirkjubókini í veruleikanum bert var eitt skálkaskjól. Á mannamunni hevur í hvussu so er verið greitt frá, at drongurin fór niður til Danmarkar við mammuni. Spennandi er at lesa í skjølunum, at 10. desember 1842 skrivaði Pløyen eitt bræv til danska Kanselíið um Adam. Hann greiddi frá tí vanlukkuligu støðu, sum drongurin var í og segði seg vóna, at okkurt kundi gerast fyri at verja hann. Pløyen spurdi seg fyri, um nakar møguleiki var hjá Adam at verða sendur til Danmarkar. Helst til eitt stað, har eingin kendi hann, og har hann ongantíð fór at frætta um síni fyrstu ár.

Umbønin varð játtað. Fyri eitt gjald upp á 40 ríkisdálar um árið skuldi Kjøbenhavns Fattigvæsen syrgja fyri, at drongurin varð sendur til okkurt danskt húski at vera. Tá alt var avgreitt, skuldi danska Kanselíið saman við stýrinum fyri Kjøbenhavns Fattigvæsen skipa fyri, at allar neyðugar broytingar vórðu gjørdar í føði- og dóps-

skjølunum hjá dreinginum. Hann skuldi fáa eina nýggja byrjan, og syndarligi upprunin strikast fyri altíð.

Skal takast saman um søguna um Maren Jeremiasdatter, so kann staðfestast, at Jeremias veruliga hevur orsøk til at ganga friðleysur runt á Kambsdali enn í dag. Tað kann fyri so vítt vera líka mikið, um hann veruliga var sekur í blóðskemd ella ikki. Tað, sum evnaveika dóttirin skuldi ígjøgnum tey tvey árini, hon sat í varðhaldinum og síðani tíðarskeiðið, sum hon sat í Kjøbenhavns Forbedringshus, var ómenniskjaliga hart, og abbabørnini gjørdust finnur í einum talvi, sum tey onga ávirkan høvdu á.

Men kanska onkur annar eisini skuldi havt ein feril av ringari samvitsku! Ákærin, sum kravdi harðasta dóm, og dómarin, sum vildi døma eitt neyðardýr til deyðis, gjørdu í veruleikanum bert sítt arbeiði og tó. Eitt sindur av samhuga og ein vilji til at lata ivan ráða, tí kanska Maren segði satt, tá hon útlegði Nicolai Johannesen til pápa, og ikki tá hon nevndi Jeremias, hevði kanska kunnað linkað eitt sindur um revsingina. Nicolai Johannesen, sum hevði kunnað hjálpt Maren til eina linari revsing, um hann hevði viðgingið, at hann var pápi Adam, um tað so var sannleikin ella ikki, kundi kanska eisini havt ávísar trupulleikar við sálarfriðinum.


**Heimildir:**

Fólkateljing fyri Føroyar 1834
Fólkateljing fyri Føroyar 1840
Fólkateljing fyri Føroyar 1845

***Færø provsti:***

Kirkjubók fyri Eysturoyar prestagjald 1809-1816
Kirkjubók Eysturoyar prestagjald 1816-1832
Kirkjubók Eysturoyar prestagjald 1832-1854
Ministerialbók Tórshavn 1836-1844
Eysturoyar prestagjald: Indkomne breve 1825-1846

***Fútin:***

Stævninger og indlæg i criminelle sager 1838-1854
Strafferegister

***Sorinskrivarin:***
Skifteprotokol 1828-1836
Skifteprotokol 1836-1841
Dokumenter til Justitsprotokollen 1836-1841
Dokumenter til Justitsprotokollen 1842-1844

***Amtið:***
Domsakter i Justitssager 1838-1861
Copibog, Litra T 1840-1844
Copibog Litra U 1841-1843
Copibog Litra V 1843-1844

Um høvundin:
*Anja Wenningstedt*
Cand. phil. í søgu og siðsøgu frá Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

*Erland Viberg Joensen*

# Arbeiðara- og fakfelagsrørsla í Havn fram til 1950-árini – og skjølini á skjalasavninum ABA

Arbeiðara- og fakfelagsrørslan hevur altíð verið altjóða rørsla, men tað er onki at taka seg aftur í, at rørslan í Føroyum í øllum førum fram til uml. 1960 á summum økjum var lítið framfør. Hon hevði sínar barnasjúkur at stríðast við. Tað sæst í brøvum og øðrum samskiftisskjølum millum føroysk og donsk fakfelags- og javnaðarfólk um arbeiðskor og -viðurskifti í Føroyum frá fyrru helvt av 20. øld, krígsárini 1940-45 undantikin, og inn í 1950-árini. Tað sæst eisini í skjølum, at sambandið úteftir at kalla bara var við København. Hetta sambandið er kortini spennandi og gevur innlit í, hvussu arbeiðarafjøldin í Havn flutti seg aftur og fram millum tradition og modernitet í sama søguskeiði.

Skjølini eru varðveitt í København á savninum *ABA*, Arbejdermuseet & Arbejderbevægelsens Bibliotek og Arkiv. Ásannast skal, at skjølini á ABA ikki altíð geva nøktandi svar upp á allar spurningar, og tað vantar eitt skjalasavn hjá føroysku arbeiðara- og fakfelagsrørsluni, ið miðvíst savnar inn skjøl, skrásetir og skipar tey í savnindi. Men við skjølunum á ABA verður hetta ein roynd at lýsa átøkini at skipa tað arbeiðandi fólkið í Havn í felagsskapir og áhaldandi at styrkja hesar. Samstundis er eisini ætlanin at nerta við samfelagsmenningina, og harnæst at seta arbeiðara- og fakfelagsrørsluna í Havn inn í ein søguligan samanhang.

## Tað fyrsta sambandið við Danmark

Tað var fyrst av øllum í blaðnum Tingakrossi, frá 1901 og fram, at røddir sóust á prenti, at arbeiðsfólk áttu at skipa seg í feløg, og krøv um virðiliga løn fyri virðiligt avrik gjørdust alt meira sjálvsøgd. Blaðstjórin C. Holm-Isaksen, *Kristin í Geil*, mundi vera hann, sum førdi pennin. Hann var eisini uppií, tá ið Havnar Arbeiðsmannafelag í 1916 varð stovnað.[1] Tann frílynti og upplýsti Kristin í Geil eigur eisini tað elsta 'arbeiðarabrævið', vit vita um, úr Havn til Danmarkar, og sum skjalasavnið ABA hevur í varðveitslu. Í 1908 hevði hann drúgva lýsing av føroysku arbeiðara- og fiskimannafjøldini til fólkatingslimin Sabroe, og støðan var sambært honum ikki at samanbera við hjá arbeiðarafjøldini í Danmark. M.a. hetta, at „*…som overalt hos os er det den manglende Solidaritet blandt Arbejderne, som hindrer Fremgangen.*" Í frágreiðingini fæst tann fatan, at tað bilaði við upplýsing hjá tí arbeiðandi fólkinum í Føroyum, og sostatt eisini í Havn. Fjøldin var stutt sagt ikki nóg búgvin, eitt nú fiskagenturnar, sum vóru „*…kraftige og robuste, de fleste af dem, vante til spartansk Levemaade, og i aandelig henseende lidet udviklede, følgelig veltilfredse med saadan som de har det.*"[2] Fólk høvdu ikki neyðuga vitan um altjóða arbeiðara- og fakfelagsrørslu, og harnæst var tað sosiala medvitið og stættamedvitið millum nakað og onki. Brævið er annars forvitnisligt hjá tí, sum vil hava at vita um sosialsøgu, hugmyndir, arbeiðskor, arbeiðskvinnur v.m., og telist millum mest áhugaverdu brøv um føroysk viðurskifti á hesum skjalasavninum í København. Vónirnar hjá Kristin í Geil, at arbeiðsfólk og fiskimenn máttu ganga saman í fakfeløg, vóru ongar. Tað er her at minnast á, at samfelagið var nýtt, kapitalistiska skipanin var smátt um smátt komin, og komandi. Fakfeløgini komu stutt eftir, og Kristin í Geil fór skeivur. Eftir at Føroya Reiðarafelag varð stovnað í 1908, fór Føroya Fiskimannafelag at virka í 1911.

## Sambandið við Stauning – tíðin fram til 1925

Arbeiðararørslan í Havn byrjaði við Havnar Arbeiðsmannafelag í 1916. Fyrsti formaður felagsins, bakarin J. P. Davidsen, hevði sama ár samband við sosialdemokratiska ráðharran Thorvald Stauning í Danmark um hugsjónarligan og fakligan styrk. J. P. Davidsen bað um at fáa fólk upp at leggja lag á at fáa eina javnaðarrørslu á føtur. Tað sama, men heldur øðrvísi, gjørdi prentarin Jógvan A. Rasmussen í 1917. Sagt varð Stauning frá, at Havnar Arbeiðsmannafelag varð



*Vestara bryggja miðskeiðis í 1950-árunum. (Føroya Fornminnissavn, snr. 5111FO144).*

stovnað, men í Havn vantaði ein felagsskapur *„Da den store Del af den arbejdende Befolkning her i Byen saavel som over alle Øerne staa aldeles ukendte overfor alle øvrige Landes sociale Arbejderkrav har vi ment at det kunde være på sin Plads om man fik stiftet en Forening hvor der blev drøftet sociale Spørgsmaal og holdes Oplæsninger der kunde give Medlemmerne klarere Begreber om de sociale Krav om hvilke de paa forskellig Maade har faaet alt andet end de bedste Forestillinger.“*[3] Jógvan Rasmussen bað um viðtøkurnar hjá einum viðurkendum donskum arbeiðsloysiskassa og hjá einum sosialistiskum val- ella kjakfelag. Í svarinum frá Stauning varð sagt, at Føroyar vóru einasta amtið í Danmark, har javnaðarflokkurin ikki varð skipaður, og sendi hann tí Jógvani Rasmussen viðtøkur hjá einum arbeiðsloysiskassa, og sjálvsagt hjá einum sosialdemokratiskum felagi til kunningar.[4] Har prentarin í Havn ikki var so nágreiniligur, var Stauning greiður yvir, at arbeiðarafjøldin í Havn og í Føroyum átti at gerast sosialdemokratisk. Flokkur og rørsla vóru partur av somu søk.

Tá ið blaðað verður í skjølunum á ABA í København, sæst, at tað vóru Havnin og Tvøroyri, sum fyri ein stóran part høvdu samband við København. Tað er kanska ikki undrunarvert, men tað ber til at spyrja, hvørji kor arbeiðararørslan hevði at virka undir í Vági og í Klaksvík, í hinum báðum størru býunum, har eitt stórt virksemi var við nógvum arbeiði. Hvussu var og ikki, Tvøroyri og Tórshavn gingu á odda at skipa seg. Her var arbeiðarafjøldin mest sjónlig, har ið virkað var fyri felags medviti og samhuga, at lønarkrøv og -mál sóust, har hugsjónarligir setningar vórðu settir fram – og har ið modernistiska rákið at laða upp fyrimyndina at ganga saman sum ein hópur, og ikki sum ein hópur av einstaklingum, vann frama, og at samskipa eina arbeiðsmegi sum í roynd og veru var siðbundin.

Tað er samstundis eisini ein staðfesting, at arbeiðsfólk í Havn aldri rǽttiliga tóku ta sosialistisku hugsjónina til sín.[5] Tað avdúkar longu hetta stutta samskiftið millum Tórshavn og København fram til 1925, altso áðrenn tann sosialdemokratiska hugsjónin og arbeiðararørslan veruliga festu røtur í Føroyum. Ætlanin, um tað kann orðast so, fyri arbeiðsfólkið fór av lagi. Tað gekk ikki heilt eftir bókini í Havn.

**Flokkur, feløg og blað – árini 1925-28**

Tað hendi so mangt í 1925. Føroya Arbeiðarafelag, Suðurstreymoyar Javnaðarfelag og Froðbiar Sóknar Javnaðarfelag og Føroya Javnaðarflokkur sóu dagsins ljós. Byrjanin á Tvøroyri og í Havn var hin sama. Flokkur og rørsla skuldu renna saman í eina eind, og floksblaðið 'Føroya Social-Demokrat', seinni Sosialurin, kom út í 1927. Til tað fyrsta løgtingsvalið hjá Javnaðarflokkinum í 1928 komu á ting Petur Mohr Dam úr Suðuroy og Maurentius Viðstein í Suðurstreymoy. Tað ber til at siga, at Havnin valdi ein av sínum egnu. Maurentius Viðstein var arbeiðsmaður, hann hevði siglt og var við sínum uppruna í arbeiðarastættini organiskur, meðan lærarin P. M. Dam við sínum politiska tevi, og sum virkin samskipari, umboðaði serliga Tvøroyri – býurin, sum framyvir fór at síggjast at verða mestsum javnaðarbýur burturav.

Maurentius Viðstein var allastaðni, í rørslu og í politikki. Fyrst sum sosialistur í ungdómsárunum í Tjakfelagnum, virkin í Havnar Arbeiðsmannafelag við fleiri nevndarsessum, ein av stovnarunum av Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, fyrsti formaður Føroya Arbeið-

arafelags, blaðstjóri á Føroya Social-Demokrati og løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin. Í 1925 skrivaði Maurentius Viðstein sum formaður Suðurstreymoyar Javnaðarfelags bræv saman við Johannes Guttesen, formanni Havnar Arbeiðsmannafelags til Stauning, sum nú var forsætismálaráðharri, og sum sama ár hevði verið á vitjan í Íslandi og í Føroyum, og eisini í Havn, at *„Første Gang i Livet befinder den thorshavnske Arbejder sig i den Situation, at han maa lægge Ørene til og høre om den store Arbejderrejsning og den socialdemokratiske Lære om Arbejdernes Frigørelse. Virkningen blev desto større, da det var selve Statsministeren, der stod Ansigt til Ansigt med den thorshavnske Arbejder og opmanede dem til at slutte sig sammen, ikke kun fagligt, men ogsaa politisk.“*[6] Stauning sá fyri sær, at fólk ikki bara skuldu standa saman fakligt, men áttu eisini at hava eitt javnaðarpolitiskt medvit.

Ráðini hjá forsætismálaráðharranum munnu hava ljóðað væl hjá summum, men longu í 1927, og hóast M. S. Viðstein varð valdur í løgtingið í 1928, var rumbul í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag. Tað vóru kreftir í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum stovnaðu javnaðarfelagið í býnum, og tí hevði gongdin í tí politiska felagnum týdning fyri arbeiðararørsluna í Havn. Maurentius Viðstein segði í brævi til Alsing Andersen, floksskrivaran í danska javnaðarflokkinum: *„Du ved jo Besked om at der indenfor vor Forening er en Klike, der altid er i Opossition, og forsøger at hindre Fremskridtet baade paa den ene og anden Maade ...“* Viðstein sipaði til ein uppstillingarfund Suðurstreymoyar Javnaðarfelags til løgtingsvalið í 1928 um prentaran Jógvan Rasmusen, sum *„...var den første af Kliken der tog ordet paa en noksaa udfordrende Maade overfor Socialdemokratiet i Danmark, hvorimod han, som adskillige Gange før, lovpriste de russiske Tilstande. Han erklærede at han nærede saa ømme Følelser overfor det færøske nationale Spørgsmaal.“*[7] Jógvan Rasmussen og fýra aðrir vórðu við atkvøðugreiðslu koyrdir úr, og ein sætti segði seg sjálvan úr felagnum. Vegir teirra máttu skiljast, og tað er onki at taka seg aftur í, at eins og í javnaðarflokkinum setti hetta klárt kílar í arbeiðararørsluna í Havn. Við valið í 1928 stillaðu somu sjálvstýrissosialistar í Havn upp, tó uttan at fáa stórvegis stuðul, men tað elvdi til órógv. Hinvegin myndaði tað nettupp rákið og teir mótpolar, ið frammanundan vóru í føroyskum politikki fram til valið í 1928: samband-sjálvstýri.

Fakfelagspolitiskt var Tvøroyri framman fyri Havnina. Tvøroyri var meira modernað. Her verður hugsað um, at arbeiðskvinnur á Tvøroyri gingu saman í Fiskepigernes Fagforening í 1922, meðan arbeiðskvinnur í Havn fyrst stovnaðu teirra Havnar Arbeiðskvinnufelag í 1936. Í 1928 var tað so, at í Havn skuldi støða takast til tjóðskaparspurningin, og tað tykist ikki hava verið trupulleikin hjá arbeiðararørsluni á Tvøroyri, og gongdin í næststørsta býi landsins var frá fyrsta degi klassisk hjá teirri skipaðu arbeiðarastættini. Fakfeløg, flokkur og samvinna gjørdust ein eind.

**Sosio-búskaparliga skeiðið uml. 1850-1935**

Tað veldst um, hvussu menningin av samfelagnum skal skiljast. Verður hugt at, hvussu vinnulívið eftir avtøku kongliga handilsins í 1856 innrættaði seg í einum peningaleysum samfelagi, og hvørjar mekanismur tað hevði í sær, so var tað við kendu kontrabókaskipanini, har reiðarar, arbeiðsgevarar og keypmenn lótu arbeiðsløn umvegis kontrabók, soleiðis at útreiðslur og inntøkur hjá fólki vórðu mótroknaðar. Hetta var lagið fram til 1937, tá ið lønarútgjald í reiðum peningi kom í gildi, hóast hildið verður, at skipanin fór partvíst úr gildi í Havn fyrst í 1920-árunum, og partvíst helt fram ið hvussu er hjá arbeiðskvinnum í Havn eftir 1937.[8]

Tað eru fleiri uppfatanir av hesi skipan, men hon eyðkendi ta handilskapitalistisku tíðina. Tað verður sagt, at reiðarin, arbeiðsgevarin og keypmaðurin, ofta var sami persónur í hesum søguskeiði, ikki hevði tøkan pening, fyrr enn fiskurin varð seldur á marknaðinum uttanlands. Tað verður eisini sagt, at hjá fiskimanni, -gentu, arbeiðsfólki, var skipanin eyðmýkjandi, og harafturat kundi tú einans handla hjá tí, tú vart í vinnu hjá. Tú kundi jú ikki taka tínar inntøkur ella útreiðslur við yvir í onnur handilshús. Annað var, hvat ið hendi í hesum tíðarskeiði. Sum sagt skipaðu reiðarar seg í felag í 1908. Havnar Arbeiðsgevarafelag varð stovnað í 1916, og Tvøroyrar Arbeiðsgevarafelag í 1918. Politiskt fekk tann borgaraligi Vinnuflokkurin tvey umboð á ting í 1936. Hann varð endurstovnaður sum Fólkaflokkurin í 1939, eftir at Sjálvstýrisflokkurin var farin í tvíningar. Sjóvinnubankin varð stovnaður í 1932, og Føroya Fiskaexport, seinni Fiskasølan, í 1936. Í 1930-árunum var vinnulívið fyri nógvum húsagangi, árini vóru merkt av arbeiðsloysi, og tó sást framstig við meiri framkomnari trolaravinnu. Vinnulívið og kapital-

urin skipaðu seg betur, tó at arbeiðsgevarafeløg um landið fyrst funnu saman í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 1943.

**Rørsla og politikkur á Tvøroyri og í Havn í 1930-árunum – málið um M. S. Viðstein**

Í 1930-árunum fekk arbeiðararørslan á Tvøroyri við javnaðarpolitiskari ávirkan í lag vinnuvirkini *Ísvirkið*, Arbeiðaranna *Kolavirki* og *Arbeiðaranna Trolaradrift*, AT. Arbeiðsfólk á Tvøroyri tóku tann kooperativa andan til sín, høvdu samvinnufeløg. Arbeiðarafeløgini, politiski flokkurin og samvinnan fingu í felag úrslit. Í 1929 kunnaði Petur Mohr Dam danska forsætismálaráðharran, at tað var sjálvsagt, at tann politiska leiðslan, blaðið og fyrisitingin hjá fakfeløgunum vóru í Havn, men Tvøroyri var altso væl frammanfyri. Síðani tók hann fram ætlanirnar um omanfyri nevnda vinnulív og segði, at *„Jeg har sagt til Viðstein, at Socialismen sejrer ikke i Thorshavn, førend den forstaar at samle sig om konkrete Opgaver, om Realiteterne – Positiviteterne.“*[9] Um her verður meint við, at javnaðarfelagið í Suðurstreymoy og arbeiðararørslan í Havn vantaðu innihald, ella um Maurentius Viðstein kanska var í so utopiskur,[10] at har var onki ítøkiligt í væntu, so var tað ikki longur trygt undir fótum á politiska pallinum hjá Maurentius S. Viðstein. Fyri at gera stutt av, so varð hann ikki longur blaðstjóri á Føroya Social-Demokrati í 1932. Árið eftir gekk so mikið illa í hond, at P. M. Dam róði framundir, at M. S. Viðstein skuldi hava havt eitt ávíst samband við kommunistar.[11] Og í 1934 skrivaði P. M. Dam í einum brævi til Hans Hansen, floksskrivara í danska javnaðarflokkinum, at *„Det er ubehageligt at rense ud, nu lige efter at Viðstein er falden.“*[12] Fram til 1934 var Maurentius Viðstein floksformaður, og árini 1934-36 sat hann uttanflokka á tingi. Tá var hansara tíð í løgtings-, arbeiðara- og fakfelagspolitikki liðug.

Maurentius Viðstein hevur her fingið nakað av umrøðu. Tað hevur hann eisini uppiborið. Hann var sum sagt allastaðni tey fyrstu árini, men í so máta skramblaði alt saman í Havn í 1930-árunum. Sambandið millum sosialdemokratisku hugsjónina og arbeiðararørsluna í býnum dragnaði. Eitt dømi sæst í brævi í 1938 frá P. Karbech Mouritsen til formannin í danska landsfelagsskapinum De samvirkende Fagforbund, DsF, at undantikið á Tvøroyri, var onki sosialdemokratiskt arbeiðarafelag í landinum. Í Havnar Arbeiðs-

mannafelag høvdu teir flestu formenninir verið javnaðarfólk, men har høvdu somuleiðis eisini verið borgarligir í nevndini, og skuldi tað hava eydnast „Erhvervspartiets Tjenere“ í Vinnu-/Fólkaflokkinum at fáa ein teirra sum formann í felagnum.[13]

Eitt var, at tann sosialdemokratiski arbeiðaraflokkurin og arbeiðarafeløgini í býnum – Havnar Arbeiðskvinnufelag var farið at virka – ikki funnu saman. Harafturat varð fleiri ferðir tosað um, at arbeiðarafjøldin í Havn sjálv skuldi seta vinnufremjandi tiltøk í verk í hesum arbeiðsloysistíðum, men tað varð bara tos. Havnar Arbeiðsmannafelag setti pengar í privatar fyritøkur fyri at varðveita og á tann hátt eisini at skapa arbeiði til limir sínar. Hetta tykist at hava verið tað, ið arbeiðarastættin í býnum hevði at halda seg til. Málið um, og lagnan hjá Maurentius Viðstein, var uttan iva meira til skaða enn gagn fyri at fáa samansjóðað fjøldina í Havn í eina sterka rørslu.

### Sosio-búskaparliga skeiðið 1935-55

Tá ið tað jú veldst um, hvussu menningin av samfelagnum skal skiljast, so síggjast tøkini í privatu vinnuni í 1930-árunum sum byrjanin til eitt nýtt búskaparsøguligt skeið. Sjálvsálitið var kyknað millum vinnulívsleiðarar at savnast um Sjóvinnubankan, og samanrenningin av fiskaútflytarum í Fiskasøluna var eitt stig á leiðini. Trolarar komu til landið, 10 vóru, tá ið kríggið byrjaði. Og kríggið var í mangar mátar ein heilt óvanlig tíð. Av tí at Danmark varð hersett av Týsklandi, og Føroyar vórðu hersettar av Stórabretlandi, var onki samband millum føroyskar og danskar sosialdemokratar og fakfelagsleiðarar árini 1940-45. Tískil ber ikki til at taka til samskiftið millum Tórshavn/Tvøroyri og København, men tað ber til at seta fram, at krígsárini vóru óvanlig við nýggjum siðum og øðrvísi mentaliteti. Tað sást á forbrúki og í materialismu, tað vóru uppgongutíðir, tó at munur var á tilveruni á bygd og í bý. Og har ið bretska hervaldið setti arbeiði og nýgerð í gongd, dagaði ein arbeiðsdagur undan við arbeiði í vaktum, við lýdni og treysti, virkni og úrslitum. Ein andlig ídning var farin at virka millum fólk. Í tíðini eftir krígslok vaks trolaraflotin til uml. 40, men í sambandi við kreppu Sjóvinnubankans í 1950-51 og húsagangi bankans, og somuleiðis sum Vinnulívsgrunnur Føroya Løgtings, sum eisini stuðlaði skipakeyp, varð tómur, steðgaði menningin av samfelagnum at



*Tær pakka fisk á Bacalao í 1950-árunum. (Føroya Fornminnissavn, snr. 5111FO442).*

kalla heilt. Tey flestu av fiskiskipunum vóru vánalig, men tað var eisini ringur fiskiskapur, ringt salt og arbeiðsloysi. Fram til 1955, tá ið Føroya Realkreditstovnur varð stovnaður, og lunnar vórðu lagdir undir at endurnýggja fiskiflotan, vóru trupul ár. Tað sæst eisini í nevndu samskiftisskjølum.

**Arbeiðara- og fiskimannaverkføllini í 1950-árunum og nøkur politisk rák**

Kanska 1950-árini eru tey mest spennandi árini í 20. øld, og kanska tey høvdu sína byrjan longu við krígsbyrjan í 1940. Kríggið vísti seg at vera ein rættiliga góður handil hjá føroyskum skipum og fólkum við vaksandi upphædd á bók uttanlands. Tað loysti seg hjá skipum at flyta fisk á tann enska og skotska marknaðin undir krígnum, og hevði hetta við sær, at hugurin til íløgur í nýggj skip, til keyp av brúktum trolarum, var stórur. Sum sagt vóru tær flestu íløgurnar

ikki væleydnaðar, og onnur búskaparkreppan í 20. øld varð veruleiki. Royndirnar at flyta føroyska samfelagið inn í eina nýggja tíð vóru í fyrsta umfari vanlukkuliga úrslitaleysar.

Í 1951 var aðalverkfall. Tað stóð á gomlum nøglum hjá arbeiðarafjøldini. Annars varð Havnar Handverkarafelag sett á stovn árið fyri. Tað var sjálvsagt, at tann faklærda arbeiðsmegin vildi skipa seg, men tað man hava skert Havnar Arbeiðsmannafelag, tó at fleiri handverkarar eftir egnum ynski sluppu at verða verandi limir í Arbeiðsmannafelagnum.

Men 1950-árini eru ikki rættiliga kannað, og hóast árini ikki eru gloymd, so vantar ein rættilig viðgerð, har orsøkin til kreppuna og ávirkanin á samfelagið veruliga koma fram. Men árini fyri 1951 og tíðin fram til arbeiðaraverkfallið í Havn í 1958, og tíðin eftir, hava nógv at siga fyri, hvussu ið arbeiðararørslan í Havn veruliga royndist í verki, og hvønn leiklut Havnin fekk framyvir.

Men fyrst til Tvøroyrar. Í 1954 fór arbeiðarafyritøkan AT, stoltleikin hjá arbeiðararørsluni á Tvøroyri, undir hamaran.[14] Meðan Tvøroyri kanska ikki fekk mønustingin, blómaði Klaksvíkin harafturímóti við vinnu, virksemi og vøkstri. Tað sosialistiska vinnulívið á Tvøroyri var at enda komið. Kortini virkaði Tvøroyri frammarlaga í føroysku arbeiðararørsluni í 1950-árunum. Tað sást millum annað undir aðalverkfallinum í 1951, har ið Tvøroyri og Havnin í felag hildu á at vera í verkfalli. Hinvegin er at spyrja, um verkføll siga nóg væl frá, um arbeiðararørslan dró eina línu.

Við atliti at arbeiðaraverkføllunum í 1950-árunum er kortini ongin ivi um, at arbeiðarafeløgini yvirhøvur stóðu saman, meðan rørslan hjá fiskimonnum var í tvíningum. Fiskimenn í Suðuroy vóru farnir úr Føroya Fiskimannafelag og stovnaðu í 1934 Suðuroyar Fiskimannafelag. Feløgini kastaðu saman aftur í eitt í 1957.

Í skjølunum á ABA er okkurt um fiskimannaverkføllini í 1953 og 1954. Verkføllini skulu ikki viðgerast, men tað er áhugavert, at lærarin J. H. Danbjørg var formaður í Suðuroyar Fiskimannafelag og løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin 1936-45 og 1950-68, meðan búskaparfrøðingurin Erlendur Patursson var formaður í Føroya Fiskimannafelag og løgtingslimur fyri Tjóðveldisflokkin 1954-66 og 1970-86. Í somu skjølum kemur fram, at Suðuroyar Fiskimannafelag skal hava verið sosialdemokratiskt, og at fleiri nevndarlimir í Føroya Fiskimannafelag sambært somu keldum skulu

hava verið kommunistar, harímillum Erlendur Patursson. Tað er at geva tí gætur, at keldurnar á ABA eru sosialdemokratiskar, og tað er onki prógv fyri, at fiskimenn úti um landið høvdu valt sær eina kommunistiska leiðslu á felagsskrivstovuni hjá Føroya Fiskimannafelag í Havn. Men at teir høvdu eina leiðslu, sum politiskt var loysingarsinnað, er ein onnur og sonn søga. Ein teirra var sum sagt formaðurin, men fyrrverandi løgtingsmaðurin Jákup í Jákupsstovu, sum varð koyrdur úr Javnaðarflokkinum fyri at vera fyri loysing í sambandi við fólkaatkvøðuna í 1946, var felagsskrivari í Føroya Fiskimannafelag 1954-71. Hann var frammanundan stjórnarlimur í Føroya Arbeiðarafelag 1949-53. Jákup í Jákupsstovu gjørdist virkin í Tjóðveldisflokkinum. Saman við Javnaðarflokkinum hevur eisini hesin flokkur søgulig rættindi í føroyskum arbeiðarapolitikki.

Við Tvøroyri á odda hevði Suðuroyggin eina arbeiðara- og fakfelagsrørslu, ið bygdi á eitt trygt sosialdemokratisk grundarlag. Tvøroyri var javnaðarháborgin í landinum, men tað er ilt at siga, hvat Havnin var. Hon var so ikki í sama mun javnaðarsinnað.

**Danska ella føroyska loysnin í 1950-árunum**

Tjóðveldisflokkurin varð stovnaður í 1948 sum eitt beinleiðis úrslit av fólkaatkvøðuni í 1946. Fleiri av stovnarunum høvdu verið í Danmark í lestrarørindum undir krígnum. Tað vóru teir sonevndu asfaltsføroyingarnir, sum mótmæltu, at danska stjórnin ikki vildi kennast við, at føroyskur meiriluti var fyri at loysa frá Danmark. Til løgtingsvalið í 1950 fekk flokkurin tvey umboð vald á ting. Hóast fyrst og fremst loysingarflokkur, var hann eisini arbeiðaraflokkur. Tað er virksemið í fimmtiárunum sjónligt prógv um, og oddafólk floksins høvdu ein heilt serligan leiklut. Í sambandi við møguligan limaskap Føroya Arbeiðarafelags í arbeiðaralandsfelagsskapin í Danmark, DsF, og somuleiðis í sambandi við fiskimannaverkfallið í 1953, vóru donsk umboð í Føroyum og høvdu fundir við fakfelagsleiðarar og arbeiðsfólk. Í frágreiðing teirra varð undrast á leiklutin hjá Erlendi Patursson: *at* hann hevði stovnað nýggjan flokk, *at* hann var blaðstjóri á valgagni floksins, 14. September, og *at* hann harafturat eisini sat sum formaður í Føroya Fiskimannafelag. Teir vístu á, at sama dag, teir komu til Føroya, skrivaði 'Fjúrtandi' um vitjanina. Blaðið hevði verið í herferð móti DsF ið bara hevði til endamáls at taka tað allarsíðsta sjálvstýri frá tí føroyska arbeiðaranum. Erlendur

Patursson skuldi hava sent umboð til DsF, við umbøn um fíggjarligan styrk. Tað hevur ikki eydnast at funnið fram til, hvør ið fór til København, men í einum brævi frá Peturi Mohr Dam til DsF skal tjóðveldismaðurin Hanus við Høgadalsá hava havt eitt felagsskriv frá Suðuroyar Fiskimannafelag og Føroya Fiskimannafelag við til Danmarkar, har spurt varð um styrk til verkfallið hjá fiskimonnum í Føroyum.[15] Umboðini hjá DsF hildu fiskimannafelagsformannin vera listilærdan og vera í einum tvíleiki, og tí vildu tey onki hava við Føroya Fiskimannafelag at gera, so leingi hann sat sum formaður. Á einum fjølmentum limafundi í Havn bóru tey donsku umboðini fram, at tey høvdu víðkaðar fíggjarligar heimildir, men at *„man måtte ikke vente ... at vi først ville vende den højre kind til, dernæst den venstre, for så at stille en åben pengekasse frem til ham, der uddelte lussingerne“*. Sambært somu frágreiðing skuldi búskaparfrøðingurin Sofus Olsen, skrivari í Havnar Arbeiðsmannafelag og partamaður Erlends Patursson, hava luttikið á fundinum.

Niðurstøðan hjá DsF frá Føroyaferðini í 1953 var, at í føroysku arbeiðara- og fakfelagsrørsluni vantaði nógv*: „...det, der først og fremmest tiltrænges, er oplysninger om, hvordan organisationsarbejdet udføres, og det vil derfor være hensigtsmæssigt, om vi ... inviterer et par færøske arbejdertillidsmænd til Danmark med det formål at skole dem i de grundlæggende ting vedrørende fagligt arbejde“*.[16] Tað var ólag í rørsluni. Hon dró ikki eina línu.

Tjóðveldisfólk eiga at fáa pláss í eitt arbeiðara- og fakfelagssøguligt høpi, og søgan í Havn er eisini um Andreu Árting, forkvinnu Havnar Arbeiðskvinnufelags í nærum fjøruti ár, 1937-77. Hon sat somuleiðis í nevndini í Føroya Arbeiðarafelag 1940-58.[17] Niðast á einum brævi frá Andreu Árting í 1953 til DsF um spurningin til møguliga limaskapin hjá Føroya Arbeiðarafelag í DsF stendur við hond ein viðmerking hjá móttakara, ella hjá tí sum viðgjørdi málið í København: *„Andrea Árting (er modstander af indmeldelsen)“*.[18] Hetta er tó ikki nóg mikið at siga, hvørja støðu Andrea Árting sjálv hevði til innlimanina av føroysku rørsluni í donsku rørsluna, men heldur, hvat DsF í København hevði um hana at siga. Andrea Árting var virkin í Tjóðveldisflokkinum, og um hetta mundið var hon skrivari í Føroya Arbeiðarafelag.

**Orð og orðadráttur**

Tíðirnar fyrst í 1950-árunum vóru sum sagt vánaligar. Tað stóð nógv á í politisku skipanini. Kassin var tómur. Tað stóð nógv á í vinnulívinum. Tað bløddi burtur. Tað stóð nógv á hjá arbeiðsfólkum og fiskimonnum. Tað var vinnu- og arbeiðsloysi. Hesi viðurskifti hava uttan iva elvt til ørkymlan í arbeiðara- og fakfelagsrørsluni. Hvørji stig vóru at taka við atliti at verkføllum og líknandi tiltøkum, hvussu skuldi rørslan skipast, og hvønn leistin var at taka til. Skuldi rørslan byggja á tjóðskaparliga grund, ella sum í Norðurlondum og í Europa, á javnaðarhugsjónina, soleiðis sum rørslan í Suðuroy hevði sum sína fyrimynd?

Mestsum øll rørslan hevði høvuðssæti í Havn, landsfelagsskapirnir Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag, og sjálvsagt Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, og høvdu sítt umhvørvi. Í hesum feløgum vóru tjóðveldisfólk. Helgi Øster, fyrsti formaður Havnar Handverkarafelags, var ein av stovnarunum og virkin í sama flokki.[19] Tað var neyvan bara av tilvild, at tjóðveldisfólk vóru í rørsluni – í eini rørslu, har sosialdemokratar høvdu havt søgulig rættindi. Kanska tey hugsjónarliga vóru onkustaðni á vinstravonginum, men tey kundu fyri tað hildið seg burtur og heldur stílað fram ímóti loysing, men tey myndaðu so ein týðandi part av rørsluni, ið sum fyrr sagt var ein altjóða rørsla. Tey vóru í eini lykilsstøðu og fingið ávirkan í Havn.

Hevði tað nakað við hin sætta limin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag at gera, sum segði seg úr felagnum, og hinar fimm, ið vórðu koyrdir úr felagnum í 1927, og sum partvíst hevði við sær, at javnaðarhugsjónin ikki rættiliga fann stevið í høvuðsstaðnum? Hin sætti í javnaðarfelagnum í Havn var Andreas J. Ziska. Tá ið tað kemur til arbeiðaraalmennið í Havn, at miðla og upplýsa, hvussu arbeiðsfólk og arbeiðararørsla skuldu trína fram alment, gjørdi Andreas J. Ziska vart við seg í fleiri umførum. Eitt skifti í árunum 1910-14 var Ziska blaðstjóri á sjálvstýrisblaðnum Tingakrossi. Føroya Fiskimannafelag gav árini 1920-27 út FF-Blaðið. Sjálvstýrismaðurin Rasmus Rasmussen var blaðstjóri. FF-Blaðið lá sambært blaðstjóranum sjálvum sosialdemokratisku leiðini nær. Føroya Social-Demokrat kom í 1927 og gjørdist sum sagt floksblað Javnaðarfloksins. Maurentius Viðstein gav út blaðið Kyndil eina ferð í 1933, og í 1934 gav Ingvard Jacobsen út óhefta arbeiðarablaðið

Arbeiðið nakrar ferðir. Í 1942 trein so sjálvstýrissosialisturin Andreas J. Ziska fram sum skuggin frá 1927 við Fríu Føroyum. Blaðið helt uppat í 1948, árið eftir at 14. September var komin út, og var tað sostatt ikki longur grundarlag fyri at halda fram. Í Fríu Føroyum varð langað út eftir Javnaðarflokkinum, í Føroya Social-Demokrati varð lagt eftir skrivingini í Fríu Føroyum, sum fleiri ferðir var eftir Danbjørg og Dam. Andrea Árting sást millum pennarnar í Fríu Føroyum, og hon fanst somuleiðis at P. M. Dam. Í Fjúrtanda skrivaði Erlendur Patursson í grein í 1948 m.a. hetta um arbeiðarafyritøkuna AT á Tvøroyri, og at Petur Mohr Dam var *„ágrýtin maður og dugandi á ymsan hátt. Honum hepnaðist at savna Tvøroyrarmenn um seg og – ikki at gloyma – hann tevjaði upp danskan pening, ríkispening og bankapening.“*[20] Tað var v.ø.o. ikki mikið at skapa arbeiðspláss. Kapitalurin átti ikki at verið danskur, tykist ljóða í orðaleikinum hesi árini.

**FA inn og út úr DsF – Havnin úr FA**

Men so var tað innlimanin í DsF. Har eru keldurnar á ABA ikki nøktandi. Tær eru mangan um sosialdemokratiskan ótta, men í 1951 var spurningurin um limaskap í DsF uppi at venda í Føroya Arbeiðarafelag. Formaðurin Magnus Tórsheim sá bæði fyrimunir og vansar við innlimanina, sum hevði veitt kr. 50.000 í stuðli til aðalverkfallið. Í 1952 var málið aftur frammi, har tað fall við sannførandi meiriluta. Í 1953 varð FA við atkvøðugreiðslu fyri limaskapi í DsF. Í 1954 tykist FA at vera limur í DsF, men har var ósemja millum limafeløgini í FA um limaskapin. Í 1955 var við stórum meiriluta samtykt at fara úr DsF aftur og heldur hava samstarv millum felagsskapirnar í Danmark og í Føroyum.[21]

Tað er helst ikki nóg góður spurningur at seta sær, hvat hevði hent, um føroyska arbeiðararørslan fult og heilt fór upp í donsku rørsluna, tá ið høvi beyðst, og sostatt hevði tikið í egnan barm og ásannað, at hon tástani var vorðin ein partur av eini altjóða rørslu? Høvdu donsku umboðini ikki rætt, tá ið tey góðu boð frá sær í København um ferð teirra í 1953, *at* føroysku rørsluni rættiliga tørvaði hjálp við atliti at samskipan, *at* tað varð lagt lag á við upplýsing um tey mest grundleggjandi viðurskiftini, og *at* álitisfólk fingu eina upplæring um fakligt arbeiði?

Føroyska rørslan visti av, at henni tørvaði hjálp – í øllum førum

fíggjarliga hjálp í sambandi við aðalverkfallið í 1951. DsF hevði játtað tær kr. 50.000, meðan tað norska LO játtaði kr. 10.000, altso ein fimting av danska stuðlinum. Svenska LO sendi bræv til danska DsF, at tey ikki vildu stuðla. Har høvdu tey ikki áður havt samband við og ongan kunnleika til føroysku rørsluna.[22] Somuleiðis í sambandi við fiskimannaverkfallið í 1953 høvdu formenninir J. H. Danbjørg og Erlendur Patursson sent skriv til arbeiðara- og fiskimannafeløg í Danmark, Noregi, Svøríki og í Íslandi.[23]

Tað er onki til hindurs fyri at taka samanum, at málið um innliman í danska landsfelagsskapin var eitt føroyskt stríðsmál um samband og loysing. Eitt mál, sum hevði sín uppruna í tí politiska veðurlagnum í 1950-árunum, og sum kom sníkjandi inn í føroyskan fakfelagspolitikk. Hevði tann føroyska arbeiðara- og fakfelagsrørslan havt somu kós sum í Suðuroy, kann hugsast, at hon hevði verið partur av teirri donsku og havt tættari samstarv við ta norðurlendsku rørsluna. Við avgerðini hjá Føroya Arbeiðarafelag í 1955 at standa uttan fyri DsF valdi rørslan ikki at vera partur av eini altjóða rørslu, men heldur avbyrging. Hvussu frálík avgerðin var, stendur enn í óvissum.

Í 1956, árið eftir, samtykti ein limafundur í Havnar Arbeiðsmannafelag harafturat at taka seg úr Føroyar Arbeiðarafelag. Í 1957 fór felagið endaliga úr, og í 1958 fór Havnar Arbeiðskvinnufelag eisini úr. Tað er eitt sindur óvist, hví so var, men helst vildu bæði havnarfeløgini hava meira ávirkan í landsfelagsskapinum. Í 1961 fylgdi Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag somu kós sum Havnin og tók seg úr FA.[24] Tað skal sigast, at Andrea Árting, forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag og skrivari í FA, ikki var fegin um, at hennara egna arbeiðskvinnufelag fór úr FA.

Tá ið Havnar Arbeiðsmannafelag í 1958 fór í eitt verkfall um, hvussu yvirtíðin skuldi roknast, og felagið í verki vísti seg sum eitt vælskipað felag við sterkum samanhaldi, arbeiddu limirnir vanliga tíð, men ikki yvir. Hetta var lagið ta fyrstu tíðina, til verkfallið varð sett í verk, og Tórshavnar Havn mestsum lá lamin og óvirkin í vikur. Verkfallið vísti seg at vera óvanliga hart, og tað er ikki av leið at samanbera støðuna undir verkfallinum við harða aðalverkfallið í 1951.[25] Arbeiðsmenninir stóðu at kalla einsamallir, men tó við hjálp frá einstøkum fakfeløgum, ið fóru í 24 tíma samhugaverkfall.

Eitt føroyskt LO var farið fyri bakka, og hóast FA í fleiri umførum

royndi at fáa Havnina inn aftur, spurdist onki burturúr. Verkfallið í Havn í 1958 er ein ábending um, at rørslan var farin um tvøran. Føroya Arbeiðarafelag veitti ongan stuðul til hetta arbeiðaraverkfallið í Havn.

**Onnur sjónarhorn – samandráttur**

Her er tað ikki fremsta uppgávan at vísa á, hvussu støðan er í dag, men síðan Føroya Arbeiðarafelag misti Tórshavn og Klaksvík uml. 1960, hevur landsfelagsskapurin verið skerdur.[26] Kanska onkur hevur hug at vísa á, at orsøkin kann vera um lokalpatriotisk sjónarhorn, men tað er so ikki kannað.

Samanrenningin millum rørsluna og fjøldina av fólki, ið ber rørsluna uppi, er ikki altíð til at greiða. Í 1938 var formaðurin í DsF á vitjan. Føroysk arbeiðsfólk høvdu vánalig lívskor og høvdu brúk fyri upplýsing. Tey vóru *„...afskaaret fra al Oplysning om dansk Kultur. Spørgsmaalet er her, hvorvidt Arbejdernes Radioforbund sammen med 'Arako' under en eller anden Form kan raade Bod paa dette store Savn!"*[27] Í 1951 var DsF eisini í Føroyum. Her var ongin arbeiðsloysiskassi. Fólk høvdu bát og kúgv, álitið í húsarhaldinum. Støðan var vanlukkulig. Tað er kanska órættvíst at taka kreppuárið 1951 fram at umboða eina serliga tíð, men spurningurin er, hvussu væl tað bar til at fáast við upplýsing, tá ið stríðið í gerandisdegnum fylti meira enn at seta seg afturá og lýða á gullkorn, ið komu úr erva. Frá somu ferð kom uppskot um upplýsing og skúling sum tvey ár seinni á hinari ferðini í 1953: *„....at for så vidt man kunne finde den rette frem og bekoste hans rejse til Danmark, ville vi være villige til at lade ham deltage i kursus på højskoler, eventuelt på de af AOF tilrettelagte fagforeningskursus."*[28]

Her er ein arbeiðarafjøld, sum hevur hugsað traditionelt, og sum partvíst hevur havt eina ítøkiliga og siðbundna tilveru. Tá ið ein rørsla verður skipað eftir serligari hugmynd, við reglum fyri, hvussu hin einstaki skal síggja seg vera partur av eini eind, hugsa kollektivt, vísa samanhald og samhuga, hugsa um lønarmál, krevja sín rætt, og rørslan miðar ímóti, at fólkið skal fáa politiskt medvit, má ásannast, at tað politiska medvitið í Havn ikki fylgdi ta sosialdemokratisku leiðini.

Stovnsfestingin av eini rørslu hevur eitt modernistiskt innihald. Arbeiðararørslan í Havn, og fakfelagsrørslan, sum hevði sítt virki í

Havn, hevði harafturat ein annan veruleika at taka støðu til. Tað var tann óloysti tjóðskaparspurningurin. Hann byrjaði at gera um seg í Havn til løgtingsvalið heilt afturi í 1928 og man hava kostað rørsluni ríkiligt. Spurningurin sást ganga aftur heilt inn í 1950-árini. Harafturat, um lurtað verður eftir donsku fakfelagsumboðunum, sum vóru her í 1930- og 50-árunum, vóru føroysk fakfelagsfólk illa skúlaði, og hendingarnar og rákið í seinnu helvt av fimmtiárunum, tá ið arbeiðskvinnu- og arbeiðsmannafelagið í Havn tóku seg úr tí felagsskapi, ið skuldi roynast at vera eitt føroyskt LO, kann benda á, at serliga Havnin, men eisini Klaksvík, ynskti at standa uttanfyri í einsemi.

Tær søguligu keldurnar siga frá eini samtíð, ið er svørt og hvít. Keldur siga tó ikki alt. Tær á ABA í København siga t.d. onki um fólkaatkvøðuna í 1946 og ríkisrættarligu støðu Føroya, sum elvdi til eitt vónbrot hjá helvtini av veljarunum, eitt vónbrot, sum fann vegin inn í fakfelagsrørsluna. Tíðin eftir kríggið í 1945, vegamótið millum eitt traditionelt og eitt modernað samfelag, hevði við sær, at landið í sjálvari tilgongdini at nútímansgera vinnutólini og -lívið, settist aftur og fór á húsagang. Keldurnar á ABA siga frá sosialum viðurskiftum, men onki um, at Føroyar í fimmtiárunum í roynd og veru vóru eitt tilafturskomið samfelag. Eitt skeið í søguni, har afturgongd spakuliga vendist til framgongd í 1960-árunum við nýggjum fiskiflota, fiskavirkjum og byggivinnu, har landið ídnaðarmenti seg, men har ið arbeiðarafeløgini ikki megnaðu at standa saman um eina sameinda føroyska fakfelagsrørslu.

## Bókmentir og keldur


Dalsgaard, Jóannes. 1996: *Fylking 75 ár*. Arbeiðsmannafelagið Fylking, Tvøroyri.

*Helgi Øster 80 ár 13. oktober 2001. Fyrsti formaðurin rundað 80.* Handverkarin nr. 1, okt. 2001. Havnar Handverkarafelag, Tórshavn.

Joensen, Erland Viberg. 1992: *Tórshavns arbejderklasse 1900-1930.* Serritgerð, Aarhus Universitet. (Ópr.).

Joensen, Erland Viberg. 2003: *Lossingarmenn í Havn*. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn.

Joensen, Erland Viberg. 2003: *Erhvervsidentiteter på Færøerne i det*

*20. årh.* In: Daniel Thorleifsen (red.): De vestnordiske landes fælleshistorie. (95-105). INUSSUK. Arktisk forskningsjournal 2, Nuuk.

Jóansson, Tórður. 1975: *Saman tí standið. Fimti ára minningarrit Føroya Arbeiðarafelags.* Føroya Arbeiðarafelag, Tórshavn.

Nolsøe, Jens Pauli. 1986: *Arbejderklassen på Færøerne 1890-1940 – en analyse af dens tilblivelse og udvikling.* Serritgerð, Københavns Universitet. (Ópr.)

Nolsøe, Lena. 2000: *Andrea Årting.* In: Jytte Larsen et al. (red.): Dansk kvindebiografisk leksikon I. (74-75) Rosinante Forlag A/S, København.

Patursson, Erlendur. 1983: *Sjón og seiggj.* Lagt til rættis: Steinbjørn B. Jacobsen og Heðin M. Klein. Tjóðveldisflokkurin.

Thomsen, Hans. 1991: *Havnar Arbeiðsmannafelag í 75 ár. 1916-1991.* Havnar Arbeiðsmannafelag, Tórshavn.

***ABA***

LO-arkiv, ks. nr. 480, 863, 2133.

SD-arkiv ks. nr. 101, 102, 104.

## Notur

1 Fylking á Tvøroyri varð stovnað árið fyri sum tað fyrsta sjálvstøðuga arbeiðarafelagið í landinum.

2 Bræv frá Chr. Holm-Isaksen til P. Sabroe, dagf. í Tórshavn 22. apríl 1908. ABA SD-arkiv, ks. nr. 101, løbenr. 1: Agitation paa Færøerne. Endurgivið í Erland Viberg Joensen: Erhvervsidentiteter på Færøerne i det 20. årh., s. 99-100.

3 Bræv frá Joen A. Rasmussen til Th. Stauning, dagf. í Tórshavn 24. november 1917. ABA SD-arkiv, ks. nr., 101, løbenr. 1: Agitation paa Færøerne.

4 Bræv frá Th. Stauning til Joen A. Rasmussen, dagf. í København 7. januar 1918. ABA SD-arkiv, ks. nr. 101, løbenr. 1: Agitation paa Færøerne.

5 Viðgjørt av Erlandi Viberg Joensen: Tórshavns arbejderklasse 1900-1930.

6 Bræv frá Johannes Guttesen og M. S. Viðstein til Th. Stauning, dagf. í Tórshavn 18. oktober 1925. ABA SD-arkiv, ks. nr. 101, løbenr. 2: Færøerne 1925.

7 Bræv frá M. S. Viðstein til Alsing Andersen, dagf. í Tórshavn 17. desember 1927. ABA SD-arkiv, ks. nr. 101, løbenr. 3: Færøerne 1927.

8 Erland Viberg Joensen: Lossingarmenn í Havn, s. 315-316.

9 Bræv frá P. M. Dam til Th. Stauning, dagf. á Tvøroyri 6. juni 1929. ABA SD-arkiv, ks. nr. 101, løbenr. 6: Færøerne 1928-29.

10 Søgufrøðingurin Jens Pauli Nolsøe hevur sæð M. S. Viðstein sum radikalan sosialist, kollveltingarhugaður av lyndi. Sí Arbejderklassen på Færøerne 1890-1940 – en analyse af dens tilblivelse og udvikling, s. 106.

11 Bræv frá P. M. Dam til 'Ærede Partifælle', dagf. á Tvøroyri 24. mai 1933. ABA

SD-arkiv, ks. nr. 102, løbenr. 3: Viðsteins Aktion 1933 og anden Korrespondence paa denne Foranledning.

12 Bræv frá P. M. Dam til Hans Hansen, floksskrivara í danska Javnaðarflokkinum, dagf. á Tvøroyri 13. februar 1934. ABA SD-arkiv, ks. nr. 104, løbenr. 1: Færøerne 1934-35.

13 Bræv frá P. Karbech Mouritsen til Chr. Jensen, fm. í DsF, dagf. Tórshavn 5. juni 1938. ABA LO-arkiv, ks. nr. 480: Færøerne. Vedr. DsF's undersøgelse af de fagorganisatoriske forhold på Færøerne.

14 Ein nærri viðgerð av AT er hjá Jóannesi Dalsgaard: Fylking, s. 478-508.

15 Bræv frá P. M. Dam til Carl P. Jensen, DsF, dagf. á Tvøroyri 1. apríl 1953. ABA LO-arkiv ks. nr. 863, løbenr. 29: Færøernes Arbejderforening – optagelse i DsF.

16 Carl P. Jensen og Kai Nissen: Rapport vedrørende besøg på Færøerne – April 1953. ABA LO-arkiv, ks. nr. 863, løbenr. 29: Færøernes Arbejderforening – optagelse i DsF.

17 Lena Nolsøe: Andrea Árting, s. 74-75.

18 Bræv frá A. Árting til DsF 2. mars 1953. ABA LO-arkiv, ks. nr. 863, løbenr. 29: Færøernes Arbejderforening – optagelse i DsF.

19 Helgi Øster 80 ár 13. oktober 2001. Fyrsti formaðurin rundað 80, s. 5, s. 16-17 og s. 20-21.

20 Pólarnir. Grein í 14. September, 16. januar 1948. Endurgivin í: Erlendur Patursson: Sjón og seiggj, s. 54.

21 Tórður Jóansson: Saman tí standið, s. 179-202.

22 Brøvini eru í ABA LO-arkiv, ks. nr. 2133.

23 Skriv frá Føroya Fiskimannafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag, E. Patursson og J. H. Danbjørg: 'Til fisker- og arbejderforeninger i Danmark, Norge, Sverige og Island', dagf. í Tórshavn 1. mars 1953. ABA LO-arkiv 2133, løbenr. 12: Føroya Fiskimannafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag mod Fiskerederne på Færøerne.

24 Hans Thomsen: Havnar Arbeiðsmannafelag í 75 ár, s. 191-194, og Tórður Jóansson: Saman tí standið, s. 214-234.

25 Um verkfallið í Havn í 1958, sí Erland Viberg Joensen: Lossingarmenn í Havn, s. 320-323.

26 Tað hevur tó verið samband hesi skjótt 50 árini um lønarsamráðingar, og síðani samstarvið 'Samtak' millum Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag fór at virka fyri stuttum, tykist at renna saman, yvirskipað sum óformligt millum feløgini.

27 Chr. Jensen: Arbejderne paa Færøerne og deres Kaar. ABA LO-arkiv, ks. nr. 480: Færøerne. Vedr. DsF's undersøgelse af de fagorganisatoriske forhold på Færøerne.

28 Carl P. Jensen til forretningsudvalgets medlemmer, dagf. 30. august 1951. ABA LO-arkiv, ks. nr. 2133, løbenr. 1: Færøerne. Vedr. støtte til en generalstrejke på Færøerne m.m. 1950-51.

Um høvundin:
*Erland Viberg Joensen*
Cand. mag. í søgu og fólkalívsfrøði, ph.d.
Útb. frá Fróðskaparsetri Føroya, Aarhus Universiteti og Københavns Universiteti. Savnsvørður á Fornminnissavninum.

*Hanna í Horni*

# Bretska hersetingin av Føroyum undir 2. veraldarbardaga

**við serligum atliti til leiklutin hjá Hilbert amtmanni og Reventlow, danska sendimanni í London**

Ætlanin við greinini er at lýsa samanspælið millum bretar, danir og føroyingar, og tað maktstríð, ið stóðst millum donsku umboðsmenninar og Fólkaflokkin í Føroyum. Hetta maktstríð stóðst av spurninginum um tað møguliga manglandi mandatið hjá donsku umboðsmonnunum í útlegd, eftir at danska stjórnin valdi samarbeiðspolitikkin við týska hersetingarvaldið aftan á týsku innrásina hin 9. apríl 1940.

Íslendingar høvdu, eftir týsku hersetingina av Danmark, yvirtikið øll mál, ið enn lógu í Keypmannahavn við krígsbyrjan. Henda avgerð var grundað á, at danska stjórnin ikki longur var før fyri at røkja íslendsk áhugamál. Hetta varð góðtikið av dønum, ið enntá hjálptu íslendingum við uppbyggjanini av umboðanini í London. Grundað á somu grundgevingar skutu fólkafloksmenn upp á tingi, at Føroyar skuldu fylgja íslendska døminum, men uppskotið fall. Danir gjørdust varugir við, at Ísland ætlaði at fara úr ríkisfelagsskapinum og óttaðust, at um ikki væl varð ansað eftir, so fóru Føroyar eisini. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at løgtingsvalið og fólkatingsvalið í 1943 vístu framgongd fyri føroysku sjálvstýrisrørsluna. Tískil varð roynt av øllum alvi frá danskari síðu at varðveita status quo í Føroyum, meðan sambandið við Danmark

var kvett. Aðalmálið hjá Hilbert amtmanni varð sostatt at forða fyri broytingum í viðurskiftum Danmark-Føroyar millum.

Hóast áheitanir frá starvsfelaganum í Washington, Henrik Kauffmann sendimanni, vildu Hilbert amtmaður og Eduard Reventlow, sendimaður í London, ikki víkja frá teirra loyaliteti móti danska konginum og stjórn hansara í Keypmannahavn. Hóast hetta ikki hóvaði bretum, eydnaðist tað Hilbert og Reventlow, í nógv størri mun enn fólkafloksmonnunum, at ávirka bretar í avgerðum teirra, sum viðvíktu føroyskum viðurskiftum. Í greinini verður roynt at lýsa, hví so var.

Greinin er eitt tillagað brot úr doktararitgerð við heitinum „British and U.S. post-neutrality policy in the North Atlantic area 09.04.1940-1945: the role of Danish representatives". Umframt á Landsskjalasavninum, so hevur eisini verið granskað á skjalasøvnum í Bretlandi (Public Record Office, PRO, í Kew, London), Danmark (Rigsarkivet), Norra (Riksarkivet), Íslandi (Þjóðskjalasafnið) og USA (National Archives and Records Administration, NARA, í Washington D.C., og The Franklin D. Roosevelt Library í Hyde Park, NY).

**Avleiðingarnar av týsku hersetingini á danska uttanríkiskervið**

Støðan hjá donsku umboðsmonnunum í útlegd gjørdist sera trupul, tá Týskland, uttan stórvegis mótstøðu, hersetti Danmark. Orsøkin til at Danmark ikki valdi at økja um hermegi sína, tá tekin vóru um, at Týskland gjørdi seg til reiðar til kríggj, var fyrst og fremst tann, at danir sóu seg ikki førar fyri at forða eini týskari herseting, óansæð hvussu nógv teir brynjaðu seg til eitt møguligt kríggj. Avgjørt varð tí at halda seg uttanveltað og bert at hava eina nóg stóra hermegi til at halda eftirlit við, at danski neutraliteturin varð respekteraður. Misjavnt var tó, hvussu hetta eydnaðist teimum; ferð eftir ferð varð danski neutraliteturin brotin, bæði av týskarunum og bretunum, ið hvør í sínum lagi ákærdu hin fyri at bróta danska neutralitetin og samstundis fáa betri sømdir frá dønum.

Hóast bretar væl skiltu, at Danmark lítið og einki fekk gjørt móti Týsklandi, og tískil vóru meira ella minni tolerantir yvirfyri, at danir vendu blinda eygað móti týsku brotini á danska neutralitetin, so merkti tað ikki, at bretar tóku undir við avgerðini hjá donsku stjórnini um áhaldandi at virka undir týskum trýsti eftir

hersetingina. Henda avgerð hjá donsku stjórnini og tekin um, at hon alsamt meir og meir læt seg stýra av týska hersetingarvaldinum, hevði við sær, at donsku umboðsmenninir vórðu noyddir at gera vertslandinum hjá sær greitt, hvar teirra loyalitetur lá.

Meðan norska stjórnin og norski kongurin við familju flýddu til London,[1] avgjørdu danska stjórnin og danski kongurin at verða verandi í Danmark. Felags fyri donsku umboðsmenninar í útlegd var, at teir formelt vórðu útnevndir av kongi. At venda sær móti kongi, ið hevði valt at verða eftir hjá danska fólkinum fyri á tann hátt at styrkja áræði dana undir týsku hersetingini, varð av summum, her í millum Reventlow greiva, sendimanni í London, og Hilbert, amtmanni, ikki hildið at tæna endamálinum.

Týska hersetingin av Danmark hevði við sær, at alt samband[2] millum stjórnina og umboðsmenninar í teimum londunum, ið vóru í kríggj við Týsklandi, varð kvett. Donsku umboðsmenninir vórðu sostatt meir ella minni sleptir upp á fjall. Hóast nógv tekin vóru um, at týskarar fyrr ella seinni fóru at hertaka Danmark, valdi danska stjórnin at trúgva lyftinum, ið týskararnir góvu, tá hon, sum tann einasta av Norðurlondunum, undirskrivaði 'non-aggression' avtaluna við Týskland í 1939.

## Leikluturin hja amtmanninum í Føroyum, danska sendimanninum í London og bretska konslinum í Føroyum

Áðrenn týsku hersetingina av Danmark var leikluturin hjá Hilbert amtmanni tann, at hann var ráðgevi í málum viðvíkjandi Føroyum hjá donsku stjórnini í Keypmannahavn. Tá sambandið við Danmark varð kvett, varð stórt ivamál um, hvør støðan hjá amtmanninum nú varð. Hóast Fólkaflokkurin royndi at fáa uppskot ígjøgnum á tingi um, at Løgtingið skuldi yvirtaka alt valdið í Føroyum, nú Hilbert umboðaði eina stjórn, ið ikki virkaði frítt, eydnaðist tað Hilbert, við stuðli frá Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum, gjøgnum „Midlertidig Styrelsesordning", at tryggja sær útinnandi vald, meðan sambandið við Danmark var kvett. Harumframt tryggjaði hann sær eisini sýtingarrætt á lóggávuøkinum.[3] Í hesum sambandi kann nevnast, at Hilbert, vegna kreppulógir, tiknar á Fólkatingi í 1939, hevði fingið víðkaðar heimildir.

Bretar lovaðu, tá teir hertóku Føroyar uttan loyvi frá dønum,



*C. A. Hilbert og frú. (Føroya Fornminnissavn).*

at hersetingin skuldi fáa so lítla ávirkan á viðurskiftini Danmark-Føroyar millum sum gjørligt. Tað var tí í teirra áhuga, at Hilbert helt áfram sum amtmaður. Somuleiðis lovaðu bretar, at teir ikki skuldu leggja seg út í innanhýsisviðurskifti.

Beint eftir týsku hersetingina av Danmark boðaði Reventlow bretsku stjórnini frá, at hann fór heim aftur til Danmarkar. Nakrar dagar seinni broytti Reventlow, eftir áheitan úr Danmark, tó meining og boðaði frá, at hann varð verandi. Hetta, tí at mett varð, at hann tænti donsku áhugamálunum betur við at vera verandi í Bretlandi, har nógvir danir vóru búsettir.

Meðan støðan hjá Hilbert í eygum bretanna var greið, so var støðan hjá Reventlow øðrvísi. Í London umboðaði hann eina stjórn, ið nú var stýrd av fíggindanum. Diplomatiska tignin var tískil tikin frá honum. Hann fekk tó loyvi at virka sum ráðgevi í donskum áhugamálum, ið ikki vóru rakt av týsku hersetingini av Danmark, harímillum Føroyum. Hóast diplomatiska tignin varð tikin frá honum, og ivi ráddi millum summi av embætisfólkunum í bretska uttanríkismálaráðnum, so hevði Reventlow, gjøgnum tíðina hann hevði verið í London, skaffað sær tætt sambond við lykilspersónar í bretska uttanríkismálaráðnum, serliga í Northern Department, ið m.a. tók sær av Danmark og hinum Norðanlondunum, teirra millum Føroyum, Íslandi og Grønlandi.

Bæði Hilbert og Reventlow vóru greiðir yvir, at støða teirra í Føroyum og London, so leingi sum Danmark var hersett av týskarum og Føroyar av bretum, var tengd at bretskari 'goodwill'. So hvørt sum danska stjórnin í Keypmannahavn meir og meir læt seg trýsta av týskarunum, tess meira royndu bretar at leggja trýst á Hilbert og Reventlow um at fylgja sendimanni dana í Washington, Henrik Kauffmann, og avnokta týskstýrdu donsku stjórnina. Hilbert og Reventlow lótu seg ikki trýsta av bretum í fyrstani, tí teir vóru bangnir fyri, at tað kom at skaða teir og umdømi teirra í Danmark. Eisini óttaðist Hilbert fyri, at ein slík almenn avnoktan av donsku stjórnini fór at styrkja um argumentatiónina hjá Fólkaflokkinum um, at grundarlagið fyri, at amtmaðurin framvegis skuldi hava vald í Føroyum, ikki var til staðar. Bæði Hilbert og Reventlow vórðu hinvegin noyddir at taka frástøðu frá stjórnini í Keypmannahavn, tá Danmark í 1943 undirskrivaði anti-komintern avtaluna við Týskland, samstundis sum August-uppreisturin í 1943 endaði við, at danska stjórnin sleit samarbeiðspolitikkin við týska hersetingarvaldið og legði frá sær.[4] Hereftir fingu embætismenninir í miðfyrisitingini ábyrgdina av at stýra og umsita landið, tað sokallaða „Departementchefstyret".

13. apríl 1940 hertóku bretar Føroyar. Sama dag boðaði Winston S. Churchill frá í Undirhúsinum, at Bretland hevði hertikið Føroyar; men, legði Churchill afturat, at bretar fóru at lata dønum oyggjarnar aftur í sama standi, tá Danmark aftur varð frítt. Sama dag komu skip við bretskum herliði til Føroyar; umborð var eisini Frederic A. Mason, ið júst var settur sum bretskur konsul í Føroyum. Mason, ið tá bert var 26 ára gamal, helt seg fáar dagar frammanundan skula fara til Íslands at arbeiða sum fulltrúi á konsulátinum í Reykjavík. Hann kendi tí lítið og einki til føroysk viðurskifti, og tí var nærliggjandi hjá honum at søkja sær ráð hjá amtmanninum, ið var hægsti danski myndugleiki í Føroyum. Bretar vóru væl greiðir yvir, at teir høvdu hertikið Føroyar uttan loyvi frá dønum, og tískil var dentur lagdur á, at Mason beinanvegin skuldi tryggja sær, at viðurskiftini millum hann og amtmannin vórðu góð. Tað var skjótt, at Hilbert, ið var væl eldri, hevði virkað í Føroyum sum amtmaður síðani 1936 og hevði tískil nógvar royndir og kendi viðurskiftini, fekk stóra ávirkan á tann



*Frederic Mason.*

unga og óroynda bretska konsulin. Hetta sæst aftur í samskiftinum millum Mason og bretska Uttanríkismálaráðið, serliga við atliti at stríðnum millum amtmannin og Fólkaflokkin.

**Virksemið hjá danska og bretska embætisverkinum í Føroyum**

Bretska hersetingin av Føroyum var væleydnað. Gott samband var millum bretsku hermenninar og føroyska fólkið, og sigast kann, at hetta var ein fyrimyndarlig herseting. Í Íslandi, t.d., var støðan ikki eins góð, og ofta var samanborið millum bretsku herliðini landanna millum um, hvussu ymisk viðurskiftini vóru.

Burtursæð frá onkrum smáum ólótum, ið bretar hildu seg vera noyddar at revsa, so gjørdu bretar alt fyri at sleppa undan at leggja seg út í viðurskifti Føroyar-Danmark millum. Tað eydnaðist teimum eisini í stóran mun; tó var ein hending, ið legði stórt trýst á viðurskiftini landanna millum: tað var „Flaggstríðið".

Mason hevði bert verið í Føroyum í fáar dagar, tá trupulleiki stóðst av, hvørjum øðrum frámerki enn Dannebrog føroysku skipini nú skuldu hava, tá tað ikki longur varð trygt at sigla undir donskum flaggi. Hilbert noktaði áhaldandi uppskotinum um at nýta Merkið, ið longu var til, men sum var bannað av donsku myndugleikunum. Tað stóð fast í samráðingum; Hilbert og Reventlow royndu at gera sítt til, at tað 'rebelska' flaggið, sum teir kallaðu Merkið, ikki fekk viðurkenning, og tí hevði Reventlow sett ein mann í London at tekna eitt nýtt flagg. Áðrenn hetta var framt, hevði bretski herflotin steðga føroyskum skipum, sum sigldu undir donskum flaggi og givið teimum boð um at strika Dannebrog og nýta annað frámerki í staðin. Tá føroysk skip tann 21. apríl komu til Føroyar við Merkinum vundnum á stong, kom tað dátt við bæði hjá , Mason og bretska uttanríkisráðnum, ið høvdu vónað, at ein loysn varð funnin, ið kundi góðtakast av øllum pørtum.

Upp á spurning seinni, hvørt bretska Admiralitetið hevði biðið føroysku skipararnar um at nýta Merkið, svaraði Admiralitetið, at teir ikki høvdu álagt skiparunum at nýta nakað ávíst flagg, bert okkurt frámerki, ið líktist frá Dannebrog. Tá ein av skiparunum kom við Merkinum, ið hann hevði umborð, varð tað góðtikið av Admiralitetinum, ið ikki kendi nakað til innanhýsisviðurskiftini í Føroyum. Tá skipini, eftir boðum frá Admiralitetinum, komu inn til Aberdeen nakað seinni, varð Merkið í skundi lænt út, so at fleiri

kundu seymast til hini føroysku skipini, ið lógu har. At Føroyar fingu Merkið viðurkent sum føroyska flaggið, var sostatt vegna væntandi samskifti millum bretska uttanríkismálaráðið og Admiralitetið, tí tá skipini fáar dagar seinni stevndu inn á Havnarvág við Merkinum vundnum á stong, vendist ikki aftur. Bretska uttanríkismálaráðið gjørdist ógvuliga illa við av hendingini og gav Admiralitetinum átalu fyri at hava tikið eina slíka avgerð, uttan fyrst at hava ráðført seg við uttanríkismálaráðið.

Hendan hendingin hevði við sær, at Hilbert ákærdi bretar fyri at leggja seg út í innanhýsisviðurskifti og stuðla fólkafloksmonnunum. Hetta var uttan iva brot á tað lyftið, bretar høvdu givið, tá teir hertóku oyggjarnar. Somuleiðis segði Hilbert seg ikki kunna taka undir við avgerðini, tí tað gekk ímóti hansara arbeiðssetningi, nevniliga at tryggja, at formliga støðan Føroyar-Danmark millum var verandi óbroytt. Um Hilbert tók undir við hesum, kundi tað brúkast ímóti honum seinni av fólkafloksmonnunum, óttaðist hann. Mason tók tí og gjørdi eitt nýtt flagg, grønt við hvítum krossi, við vón um, at hetta fór at loysa trupulleikan. Men tá mótmæltu føroyingar, og Mason, ið annars hevði staðið fast við sítt, um at føroyingar og danir máttu loysa hendan spurningin sínámillum og uttan bretskari uppíblandan, sá seg ongan annan møguleika hava enn at viðurkenna Merkið. Mason tók á seg alla ábyrgd av avgerðini, soleiðis at støðan hjá  varð so óskalað sum gjørligt av hendingini. Bretar vildu jú, at einki stríð skuldi standast av hersetingini, ið kundi skaða sambandi millum Danmark og Bretland í framtíðini.

Flaggstríðið fekk stóran týdning fyri eftirtíðina, serliga tá hugsað verður um viðurskiftini millum Føroyar-Danmark og Bretland undir krígnum. Beint eftir hendingina kravdi Hilbert trygd fyri, at bretar ikki aftur fóru at leggja seg í innanhýsisviðurskifti í Føroyum og fekk bretar at skriva skjal, ið staðfesti, at Hilbert hevði teirra stuðul.[5] Hetta nýtti Hilbert hvørja ferð, hann var í stríði við fólkafloksmenninar. So hóast bretar til tíðir høvdu sympati við ynskjunum hjá fólkafloksmonnunum, so var lítið, teir kundu gera. Teir høvdu jú lovað ikki at blanda seg í innanhýsisviðurskiftini millum Danmark og Føroyar og givið Hilbert teirra stuðul skrivliga. So hóast Hilbert tapti í Flaggstríðnum, so varð tað kortini hann, ið fekk størri ávirkan enn fólkafloksmenninir á bretsku myndugleikarnar.



*Hilbert var trúlovari (best man), tá Mason giftist við donsku unnustu síni, Karen Rorholm, ið var stødd í Føroyum undir krígnum.*

Eitt annað, ið gjørdi seg galdandi, tá talan var um, í hvønn mun Hilbert og Reventlow mótvegis fólkafloksmonnunum fingu ávirkað bretsku myndugleikarnar, er, at undir krígnum skuldi alt samskifti millum Føroyar og útheimin fara um bretskar hendur. Brøv og fjarrit vóru sostatt fyrst lisin av bretsku leiðsluni í Føroyum og síðani av avvarðandi embætismonnum í bretska uttanríkismálaráðnum, áðrenn tey vóru send víðari. Hetta dugdu Hilbert og Reventlow, fram um fólkafloksmenninar, at gera sær dælt av. Teir høvdu nærum dagligt samskifti sínámillum og fingu á tann hátt óbeinleiðis ávirkað bretsku fatanina av støðuni í Føroyum. Mason, sum fyrr nevnt, stóð Hilbert nær, og var tí nógv ávirkaður av amtmanninum; frásagnir hansara til bretska uttanríkismálaráðið stuðlaðu tískil tí lýsingini av støðuni, ið Hilbert og Reventlow góvu. At hetta var so, kom til sjóndar, tá næsti konsulin, eftir at Mason var farin, í sínum frágreiðingum gav eina heilt aðra mynd av Hilbert og lýsti hann sum ein stoltan, sjálvgóðan mann, ið var treiskur og ósmidligur, tá talan var um føroysk viðurskifti; ein mann, ið gav sær lítið far um

føroyingin, men helt seg mest fyri seg sjálvan í eini lítlari kliku av elituni í Tórshavn.[6]

Hendan nýggja myndin av Hilbert varð eisini stuðlað av frágreiðingum, ið bretska uttanríkismálaráðið fekk um sama mundið frá herovastunum á nýggju herstøðini, ið kom í sambandi við byggingina av flogvøllinum í Vágum. Hesir herovastar vóru fyri tað mesta í Vágum og tískil í lítlari og ongari kontakt við Hilbert; hetta sást aftur í teirra lýsing av viðurskiftunum í Føroyum, sum brutu frá teimum, ið London frammanundan hevði fingið frá fólki sínum í Tórshavn. Viðmerkjast skal tó í hesum viðfangi, at hjá Mason sjálvum broyttist tónin mótvegis Hilbert eisini í frágreiðingum hansara til bretska uttanríkisráðið ta seinastu tíðina, hann var í Føroyum, tó at hann ongantíð var eins kritiskur og eftirmaður hansara Vorley og herovastarnir í Vágum.[7]

Tey fyrstu árini av hersetingini høvdu Hilbert og Reventlow sostatt ógvuliga gott tamarhald á støðuni og fingu ávirkað bretar so mikið, at tá fólkafloksmenninir gjørdu onkra roynd at fáa ávirkan á bretsku myndugleikarnar, eydnaðist tað donsku umboðsmonnunum at seta kílar í. Besta dømið um, hvussu stóra ávirkan Hilbert og Reventlow høvdu á bretar, var støðan hjá norska konslinum og skrivaranum á norska konsulátinum.

**Norska umboðanin í Føroyum**

Norski konsulin í Føroyum, tá seinni heimsbardagi brast á, var Thorstein Petersen, fólkafloksmaður. Hann og skrivarin á norska konsulatinum, Nils Ihlen, vóru av argastu mótstøðumonnum hjá Hilbert, og Hilbert gjørdi sítt besta til, at hesir skuldu fáa so lítla ávirkan á bretar sum gjørligt. Saman fingu Reventlow og Hilbert bretar at venda sær til norsku stjórnina í London við umbøn um at seta Thorstein Petersen frá, tí at hesin eftir teirra tykki var til ampa fyri viðurskiftini í Føroyum undir hersetingini. Norðmenn vóru ikki fúsir at seta Thorsetin Petersen frá, tí teir óttaðust, at ein slík avgerð fór at skaða viðurskiftini Noreg-Føroyar millum. Hilbert og Reventlow royndu síðani at fáa teir at seta Nils Ihlen frá. Norðmenn vóru enn einaferð trekir og komu við eini aðrari loysn, nevniliga at seta ein aðalkonsul, ið kom at virka yvir Thorsteini Petersen, við vón um, at hetta fór at dempa ágangin frá Petersen móti donsku umsitingini. So var ikki. Eftir áhaldandi trýsti frá Hilbert og Revent-

low og royndir at skaða umdømið hjá Thorsteini Petersen og Nilsi Ihlen, varð hesin seinni, sum eitt kompromis, loystur úr starvi.

## Niðurstøða

Hóast bretar í seinnu helvt av hersetingini meir og meir settu spurning við leiklutin hjá Hilbert amtmanni, so var ongantíð talan um at víkja frá lyftinum, teir góvu dønum, tá teir hertóku Føroyar, nevniliga ikki at blanda seg í formligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Danski søgufrøðingurin, Nils Arne Sørensen (1998),[8] hevur róð framundir, at hetta møguliga kann standast av, at Bretland, sum hjálandaveldi, føldi eitt sindur av loyaliteti móti dønum, og at hetta skuldi vera orsøkin til, at teir ikki blandaðu seg meir, enn teir kundu havt gjørt.

Samanumtikið kann sigast, at Hilbert og Reventlow dugdu framúr væl at fáa sum mest burtur úr truplu støðuni, teir vóru í, meðan sambandið var kvett við stjórnina í Keypmannahavn. Serliga hendingin við norska konsulátinum sigur ikki so lítið um, hvussu stóra ávirkan Reventlow og Hilbert megnaðu at fáa á bretar; hóast teir umboðaðu eina stjórn, ið var stýrd av fíggindanum, fingu teir í hesum førinum bretar at ganga diplomatisk ørindir fyri seg.

Við atliti at bretsku hersetingina av Føroyum eydnaðist tað sostatt Hilbert og Reventlow næstan til fulnar at fremja arbeiðssetning teirra, nevniliga at varðveita Føroyar, í óbroyttum líki, sum part av danska ríkinum.

## Heimildir

Arge, Niels Juel: *Stríðsárini 1940-45,* Bind I, Forlagið Hvessingur, Tórshavn 1985.

Christiansen, Ólavur: *Villinistíggir Upplýstir*, Forlagið Føroyaklettur, Tórshavn 1998.

Reventlow, E: *I Dansk Tjeneste*, Thaning & Appels Forlag, København 1956.

Seymour, Susan: *Anglo-Danish Relations and Germany 1933-45,* Odense University Press, 1982.

Sølvará, H. A: *Løgtingið 150,* Bind I, Løgtingið, Tórshavn 2002.

Sørensen, Nils Arne: „Storbritannien og Det færøske Styre 1940-45“, *Historie* 2 1998, Jysk Selskab for Historie, 193-221.

### *Skjøl*

Landsskjalasavnið, Tórshavn: Fútin, II Verdenskrig 1940-45, 7. A. (Løgtingið, Gerðabók fyri „Stóru Landsnevnd“ 1940. og J. Nr. 4079/3, Færø Amt.).

PRO, London: ADM 1/10739, FO 649/1, FO 371/24783, FO 371/24784, FO 371/29278, FO 371/29279 FO 371/32761, FO 371/36799, FO 371/36819, FO 371/47281.

Rigsarkivet, Keypmannahavn: Privatarkiv: C.A. Hilbert. Arkiv nr. 6685. 8.H.12a/1961/372, 8.H.26/1961/372.

Riksarkivet, Oslo: UD/9974/2.23, De ulønte stasjoner: Tórshavn, Bind II. UD-10440/25.3 Norden. Nordisk samarbeid.

### Notur

1 Norski kongurin og krúnprinsurin vóru í London, meðan krúnprinsessan og børnini vóru í USA.

2 Hendinga fjarrit komu umvegis donsku sendistovuna í Stokkhólmi, men hesi vóru sera avmarkað og av lítlum týdningi; hendingaferðir hjálptu bretar eisini Reventlow og Hilbert at senda einstøk boð til Christian X kong, tá hetta varð hildið at vera neyðugt.

3 Sølvará, H. A.: *Løgtingið 150*, Bind I, Løgtingið, Tórshavn 2002, s. 238.

4 Formliga var stjórnin tó sitandi, eftir áheitan frá kongi, til 5. mai 1945.

5 PRO, FO 371/29278, from Mason to H.M.'s Principal secretary of State for Foreign Affairs, 25.09.41.

6 PRO, FO 371/36818, from Norman Vorley to Warner 08.07.43.

7 PRO, FO 649/1, Faroe Islands: General Report – 1942 (From the British Occupation to August 1942) 06.09.42.

8 Sørensen, Nils Arne. „Storbritannien og Det færøske Styre 1940-45“, Historie 2 1998, Jysk Selskab for Historie, 193-211.

Um høvundin:
*Hanna í Horni*
PhD Swansea University, fulltrúi í Uttanríkisráðnum.